# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. januar 2020 |
| Mál nr.: | 19/00515 |
| Málsviðgjørt: | SPS |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)**

**§ 1.** . Lógin fevnir um fylgjandi fyritøkur og persónar:

1) Realkredittstovnar.
2) Lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar.
3) Tryggingarmeklarar, tá hesir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar.
4) Aðrar fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, sbr. tó stk. 3.
5) Deildir hjá útlendskum fyritøkum, útbýtarir/útdeilarar og umboðsfólk her í landinum, tá hesar útinna virksemi eftir nr. 1- 4.
6) Grannskoðarar og grannskoðarafyritøkur góðkendar sambært grannskoðaralógini.
7) Ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur.
8) Fyritøkur og persónar, sum annars vinnuliga lata somu veitingar sum teir í nr. 5-6 og í § 1, stk. 1, nr. 14 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) nevndu persónsbólkar, heruppií grannskoðarar, sum ikki eru góðkendir eftir grannskoðara-lógini, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar.
9) Útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur, sbr. § 2, nr. 12.
10) Útbjóðarar av spæli, sbr. tó stk. 4.

*Stk. 2.* § 5 fevnir um vinnurekandi, sum ikki er umfataði av stk. 1.

*Stk. 3.* Tryggingareftirlitið kann fyri persónar og fyritøkur, fevnd av stk. 1, nr.

4, áseta reglur um, at lógin heilt ella partvíst ikki skal verða nýtt upp á fyritøkur og persónar, sum bert útinna nevnda virksemi í avmarkaðan mun.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at lógin heilt ella partvíst ikki skal verða nýtt upp á spøl, tó ikki spæliskálar/kasinoir, har mett verður at vera ein avmarkaður váði fyri hvíttvasking ella fígging av yvirgangi.

*Allýsingar*

**§ 2.** Eftir hesi lóg galda hesar allýsingar:

1) Daglig leiðsla: Persónar, sum hava ábyrgd av dagligu leiðsluni hjá einum løgfrøðiligum persóni, undir hesum av rakstri, umsetningi og øðrum úrslitum.
2) Fíggjarlig transaksjón: Ein transaksjón, sum viðvíkur gjaldføri ella aðrari fíggjarligari ogn.
3) Handilssamband: Eitt kundasamband, sum verður stovnað av fyritøkuni ella persóninum, fevndur av lógini, sum stovningarløtuna væntast at halda fram eina tíð, og sum kann fevna um stovnan av kundakonto, kundagoymslu, íverksetan av transakjónum og øðrum virksemi, undir hesum ráðgevingaruppgávur fyri kundan.
4) Korrespondentasamband: Eitt samband millum eina fyritøku, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5 (korrespondentin) til eina aðra fyritøku, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5 (respondentin), har líknandi veitingar verða veittar, sum nevndar í § 2, nr. 2 litra a, í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), undir hesum sambond stovnað við virðisbrævatransaksjónum ella transakjónum av fíggjarfæ fyri eyga.
5) Kundaviðurskifti: Eitt handilssamband við ein kunda ella útinnan av eini einstakari flyting fyri ein kunda, undir hesum í sambandi við at útbjóða spøl.
6) Nærstandandi við ein persón, sum er politiskt ábærur: Ein hjúnafelagi hjá persóni, sum er politiskt ábærur, skrásettur maki, samlivi ella foreldur umframt børn og teirra hjúnafelagar, skrásettu makar og samlivar.
7) Tættur samstarvsfelagi til ein persón, sum er politiskt ábærur:
   a. Ein fysiskur persónur, sum er veruligur eigari av eini fyritøku ella annað slag av løgfrøðiligum persóni saman við einum ella fleiri persónum, sum eru politiskt ábærir.
   b. Ein fysiskur persónur, sum á annan hátt enn nevnt í litra a hava eitt tætt handilsligt samband við ein ella fleiri persónar, sum eru politiskt ábærir.
   c. Ein fysiskur persónur, sum er einasti veruligi eigari av eini fyritøku ella øðrum slagi av løgfrøðiligum persóni, sum man veit er stovnað til fyrimuns fyri ein persón, sum er politiskt ábærur.
8) Politiskt ábærur persónur: Ein fysiskur persónur, sum hevur ella hevur havt eitt av hesum almennu størvum:
   a. Ríkisleiðari, stjórnarleiðari, ráðharri og vararáðharri ella hjálparráðharri.
   b. Tinglimur ella limur í einum líknandi lóggevandi tingi.
   c. Limur í leiðsluni í einum politiskum flokki.
   d. Hægstarættardómari, limur í stjórnarskipanardómstólinum og í i rættarstovni á hægri rættarstigi, hvørs avgerðir bert kunnu roynast í heilt serligum førum.

e. Limur í grannskoðanarrætti og evstu í leiðsluni í einum meginbanka.
f. Sendiharri, chargé d'affaires og høgur heryvirmaður í vápnaða herinum.
g. Limur í fyrisitingarligu, leiðandi ella stýrandi eindini í eini fyritøku, sum er statsogn..
h. Stjóri, varastjóri og nevndarlimur ella persónur við samsvarandi starvi í einum altjóða felagsskapi.

9) Veruligur eigari: Tann ella teir fysisku persónar, sum endaliga eiga ella stýra kundan, ella tann ella teir fysisku persónar, hvørs vegna ein transaksjón ella virksemi verður gjørt, undir hesum:
a. Tann ella teir fysisku persónar í einum felag, fyritøku, felagsskapi v.m., sum endaliga beinleiðis ella óbeinleiðis eiga ella stýra nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum stýra á annan hátt, undantikið eigarar av feløgum, har eigarapartarnir verða handlaðir á einum skipaðum marknaði ella einum líknandi marknaði, sum hevur upplýsingarskyldu sambært ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
b. Dagliga leiðslan, um ongin persónur er eyðmerktur undir litra a, ella um ivi er um, um tann ella teir persónarnir, sum eru eyðmerktir, eru veruligu eigararnir.
c. Tann ella teir fysisku persónar í eini løgfrøðiligari skipan, ment) undir hesum í einum grunni, trustella líknandi,sum endaliga beinleiðis ella óbeinleiðis stýra ella á annan hátt hava ognarskapslíknandi heimildir, undir hesum:
i. Nevndin.
ii. Persónar, sum eru serliga njótanartilskilaðir, ella, um teir einstaklingar sum hava gagn av útlutingum, ikki eru kendir enn, tann bólkurin av persónum, sum hevur høvuðsáhuga í, at ein løgfrøðilig skipan, er stovnað og virkar.
iii. Stovnari, umsitari og verji, um ein slíkur finst.

10) Transaksjón: Ein ella fleiri gerðir, har ein ella fleiri ognir verða fluttar ella avhendaðar.

11) Tómt bankafelag: Ein fyritøka, sum rekur virksemi svarandi til fyritøkur fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-5, sum ikki er fysiskt til staðar í tí landinum, har hon hevur heimstað, ikki hevur leiðsluna ella umstingina í viðkomandi landi, og ikki er partur í eini reguleraðari fíggjarligari samtøku.

12) Útbjóðari av tænastuveitingum til fyritøkur: Ein og hvør, sum ikki er fevndur av § 1, stk. 1, nr. 6-7, tá hesin vinnuliga útinnir fylgjandi virksemi:
a. Stovnar vinnufeløg, fyritøkur ella aðrar løgfrøðiligar persónar.
b. Virkar sum ella syrgir fyri, at ein annar persónur virkar sum leiðslulimur í einari fyritøku ella sum luttakari í einum íognarfelagi ella í einum líknandi starvi í øðrum fyritøkum.
c. Letur heimstaðaradressu ella aðra adressu, ið á ein líknandi hátt er at rokna sum kontaktadressa, og hartil knýttar tænastur, vera tøkar fyri eina fyritøku.
d. Virkar fyri ella sær til, at ein annar umsitur ella stendur fyri

einum grunni, trust ella aðrari líknandi løgfrøðiligari skipan.

e. Virkar fyri ella sær til, at ein annar virkar sum nominee fyri triðjamann uttan so at hesin er ein fyritøka, hvørs eigarapartar o.a. verða seldir á einum skipaðum marknaði, ella einum líknandi marknað, sum hevur upplýsingarskyldu sambært ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.

13) Spælitænstur. Ein tænasta, har tað verður gjørt innskot við peningi í eydnuspæli undir hesum spøl, har úrslitið valdast ávíst hegni ella har tað er heilt tilvildarligt t.d. happadráttur, kasinospøl, pokerspøl, sum verður bjóðað fram á einum ávísum fysiskum stað, ella við at nýta ymsar miðlar, í fjarstøðu, við at nýta elektróniskar miðlar ella aðra samskiftistøkni og eftir áheitan frá einum tænastumóttakara.

**§ 3.** Við hvítvask skilst í í hesi lóg:

1) Av órøttum at taka ímóti ella útvega sær ella øðrum part í fíggjarligum vinningi ella ognum, sum er fingin við revsiverdum lógarbroti.
2) Av órøttum at krógva, varðveita, flyta, hjálpa við avhending ella á annan hátt seinni at virka fyri at tryggja fíggjarliga vinningin ella ognirnar frá einum revsiverdum lógarbroti.
3) Roynd ella medvirkni til slíkar gerðir.

*Stk. 2.* Stk. 1 fevnir eisini um gerðir, framdar av tí, sum hevur framt revsiverda lógarbrotið, sum vinningurin ella ognirnar stava frá.

**§ 4.** Við fígging av yvirgangi skilst í hesi lóg fígging av yvirgangi sum allýst í revislógarinnar § 114 b, tá tað snýr seg um gerðir umfataðar av § 114 í revsilógini .

*Kontantgjaldsbann*

**§ 5.** Vinnurekandi, sum ikki eru fevnd av § 1, stk. 1, mugu ikki taka ímóti kontantgjaldingium á 50.000 kr. ella meira, uttan mun til um gjaldingin verður gjørd í einum ella sum fleiri gjaldingar, sum eru ella sýnast at verða sínámillum tengdar.

*Kapittul 2*

*Váðameting og váðastýring*

**§ 6.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan ella persónurin kunnu verða misbrúkt til hvítvask ella fígging av yvirgangi. Váðametingin skal gerast við støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum og skal fevna um metingina av vágafaktorum, sum eru knýttir at kundum, vørum, tænastum og transaksjónum umframt veitingarvegum og londum ella landafrøðiligum økjum, har handilsvirksemi er. Váðametingin skal skjalprógvast og støðugt dagførast.

*Stk. 2.* Dagliga leiðslan í fyritøkum, fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-4, skal tilnevna eitt starvsfólk, sum hevur fulltrú at taka avgerðir vegna fyritøkuna sambært § 7, stk. 2, § 17, stk. 3, og § 18, stk. 1, nr. 3. Persónurin kann vera limur í dagligu leiðsluni hjá fyritøkuni. Persónurin skal hava nøktandi kunnleika til váðan fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi hjá fyritøkuni til at kunna taka avgerðir, sum kunnu ávirka váðaeksponeringina fyritøkuni. Persónurin skal harumframt hava nøktandi vanligt umdømi, og skal ikki hava havt ein atburð, sum kann geva grund at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í kann áseta reglur um undantøk frá krøvunum í stk. 1 og stk. 2.

**§ 7.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu hava nøktandi skrivligar politikkir, mannagongdir og

eftirlitsskipanir, sum skulu fevna um váðastýring, kundakunnleika-mannagongdir, kanningar-, uppskrivingar- og kunningarskyldu, varðveitslu av upplýsingum, screening av starvsfólki og innanhýsis eftirlit til fullgóða fyribyrging, avmarking og stýring av váðum fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi. Politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir skulu gerast við støði í váðametingini, gjørd eftir § 6 við atliti til støddina av fyritøkuni.
*Stk. 2.* Politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir, sum eru gjørdir sambært stk. 1, skulu góðkennast av tí í § 6, stk. 2 tilnevnda persóni.
*Stk. 3.* Dagliga leiðslan í fyritøkum, fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-4, og sum sambært aðrari lóggávu hava skyldu at hava eina compliancefunktion, skulu tilnevna ein complianceábyrgdarar á leiðslustigi, sum skal hava eftirlit við og meta um mannagongdirnar sambært stk. 1 og tey tiltøk, ið verða gjørd fyri at bøta um møguligar manglar, eru fullgóð.
*Stk. 4.* Nevndin í fyritøkum, sum eru fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-4, og sum hava eina innanhýsis grannskoðan ella innanhýsis egi eftirlit, skulu tryggja sær, at innanhýsis grannskoðanin ella innanhýsis eftirlitið metir um politikkir, virkismannagongdir og eftirlitsskipanir, sbr. krøvini í hesi lóg og reglur ásettar sambært lógini, eru løgd til rættis og virka á fullgóðan hátt.
*Stk. 5.* Fyritøkur skulu, har tað verður mett at hava týdning, tilnevna ein lim í leiðsluni, sum hevur ábyrgdina av, at fyritøkan fremur krøvini í hesi lóg og reglur, kunngjørdar sambært lógini.
*Stk. 6.* Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu tryggja, at starvsfólk, undir hesum leiðslan, hava fingið nóg góða undirvísing í krøvunum í hesi lóg og reglum, kunngjørdar sambærtlógini, umframt viðkomandi krøv um dátuverju.

**§ 8.** Samtøk skulu, umframt krøvini í § 7, hava nøktandi skrivligar politikkir fyri dátuverju umframt nøktandi skrivligar politikkir og mannagongdir fyri at skifta um upplýsingar, sum verða umskiftar við tí endamáli at stríðast móti hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi, innan fyri samtakið.
*Stk. 2.* Fyritøkur, sum eru partar av einum samtaki, skulu umframt krøvini í § 7 virka í samsvari við politikkir og mannagongdir hjá samtakinum.

*Kapitel 3*

*Kundakunnleikamannagongdir*

*Almenn krøv*

**§ 9.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu seta í verk kundakunnleika-mannagongdir, sbr. §§ 10-20, tá
1) tey stovna eitt kundasamband, týðandi umstøður broytast hjá einum kunda, og annars hóskandi tíðir,
2) tey gera eina einstaka transaksjón
   a. upp á í minsta lagi 15.000 evrur, um transaksjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transakjsjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar,
   b. meiri enn 1.000 evrur sum eina peningaflyting, um transaksjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaksjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar, ella
   c. 500 evrur ella meiri við gjaldoyraveksling, um transaksjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaksjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar,
3) tey í sambandi við útboð av spæli taka ímóti innskotum, gjalda út vinningar ella bæði fyri í minsta lagi 2.000 evrur, um transaksjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transakjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar,

4) illgruni er um hvítvask ella fígging av yvirgangi, uttan mun til um treytirnar í nr. 2 og 3 ikki eru loknar, ella
5) ivi er um, hvørt upplýsingar, sum fyrr eru fingnar til vega um samleikan hjá kundanum, eru rættir ella nøktandi.

**§ 10.** Kundakunnleikamannagongdir fevna um fylgjandi:

1) Fyritøkan og persónurin skulu útvega samleikaupplýsingar hjá kundanum.
   a. Er kundin ein likamligur persónur skulu samleikaupplýsingar fevna um navn, p-tal ella líknandi, um viðkomandi ikki hevur eitt p-tal. Hevur viðkomandi ikki eitt p-tal ella líknandi skulu samleikaupplýsingar umfata føðidag.
   b. Er kundin ein løgfrøðiligur persónur skulu samleikaupplýsingar fevna um navn, skrásetingar nr. ella líknandi, um løgfrøðiligi persónurin ikki hevur eitt skrásetingar nr.
2) Fyritøkan ella persónurin skulu kanna samleikaupplýsingar hjá kundanum við støði í skjølum, dáta ella upplýsingum, útvegaðar frá álítandi og óheftari keldu.
3) Fyritøkan og persónurin skulu útvega samleikaupplýsingar hjá tí ella teimum veruligu eigarunum og fremja hóskandi tiltøk fyri at kanna samleikan hjá tí ella teimum veruligu eigarunum, so at fyritøkan ella persónurin við vissu veit, hvør tann ella teir veruligu eigararnir eru. Er kundin ein løgfrøðiligur persónur, skulu undir hesum fremjast hóskandi tiltøk fyri at fáa greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum hjá løgfrøðiliga persóninum.
4) Fyritøkan ella persónurin skulu meta um, og, har tað hevur týdning, útvega upplýsingar um endamál og ætlað slag kundasambandinum.
5) Fyritøkur og persónar skulu støðugt ansa eftir einum føstum kundasambandi. Ansast skal eftir transaksjónum, ið verða gjørdar sum liður í einum kundasambandi, fyri at tryggja at transaksjónirnar samsvara við vitanina hjá fyritøkuni ella persóninum um kundan og handils- og váðaprofilin hjá kundanum, undir hesum, um neyðugt, hvar pengarnir stava frá. Skjøl, dátur ella upplýsingar um kundan skulu støðugt dagførast.

*Stk. 2.* Um ein persónur upplýsir, at hann handlar vegna ein kunda, ella tað annars er ivi um, hvørt ein persónur handlar vegna seg sjálvan, skulu fyritøkur og persónar harumframt eyðmerkja persónin, og samleikin hjá viðkomandi skal kannast hjá álítandi og óheftari keldu. Fyritøkur og persónar skulu harumframt tryggja, at likamligir ella løgfrøðiligir persónar, sum handla vegna ein kunda, hava heimild til tess, sbr. tó § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven).

*Stk. 3.* Fyritøkur og persónar skulu fremja allar kundakunnleikamannagongdir, sbr. stk. 1 og 2. Vavið av kundakunnleika-mannagongdunum kann tó fremjast út frá eini váðameting. Í metingini skulu upplýsingar takast við um endamál, stødd, reglusemi og longd á handilssambandinum. Í metingini skulu í minsta lagi takast við teir tættir, sum standa í skjali 2 og 3.

*Stk. 4.* Fyritøkan ella persónurin skulu kunna prógva mótvegis tí myndugleika, sum hevur eftirlit við at hesi halda lógina, at kunnleikin til kundan er nøktandi í mun til vandan fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

**§ 11.** Fyritøkur, sum bjóða út lívs- og pensiónstryggingar, skulu afturat krøvunum í § 10 útvega upplýsingar um

navn á njótanartilskilaða sambært tryggingarskjalinum. Er talan um ein ónevndan persón ella eina fleirheild av persónum, skulu nøktandi upplýsingar útvegast til at kunna eyðmerkja tann ella teir njótanartilskilaðu útgjaldingardagin.
*Stk. 2.* Samleikaupplýsingar hjá tí ella teimum njótanartilskilaðu skulu kannast við støði í skjølum, data ella upplýsingum, fingnir til vega frá álítandi og óheftari keldu, áðrenn útgjalding fer fram sambært tryggingarskjalinum.

**§ 12.** Tá hjálp verður veitt kundum til stakt virksemi, sum ikki fevnir um eina transaksjón, kann út frá eini váðameting víkjast frá krøvunum í § 10.

**§ 13.** Fyritøkur og persónar skulu kanna samleikaupplýsingar hjá kundanum og tí ella teimum veruligu eigarunum, áðrenn eitt handilssamband við kundan verður stovnað ella ein transaksjón verður framd, sbr. tó stk. 2-4.
*Stk. 2.* Kanningin av samleikaupplýs-ingunum hjá kundanum og tí ella teimum veruligu eigarunum kann uttan mun til stk. 1 tó fremjast meðan handilssambandið verður stovnað, um tað er neyðugt fyri ikki at steðga vanligu virkisgongdini og vandin fyri hvítvasking av pengum ella fígging av yvirgangi er avmarkaður. Kanningin av samleikaupplýsingum skal í slíkum førum gerast skjótast gjørligt eftir fyrsta sambandi.
*Stk. 3.* Fyritøkur og persónar kunnu hóast stk. 1 stovna eina kontu, eina goymslu ella líknandi fyri kundan, ið loyvir transakjónum í virðisbrøvum, uttan at eftirlitið av samleikaupplýsingunum sbr. § 10, stk. 1, nr. 2 og nr. 3, 1. pkt., er gjørt, treytað av at hóskandi trygdartiltøk eru sett í verk, sum tryggjað at transaksjónir ikki verða gjørdar, fyrrenn krøvini eru lokin.
*Stk. 4.* Ein fyribils spælkonta kann stovnast fyri kundan uttan at eftirlitið av samleikaupplýsingunum hjá kundanum er gjørt. Kanningin av samleikaupplýsingum skal í slíkum førum gerast skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan fyri 30 dagar eftir skráseting av kundanum.
*Stk. 5.* Kunnu krøvini í § 10, stk. 1, nr. 1-4, og stk. 2 og 3 ikki lúkast, skal eitt stovnsett handilssamband vera slitið ella gerast upp, og fleiri transaksjónir mugu ikki gerast. Samstundis skal kannast, um fráboðan eftir § 25 skal gerast.
*Stk. 6.* Teir persónar og fyritøkur, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 6 -8, eru, tá tey hjálpa einum advokati í teimum førum, sum nevnd í § 14, stk. 6, 1. pkt., í "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)" undantikin frá kravinum í stk. 2 á sama hátt sum tann advokatur, tey hjálpa.

**§ 14.** Fær ein fyritøka ella persónur kunnleika til, at tær upplýsingar, sum eru fingnar til vega sambært hesum kapitli, ikki eru nøktandi og ikki kunnu dagførast, skal fyritøkan ella persónurin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at forða fyri váðanum fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, undir hesum at umhugsa, um handilssambandið skal niðurlagast, sbr. § 13, stk. 5.

**§ 15.** Áðrenn stovnan av einum handilssambandi við eini stakari transaksjón ella gjøgnumførslu av eini slíkari, verður framd fyri likamligar persónar, skulu fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, kunna kundan um tær reglur sum galda fyri viðgerð av persónsupplýsingum, við atliti til vandan fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.
*Stk. 2.* Persónsupplýsingar, sum eru fingnar til vega sambært hesi lóg ella reglum, ásettar sambært lógini, mugu bert viðgerast við atliti at fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Viðgerð av hesum persónsupplýsingum til onnur endamál, undir hesum handilslig endamál, má ikki fara fram.

*Herd krøv*

**§ 16.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu afturat krøvunum í § 10 og 11 gera herdar kundakunnleikamannagongdir, har mett verður at vandin fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi er øktur. Fyritøkan ella persónurin skulu hava við í metingini teir hávágafaktorar, sum standa í skjali 2 í lógini, og aðrar hávágafaktorar, sum mugu metast at hava týdning.
*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar skulu gera herdar kundakunnleikamannagongdir um kundin hevur heimstað í einum landi, sum stendur á yvirlitinum hjá Europa-kommissiónini yvir lond, har mett verður at øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Við støði í eini váðameting kann kravið í stk. 2 verða slept fyri eina deild ella eitt dótturfelag, sum ein løgfrøðiligur persónur eigur meirilutan í, har løgfrøðiligi persónurin er stovnsettur í einum ES- ella EBS-landi og skal lúka krøv, sum fylgja av direktivi 2015/849/EU af 20. maj 2015 hjá Europa-Tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk móti nýtslu av fíggjarkervinum til hvítvask og fígging av yvirgangi, og deildin ella dótturfelagið, sum fyritøkan eigur meirilutin í, halda politikkir og mannagongdir hjá samtakinum, sbr. § 8, stk. 2.

**§ 17.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu hava mannagongdir fyri at taka støðu til um kundin, veruligi eigarin hjá kundanum, tilskilaði sambært tryggingarskjalinum ella veruligi eigarin hjá rættindahavara er ein persónur, sum er politiskt ábærur, sbr. § 2, nr. 8 ella ein nærstandandi ella tættur samstarvsfelagi til ein persón, sum er politiskt ábærur, sbr. § 2, nr. 6 og 7.
*Stk. 2.* Er kundin ein persónur, fevndur av stk. 1, skal fyritøkan ella persónurin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at staðfesta upprunan hjá fíggjarmiðlunum, peninginum og ognini, sum eru umfatað av handilssambandinum ella transaksjónini.
*Stk. 3.* Stovnan og framhald av einum handilssambandi við ein persón, fevndur av stk. 1, skal góðkennast av tí persóni, sum er tilnevndur sambært § 6, stk. 2.
*Stk. 4.* Herd eftiransing skal vera av einum handilssambandi við ein persón, sum er politiskt ábærur, sbr. § 2, nr. 8, ella ein nærstandandi ella tættan samstarvsfelaga til ein persón, sum er politiskt ábærur, sbr. § 2, nr. 6 og 7.
*Stk. 5.* Er tilskilaði ella veruligi eigarin hjá tilskilaða sambært tryggingarskjalinum ein persónur, fevndur av stk. 1, skal fyritøkan ella persónurin út frá eini váðameting tryggja, at umstøðurnar viðvíkjandi tryggingarviðurskiftunum verða greiddar, og at persónurin, sum er tilnevndur sambært § 6, stk. 2 verður kunnaður um, at útgjaldast skal sambært tryggingarskjalinum, og um so er at tryggingarskjalið heilt ella partvíst verður avhendað.
*Stk. 6.* Heldur ein persónur, sum er politiskt ábærur, uppat í sínum starvi, skulu fyritøkur og persónar í minst 12 mánaðir eftir hetta meta um, um persónurin er ein økt hóttan fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi, og hava herdar kundakunnleikamannagongdir, sbr. § 16, stk. 1, til mett verður, at persónurin ikki er ein økt hóttan fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin skrásetur og almannakunnger eitt yvirlit við nøvnum á persónum, sum eru fevnd av § 2, nr. 8.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um yvirlitið, nevnt í stk. 7, undir hesum reglur um fráboðan, almannakunngering v.m.

**§ 18.** Innan stovnan av einum korrespondentsambandi, sum fer um landamørk, við respondentar frá londum uttan fyri Evropeiska Samveldið, sum Samveldið ikki hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum, skal korrespondenturin afturat kundakunnleika-mannagongdini sambært § 11

1) útvega nóg nógvar upplýsingar um respondentin til at fáa greiðu á hvat virksemi respondenturin hevur, og út frá alment atkomuligum upplýsingum meta um umdømið hjá respondentinum og góðskuna av tí eftirliti, ið er av respondentinum, í viðkomandi landi,
2) útvega nóg nógvar upplýsingar um respondentin til at tryggja, at respondenturin hevur fullgóðar eftirlitsmannagongdir við atliti til at lúka reglur í viðkomandi landi um at stríðast móti hvítvaski og fígging av yvirgangi,
3) fáa góðkenning til at stovna eitt korrespondentsamband hjá tí persóni, sum er tilnevndur sambært § 6, stk. 2, og
4) skjalprógva ábyrgdina hjá korrespondentinum ávikavist respondentinum fyri at lúka treytirnar í hesi lóg.

*Stk. 2.* Hevur ein kundi hjá einum respondentsambandi beinleiðis atgongd til at ráða yvir peningi sum stendur á kontu hjá korrespondentsambandinum, skal korrespondenturin tryggja sær, at respondenturin fremur kundakunnleikamannagongdir og at respondenturin kann lata út kundakunnleikaupplýsingar eftir áheitan frá korrespondentinum.

**§ 19**. Fyritøkur og persónar, fevnd av lógini, mugu ikki stovna ella halda fram við einum korrespondentsambandi við eitt tómt bankafelag.

*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar, fevnd av lógini, skulu fremja hóskandi tiltøk fyri at sleppa undan at stovna korrespondentsambond við fyritøkur, har alment atkomuligar upplýsingar eru um at respondentsambandið letur tóm bankafeløg brúka kontur hjá respondentsambandinum.

*Linari krøv*

**§ 20.** Fyritøkur og persónar, fevnd av lógini, kunnu viðvíkjandi krøvunum í §§ 10 og 11 hava linari kundakunnleikamannagongdir í teimum førum, har mett verður, at váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er avmarkaður. Fyritøkur og persónar skulu staðfesta, um handilssambandið ella transakjónin viðførir ein avmarkaðan váða, áðrenn tey fremja linari kundakunnleikamannagongdir. Við í váðametingini skal fyritøkan ella persónurin taka teir lágváðafaktorar, sum koma fram í skjali 2 í lógini, og aðrar lágváðafaktorar, sum mugu metast at hava týdning.

*Kapittul 4*

*Hjálp frá triðjamanni*

**21.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, kunnu lata triðjamanni upp í hendur at útvega og eftirkanna upplýsingar eftir § 10, stk. 1, nr. 1-4, um upplýsingarnar verða gjørdar tøkar av:
1) Eini fyritøku ella persóni, fevnd av § 1, stk. 1,
2) eini tilsvarandi fyritøku ella persóni, stovnsettur í einum ES- ella EBS-landi ella ein tilsvarandi fyritøka ella persónur í øðrum londum, sum skal lúka krøv um at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi, sum fylgja av direktivi 2015/849/EU af 20. maj 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk móti brúki av fíggjarkervinum til hvítvasking og fígging av yvirgangi, og fyritøkan ella persónurin eru undir eftirliti av einum myndugleika, ella
3) einum limafelagsskapi ella samtøku av fyritøkum og persónum, sum eru nevnd í nr. 1 og 2, um hendan skal lúka krøv um at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi, sum svara til tey krøv, sum fylgja av direktivi

2015/849/EU af 20. maj 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk móti brúki av fíggjarkervinum til hvítvasking av pengum ella fígging av yvirgangi, og limafelagsskapurin ella samtøkan eru undir eftirliti av einum myndugleika.

*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu útvega nøktandi upplýsingar um triðjamann til at hava grundarlag fyri at siga, at hesin lýkur krøv til kundakunnleikamannagongdir og varðveitslu av upplýsingum, sum svara til tey krøv, sum fylgja av direktivi 2015/849/EU af 20. maj 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk móti brúki av fíggjarkervinum til hvítvask og fígging av yvirgangi.

*Stk. 3.* Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu tryggja, at triðimaður bindur seg til, eftir áheitan frá fyritøkuni ella persóninum, beinanvegin at senda avrit av samleika- og eftirlitsupplýsingum um kundan ella veruliga eigaran umframt onnur týðandi skjalprógv.

*Stk. 4.* Uttan mun til stk. 1 – 3 hevur viðkomandi fyritøka ella persónur ábyrgd av at halda skyldurnar sambært hesi lóg.

*Stk. 5.* Stk. 1 verður ikki nýtt upp á triðjapersónar stovnsettir í londum, sum eru á yvirlitinum hjá Europa-kommisiónini yvir lond, har vandin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er mettur at vera stórur. Hetta er tó ikki galdandi fyri deildir og dótturfeløg, sum fyritøkan eigur meirilutan í, sum eru stovnsett í einum ES- ella EBS-landi, um hesar deildir og meirilutaáttu dótturfeløgini til fulnar lúka politikkir og mannagongdir í samsvari við § 8, stk. 2

**§ 22.** Fyritøkur, fevndar av hesi lóg, sum eru partar av einum samtaki, kunnu lata tað yvir til eina aðra fyritøku í samtakinum at lúka krøvini í § 10, stk. 1, nr. 1-4, um samtakið nýtir kundakunnleikamannagongdir, reglur um varðveitslu av upplýsingum og ætlanir til at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi, sum svara til tey krøv, sum fylgja av direktivi 2015/849/EU af 20. maj 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk móti brúki av fíggjarkervinum til hvítvasking av pengum ella fígging av yvirgangi, og at á samtaksstigi verður ført eftirlit av einum myndugleika við at krøvini verða hildin.

**§ 23.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, kunnu velja sambært sáttmála at útveita uppgávur, sum hesi skulu gera fyri at halda hesa lóg, til ein útvegara. Tað er tó ein treyt fyri hesum, at hesar fyritøkur og persónar, áðrenn avtalan um útveitan er gjørd, tryggja sær, at útvegarin hevur neyðugu evnini og orkuna til at átaka sær uppgávuna á ein nøktandi hátt, og at útvegarin hevur neyðugu loyvini til at átaka sær uppgávuna.

*Stk. 2.* Fyritøkan ella persónurin skal, meðan avtalan er, støðugt ansa eftir, at útvegarin fremur uppgávuna í samsvari við krøvini, og við støði í hesum skal støðugt metast um, hvørt útveitanaravtalan er ráðilig.

*Stk. 3.* Skyldan at tilnevna ein persón við fulltrú, sbr. § 6, stk. 2, kann ikki útveitast sambært stk. 1.

*Stk. 4.* Uttan mun til um útveitan er framd, hevur tann fyritøka ella persónur, sum útveitir, ábyrgd av at lúka skyldur sambært hesi lóg.

## *Kapittul 5*

## *Kanningar-, noterings-, fráboðanar- og varðveitsluskylda*

**§ 24**. Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu kanna bakgrundina fyri og endamálið við øllum torgreiddum og óvanliga stórum transakssjónum umframt øllum óvanligum transakjónsrmynstrum og virksemi, sum ikki hava eitt greitt fíggjarligt ella ávísiligt lógligt endamál, fyri at staðfesta, um illgruni er um ella rímilig orsøk at halda, at hesi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Fyritøkur og

persónar skulu, har tað hevur týdning, víðka yvirvøkunaav kundanum við tí endamáli at staðfesta, um transajónirnar ella virksemið sýnast illgrunasom.
*Stk. 2.* Úrslitini av eini kanning skulu noterast og varðveitast, sbr. § 29.
*Stk. 3.* Ein skrásettur persónur hevur ikki rætt til innlit í persónsupplýsingar, sum viðvíkja viðkomandi sjálvum, sum eru ella fara at verða viðgjørdar eftir stk. 1 og 2.

**§ 25.** Fyritøkur og persónar skulu beinanvegin fráboða Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaksjón, figgjarmiðlarella irksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Sama er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við at kundin hevur roynt at gera eina transakjón ella eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at gjøgnumføra eina transakjón ella virksemi.
*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar skulu ikki gjøgnumføra transaksjónir áðrenn kunning eftir stk. 1 er framd, um tey hava vitan um, illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at transkjónin hevur tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi, og um transaksjónin ikki longu er gjøgnumførd. Kann tað ikki steðga at gjøgnumføra transakssjónina, ella metir fyritøkan ella persónurin at tað fer at skaða rannsóknina at steðga, skal fráboðan ístaðin latast inn alt fyri eitt eftir at transakjónin er gjørd.
*Stk. 4.* Fyritøkur og persónar skulu steða við at gjøgnumføra transakjónir til kunning eftir stk. 1 er framd, og tey hava fingið góðkenning frá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, um tey hava vitan um, illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at transakssjónin hevur tilknýti til fígging av yvirgangi. Um avgerð hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet viðvíkjandi inndrátti galda reglurnar í § 26, stk. 4, 2. pkt, í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), samsvarandi.
*Stk. 5.* Ein skrásettur persónur hevur ikki rætt til innlit í persónsupplýsingar, sum viðvíkja viðkomandi sjálvum, sum eru ella fara at verða viðgjørd eftir stk. 1 og 2.
*Stk. 6.* Tryggingareftirlitið kann áseta nærri reglur um, hvussu fráboðanarskyldan til Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, sbr. stk. 1, tekniskt kann haldast.

**§ 26.** Grannskoðarar, sum nevnt í § 1, stk. 1, nr. 7, eru undantiknir skylduni í § 25 at fráboða við støði í upplýsingum, sum hesir hava fingið frá ella heinta inn um eitt viðskiftafólk, tá teir umboða eitt viðvkiftafólk í Skatta- og avgjaldskærunevndini. Undantakið í 1. pkt. er galdandi uttan mun til, um upplýsingarnar eru fingnar áðrenn, undir ella aftaná málið í Skatta- og avgjaldskærunevndini.
*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar, sum nevnt í § 1, stk. 1, nr. 6-8, eru, tá teir hjálpa einum advokati áðrenn, undir og aftan á eitt rættarmál ella hjálpa til við at staðfesta rættarstøðuna hjá einum viðskiftafólki, undantikin frá skylduni at fráboða í sama mun, sum tann advokaturin, teir hjálpa, sbr. § 27, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven).
*Stk. 3.* Stk. 1-2 verður ikki nýtt, um fyritøkan ella persónurin veit ella átti at vitað, at viðskiftafólkið biður um hjálp við hvítasking ella fígging av yvirgangi fyri eyga.

**§ 27**. Um ein eftirlitsmyndugleiki sambært hesi lóg ella toll- og skattafyrisitingin fær kunnleika til viðurskifti, sum gevur orsøk til at halda, at hesi kunnu hava tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi, sum er fevnt av fráboðanarskylduni í § 25, stk. 1, skal myndugleikin boða Statsadvokaten

for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet frá hesum.

**§ 28.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu varðveita fylgjandi upplýsingar:

1) Upplýsingar, fingnar til vega í sambandi við at lúka krøvini í kapitli 3, undir hesum samleika- og eftirlitsupplýsingar og avrit av vístum samleikaskjølum.
2) Skjalprógv fyri og skráseting av transakjónum, sum verða framdar sum partur av einum handilssambandi, ella einari einstakari transakjón.
3) Skjøl og skrásetingar viðvíkjandi kanningum, gjørdar sambært § 25, stk. 1 og 2.

*Stk. 2.* Upplýsingar, skjøl og skrásetingar, sum nevnd í stk. 1, skulu varðveitast í minst 5 ár eftir at handilssambandið er hildið uppat ella einstaka transaksjónin er framd. Persónsupplýsingar skulu strikast 5 ár eftir, at handilssambandið er hildið uppat ella einstaka transaksjónin er framd, um ikki annað er ásett í aðrari lóggávu.

*Kapittul 6*

*Virksemi um landamørk o.a.*

**§ 29.** Fyritøkur, sum reka virksemi í einum øðrum EU- eller EBS-landi, skulu tryggja sær, at stovnsetta fyritøkan heldur tær reglur um hvítvask og fígging av yvirgangi, sum eru galdandi í viðkomandi landi.
*Stk. 2.* Fyritøkur, sum hava deildir ella dótturfeløg, har tey eiga meirilutan, sum eru stovnsett í einum landi, sum ikki er eitt EU- eller EBS-land, og har krøvini til at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi eru linari enn krøvini í hesi lóg, skulu tryggja sær, at deildin ella dótturfelagið, har felagið eigur meirilutan, lúka tey krøv, sum verða sett í hesi lóg og krøvunum um dátuvernd, í tann mun tað ikki er í stríð við rættarreglur í tí landi, har deildin ella dótturfelagið, har felagið eigur meirilutan, eru stovnsett.
*Stk. 3.* Loyva rættarreglur í einum landi sum ikki er eitt EU- eller EBS-land, ikki at krøvini í hesi lóg verða framd sbrt. stk. 2, skal fyritøkan fremja eyka tiltøk fyri at tryggja, at váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi í deildunum ella dótturfeløgunum, har felagð eigur meirilutan, verður rikin aftur á annan hátt. Loyva rættarreglur í viðkomandi landi ikki at krøvini í hesi lóg verða framd, gevur fyritøkan tí myndugleika, sum ansar eftir at fyritøkan heldur hesa lóg, sbrt. kap. 11, boð um hetta.

**§ 30.** Fyritøkur í einum samtaki skulu skifta um upplýsingar við aðrar fyritøkur í samtakinum um, at illgruni er um at peningur er vinningur frá eini brotsgerð ella fyri at vera tengt at fígging av yvirgangi, og har tað er framd fráboðan eftir § 25, stk. 1 ella 2. Fyritøkur í einum samtaki mugu ikki skifta um persónsupplýsingar sambært 1. pkt. uttan tað sum er neyðugt fyri at lúka kravið.

**§ 31.** Tryggingareftirlitið kann áseta reglur um tiltøk í mun til lond og landøki fyri at lúka krøv ella tilráðing frá Financial Action Task Force.

*Kapittul 7*

*Starvsfólk*

**§ 32.** Fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 6-10, skulu hava eina skipan, har starvsfólk gjøgnum ein serligan óheftan og sjálvstøðuga rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hesa lóg og reglur, givnar sambært henni. Fráboðan til skipanina skulu kunna gerast ónavngivið.
*Stk. 2.* Skipanin sambært stk. 1 kann setast á stovn við felags semju.
*Stk. 3.* Stk. 1 verður bert nýtt fyri fyritøkur og persónar, sum hava meiri enn 5 starvsfólk. Skipanin, nevnd í stk. 1, skal

vera sett í verk í seinasta lag 3 mánaðir eftir, at fyritøkan ella persónurin hevur sett sætta starvsfólkið.
*Stk. 4.* Eftirlitsmyndugleikin kann í serligum førum, har myndugleikin metir, at tað er nyttuleyst at seta eina skipan í verk, gera undantak frá kravinum í stk. 1.

**§ 33.** Fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1. nr. 6-10, mugu ikki koma einum starvsfólki undir ólagaliga viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur fráboðað brot ella møguligt brot hjá fyritøkuni ella persóninum á hesa lóg og reglur, givnar sambært lógini, til ein eftirlitsmyndugleika ella til eina skipan í fyritøkuni.
*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, mugu ikki koma einum starvsfólki undir ólagaliga viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur gjørt eina innanhýsis fráboðan um illgruna um hvítvasking og fígging av yvirgangi ella ein fráboðan til Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet sambært § 25, stk. 1 eller 2.
*Stk. 3.* Starvsfólk, hvørs rættindi eru brotin við at brot er framt á stk. 1 ella 2, kunnu fáa játtað eitt endurgjald. Endurgjaldið verður ásett við atliti at tíðini, starvsfólkið hevur verið í starvi, og umstøðurnar í málinum annars.
*Stk. 4.* Tað kann ikki víkjast frá stk. 1-3 til skaða fyri starvsfólkið.

*Kapittul 8*

*Tagnarskylda og ábyrgd*

**§ 34.** Fráboðanir og upplýsingar, sum fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, lata í góðari trúgv sambært § 25, stk. 1 og 2, og støðgan av transakjónum sambært § 25, stk. 3 og 4, hava ikki við sær nakra ábyrgd fyri fyritøkuna ella persónin, starvsfólkini ella leiðsluna hjá hesum. Víðarilatan af upplýsingum í hesum sambandi kann ikki metast sum brot á tagnarskylduna.

**§ 35.** Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, leiðsla og starvsfólk í hesum fyritøkum og hjá hesum persónum, umframt grannskoðarar ella onnur, ið útinna ella hava útint serligar uppgávur fyri fyritøkuna ella persónin, hava skyldu til at halda loyniligt, at fráboðan er latin eftir § 25, stk. 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1.
*Stk. 2.* Upplýsingar um, at fráboðan er latin eftir § 25, stk 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1, kunnu eftir áheitan latast víðari til teir myndugleikar og felagsskapir, ið ansa eftir, at henda lóg verður yvirhildin, ella til rættarverjuendamál.
*Stk. 3.* Upplýsingar um, at fráboðan er latin eftir § 25, stk 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1, kunnu latast víðari millum fyritøkur í samtøkum, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-12 , og aðrar fyritøkur í samtakinum, ið hava heimstað ella eru heimahoyrandi í einum ES- ella EBS-landi.
*Stk. 4.* Fyritøkur, fevndar av stk. 3, kunnu lata víðari upplýsingar um, at fráboðan er latin eftir § 25, stk 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1, til deildir og dótturfeløg í triðjalondum, har fyritøkan eigur meirilutan, treytað av, at hesar deildir og dótturfeløg yvirhalda politikkir og mannagongdir hjá samtakinum, herundir mannagongdir í sambandi við útveksling av upplýsingum í samtakinum, og at politikkir og mannagongdir hjá samtakinum lúka krøvini í direktiv 2015/849/EU frá 20. mai 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk ímóti nýtslu av fíggjarkervinum til hvítvask av peningi ella fígging av yvirgangi.
*Stk. 5.* Upplýsingar um, at fráboðan er latin eftir § 25, stk 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1, kunnu latast víðari millum fyritøkur og persónar,

fevnd av § 1, stk. 1, nr. 6 og 8, og líknandi fyritøkum, sum hava heimstað ella eru heimahoyrandi í einum ES- ella EBS-landi ella í einum triðjalandi, ið lýkur krøvini í direktiv 2015/849/EU hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk ímóti nýtslu av fíggjarkervinum til hvítvask av peningi ella fígging av yvirgangi, um bæði tann persónur, sum letur upplýsingarnar víðari, og tann persónur, sum upplýsingarnar verða latnar til, hava felags ognarskap, felags leiðslu ella felags ræði við yvirhaldan av reglunum um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi.
*Stk. 6.* Upplýsingar um, at fráboðan er latin eftir § 25, stk 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1, kunnu latast víðari til fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-12, treytað av, at

1) upplýsingarnar viðvíkja sama viðskiftafólki og somu transaksjón,
2) tann, ið móttekur upplýsingarnar, virkar undir krøvum til fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, sum svarar til krøvini í direktiv 2015/849/EU hjá Europa-tinginum og Ráðnum um fyribyrgjandi tiltøk ímóti nýtslu av fíggjarkervinum til hvítvask av peningi ella fígging av yvirgangi, og
3) tann, ið móttekur upplýsingarnar, virkar undir treytum viðvíkjandi tagnarskyldu og verju av persónsupplýsingum.

*Stk. 7.* Stk. 5 og 6 eru ikki galdandi fyri fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 8, sum veita somu tænastur sum ognarmeklarar ella ognarmeklarafyritøkur.
*Stk. 8.* Tagnarskyldan í stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at grannskoðarar, uttanhýsis bókhaldarar og skattaráðgevar ráða sínum viðskiftafólki frá at fremja ólóligt virksemi.

*Kapittul 9*

*Eftirlit v.m.*

*Tryggingareftirlitið*

**§ 36.** Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við, at fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5, halda hesa lóg og reglur, settar sambært lógini.
*Stk. 2.* Tryggingarráðið er partur av eftirlitinum eftir stk. 1 við tí málføri, sum ráðið er tillutað sambært § 191 í lóg um tryggingarvirksemi.

**§ 37.** Fyritøkur og persónar, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-5, og veitarar og undirveitarar hjá hesum, skulu lata Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum neyðugar eru til nýtslu í sambandi við eftirlitið.
*Stk. 2.* Tryggingareftirlitið kann til eina og hvørja tíð uttan rættarúrskurð við at vísa hóskandi heimild fáa atgongd til fyritøkur og persónar, fevnd av stk. 1, við tí fyri eyga at innheinta upplýsingar, heruppií við eftitliti á staðnum.
*Stk. 3.* Tryggingareftirlitið kann til eina og hvørja tíð, uttan rættarúrskurð, við at vísa hóskandi heimild fáa atgongd til ein veitara ella ein undirveitara við tí fyri eyga at heinta upplýsingar um tað útveitta virksemið. Likamliga atgongdin hjá Tryggingareftirlitinum til hølini hjá veitaranum skal framganga sum eitt krav í tí útveitanarsáttmálanum, sum verður gjørdur millum útveitanarfyritøkuna og veitaran. Um ein útveitanarsáttmáli ikki inniheldur krøv um likamligu atgongdina hjá Tryggingareftirlitinum til fyritøkuna hjá veitaranum, kann Tryggingareftirlitið krevja, at tað útveitta virksemið framyvir antin verður rikið av útveitanarfyritøkuni sjálvari ella verður útveitt til ein annan veitara innan eina av Tryggingareftirlitinum ásettari freist.
*Stk. 4.* Tryggingareftirlitið kann krevja at fáa atgongd til allar upplýsingar, undir hesum roknskapir og roknskapartilfar, útskriftir úr bókum, onnur virkisskjøl og elektroniskt goymdar upplýsingar, sum metast neyðugar fyri avgerðina hjá

Tryggingareftirlitinum, um ein persónur ella fyritøka er fevnd av ásetingunum í hesi lóg.
*Stk. 5.* Tryggingareftirlitið kann útvega sær upplýsingar eftir stk. 1 og 4 til nýtslu hjá teimum myndugleikum og stovnum, sum eru nevndir í § 56, stk. 3.

**§ 38.** Tryggingareftirlitið kann áleggja teimum virkjum og persónum, sum eru nevndir í stk. 1, nr. 1-5, innanfyri eina freist, sum Tryggingareftirlitið hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á ásetingar í hesi lóg, reglur ásettar sambært lógini, ella forordningar, ið innihalda reglur um fíggjarligar revsingar ímóti londum, persónum, bólkum, løgfrøðiligum eindum ella stovnum.

**§ 39.** Tryggingareftirlitið kann áleggja eini fyritøku, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5, at seta tann persónin, sum er tilnevndur sambært § 6, stk. 2, frá starvinum, innanfyri eina freist ásetta av Tryggingareftirlitinum, um persónurin ikki hevur nøktandi vanligt umdømi, ella at atburður hans gevur grund at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt, sbr. § 6, stk. 2, 4. pkt.
*Stk. 2.* Áleggingina givin eftir stk. 1, kann fyritøkan ella persónurin, sum áleggingin viðvíkur, krevja at Tryggingareftirlitið leggur fyri dómstólarnar. Áheitan um tað, skal latast ryggingareftirltinum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at áleggingin er fráboðað viðkomandi. Tryggingareftirlitið leggur málið fyri dómstólarnar innan 4 vikur eftir at hava fingið áheitan um hetta. Málið verður reist eftir reglunum í borgarligu rættargangslógini.

**§ 40.** Landsstýrismaðurin kann mótvegis fyritøkum, nevndar í § 1, stk. 1, nr. 1-5 og nr. 6, áseta reglur um skyldur hjá hesum fyritøkum til at almannakunngera upplýsingar um metingina hjá Tryggingareftirlitinum av fyritøkuni og um, at Tryggingareftirlitið hevur møguleika fyri at almannakunngera upplýsingarnar áðrenn fyritøkan.

**§ 41.** Hevur ein fyritøka ella persónur, fevndur av § 1, stk. 1, nr. 1-5, latið víðari upplýsingar um fyritøkuna ella persónin, og  hevur almenningurin fingið kunnleika um hesar, kann Tryggingareftirlitið geva fyritøkuni ella persóninum boð um at almannakunngera rættleiðandi upplýsingar innanfyri eina av Tryggingareftirlitinum ásetta freist, um Tryggingareftirlitið metir, at upplýsingarnar eru villleiðandi, og um Tryggingareftirlitið metir, at upplýsingarnar kunnu hava skaðiliga ávirkan fyri fyritøkuna ella viðskiftafólkið hjá persóninum, íleggjarar, aðrar kravánarar, fíggjarligu marknaðirnar, har partabrøvini í fyritøkuni ella virðisbrøv, givin út av fyritøkuni, verða handlað, ella á fíggjarliga støðufestið í síni heild.
Stk. 2. Um fyritøkan ella persónurin, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-4 og 6, ikki rætta upplýsingarnar eftir boðum frá Tryggingareftirlitinum og innan fyri eina av Tryggingareftirlitinum ásetta freist, kann Tryggingareftirlitið almannakunngera boðini, sum eru givin eftir stk. 1.

**§ 42.** Boð, givin eftir § 47, stk. 1 og 2, ella § 51 ella av Tryggingareftirlitinum sambært heimild frá Tryggingarráðnum, skulu almannakunngerast av Tryggingareftirlitinum á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum, smb. tó stk. 5. Avgerðir um at lata løgregluni mál til eftirkanningar, smb. § 47, stk. 2, almannakunngerast sum samandráttur, smb. tó stk. 5. Almannakunngeringin skal fevna um navnið á tí løgfrøðiliga ella likamliga persóninum, smb. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Almannakunngering eftir stk. 1, ið fevnir um navnið á einum likamligum persóni, er bert loyvd, um talan er um álvarslig, afturvendandi ella skipað brot á § 10, stk. 1, 2, 4 og 5, § 11, stk. 1 og 2 og stk. 3, 1., 3. og 4. pkt., § 14, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., og stk. 3 og 5, § 17, stk. 1 og 2, § 18, § 21, stk. 1, 2. pkt., § 25, stk. 1, § 26, stk. 1 og 3 og stk. 4, 1. pkt., og § 30.

*Stk. 3.* Fyritøkan skal almannakunngera somu upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1, á sínari møguligu heimasíðu á einum staði, har tær natúrliga hoyra heima. Almannakunngeringin skal fremjast skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 3 gerandisdagar eftir, at fyritøkan hevur móttikið kunning um boðini, ella í seinasta lagi, tá hetta verður kravt eftir lov om værdipapirhandel v.m. Samstundis sum almannakunngeringin verður framd, skal fyritøkan seta inn eitt leinki, sum gevur beinleiðis atgongd til boðini, á forsíðuni á einari møguligari heimasíðu hjá fyritøkuni á ein sjónligan hátt, og tað skal framganga av leinkinum og einum møguligum atknýttnum teksti, at talan er um eini boð frá Tryggingareftirlitinum. Ger fyritøkan viðmerkingar til boðini, skulu hesar síggjast í framhaldi av hesum, og viðmerkingarnar skulu vera greitt skildar frá boðunum. Burturtøka av leinkinum á forsíðuni og av upplýsingum á møguligu heimasíðuni hjá fyritøkuni skal gerast eftir somu meginreglum, sum fyritøkan nýtir í sambandi við aðrar fráboðanir, tó í fyrsta lagi tá leinkið og upplýsingarnar hava ligið á heimasíðuni í 3 mánaðir, og í fyrsta lagi aftaná fyrstkomandi aðalfund ella umboðsmannafund. Skyldan hjá fyritøkuni at almannakunngera upplýsingarnar á heimasíðuni hjá fyritøkuni er bert galdandi fyri løgfrøðiligar persónar. Verða boðini, sum almannakunngerast eftir stk. 1, 1. pkt., kærd til Vinnukærunevndina ella dómstólarnar, skal hetta síggjast á almannakunngeringini hjá Tryggingareftirlitinum, og tað eftirfylgjandi úrslitið av úrskurðinum hjá Vinnukærunevndini ella dómstólunum, skal somuleiðis almannakunngerast á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum skjótast gjørligt.
*Stk. 4.* Hevur Tryggingareftirlitið latið eitt mál til løgregluna til eftirkanningar, og er dómur feldur ella tikið er við bót, skal Tryggingareftirlitið almannakunngera dómin, at tikið er við bót ella ein samandrátt av hesum, smb. tó stk. 5. Er dómurin ikki endaligur, ella er hann kærdur ella tikin uppaftur, skal hetta síggjast í almannakunngeringini. Fyritøkan skal á einum hóskandi stað á heimsíðuni hjá fyritøkuni almannakunngera skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 10 gerandisdagar eftir at dómur er feldur ella tikið er við bót, ella í seinasta lagi, tá hetta verður kravt eftir lov om værdipapirhandel o.a. Samstundis sum almannakunngeringin verður framd, skal fyritøkan seta inn eitt leinki, sum gevur beinleiðis atgongd til dómin, at tikið er við bót ella samandráttin, á forsíðuna á einari møguligari heimasíðu hjá fyritøkuni á ein sjónligan hátt, og tað skal framganga av leinkjuni og einum møguligum atknýttnum teksti, at talan er um ein dóm ella at tikið er við bót. Ger fyritøkan viðmerkingar til dómin, at tikið er við bót ella samandráttin, skulu hesar síggjast í framhaldi av hesum, og viðmerkingarnar skulu vera greitt skildar frá dóminum, at tikið er við bót ella samandráttinum. Burturtøka av leinkinum á forsíðuni og av upplýsingum á møguligu heimasíðuni hjá fyritøkuni skal gerast eftir somu meginreglum, sum fyritøkan nýtir í sambandi við aðrar fráboðanir, tó í fyrsta lagi tá leinkið og upplýsingarnar hava ligið á heimasíðuni í 3 mánaðir, og í fyrsta lagi aftaná fyrst komandi aðalfund ella umboðsmannafund. Fyritøkan skal boða Tryggingareftirlitinum frá um almannakunngeringina, undir hesum senda avrit av dóminum ella at tikið er við bót. Tryggingareftirlitið skal eftirfylgjandi almannakunngera dómin, at tikið er við bót, ella ein samandrátt av hesum á sínari heimasíðu. Skyldan hjá fyritøkuni at almannakunngera upplýsingarnar á heimasíðuni hjá fyritøkuni er bert galdandi fyri løgfrøðiligar persónar.
*Stk. 5.* Almannakunngering eftir stk. 1-4 kann tó ikki fara fram, um tað viðførir órímiliga stóran skaða fyri fyritøkuna ella um viðurskifti í mun til kanningarendamál tala ímóti almannakunngering. Almannakunngeringin má ikki innihalda trúnaðarupplýsingar um kundaviðurskifti ella upplýsingar, ið eru fevndar av ásetingunum í lógini um innlit í

fyrisitingina um undantøku av upplýsingum um persónlig viðurskifti og rakstrar- ella vinnuviðurskifti v.m. Almannakunngeringin má ikki innihalda trúnaðarupplýsingar, sum koma frá einum ES- ella EØS-landi, uttan so, at myndugleikar, sum hava latið upplýsingarnar, hava givið teirra greiða samtykki.
Stk. 6.

**§ 43.** Starvsfólkini á Tryggingareftirlitinum hava skyldu til, undir ábyrgd eftir §§ 152–152e í revsilógini, at halda trúnaðarupplýsingar loyniligar, sum tey fáa vitan um í sambandi við teirra eftirlitsvirksemi. Sama er galdandi fyri persónar, ið fremja tænastur sum liður í rakstrinum hjá eftirlitinum, og serfrøðingar, sum virka vegna Tryggingareftirlitið. Hetta er eisini galdandi eftir at starvssetanin ella sáttmálin endar.
*Stk. 2.* Samtykki frá honum, sum tagnarskyldan er ætlað at verja, gevur ikki teimum persónum, sum nevndir eru í stk. 1, rætt til at lata víðari trúnaðarupplýsingar.
Stk. 3. Stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at trúnaðarupplýsingar verða latnar víðari til:

1) Eftirlitsmyndugleikar eftir hesi lóg.
2) limir í einum samstarvsbólki eftir § 55.
3) Aðrar almennar myndugleikar, herundir ákæruvaldið og løgregluna, í sambandi við eftirkanningar og rættatsókn av møguligum revsiverdum viðurskiftum, fevnd av revsilógini, hesi lóg, ella aðrari eftirlitslóggávu.
4) TAKS, tá víðarilatan fer fram, soleiðis at TAKS kann kanna møgulig brot á toll- og skattalóggávuna.
5) Viðkomandi landsstýrisfólk sum liður í yvirskipaða eftirlitinum hjá hesum.
6) Fyrisitingarligir myndugleikar og dómstólar, sum viðgera avgerðir, sum Tryggingareftirlitið hevur tikið.
7) Løgtingsins umboðsmann.
8) Eina tingnevnd, sum er sett av Løgtinginum.
9) Kanningarnevndir settar við lóg ella sambært lóg um kanningarnevndir.
10) Landsgrannskoðanina og Løgtingsgrannskoðanina.
11) Skiftirættin, aðrar myndugleikar, ið viðvirka við likvidatión, konkursviðgerð ella líknandi dómsviðgerð av einari fíggjarligari fyritøku, kurator umframt persónar, sum hava ábyrgd av lógarásettu grannskoðanini av roknskapunum hjá eini fíggjarligari fyritøku, við teirri fyritreyt, at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.
12) Finansiel Stabilitet A/S við teirri fyritreyt, at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.
13) Nevndir og bólkar o.a., sett av landsstýrismanninum, sum hava til endamáls at umrøða og samskipa tiltøkini til at tryggja fíggjarliga støðufestið.
14) Danska fíggjarmálaráðharran sum liður í ábyrgdini av búskaparliga støðufestinum í Føroyum og at brúka til kreppuhandfaring av fíggjarligum fyritøkum í Føroyum.
15) Grønlandska landsstýrismannin í vinnu og arbeiðsmarknaðarmálum sum liður í ábyrgdini av búskaparliga støðufestinum í Grønlandi og at brúka til kreppuhandfaring av fíggjarligum fyritøkum í Grønlandi.
16) Danskir eftirlitsmyndugleikar á fíggjarliga økinum, við teirri fyritreyt, at móttakararnir eru undir eini lógarásettari tagnarskyldu, sum í minsta lagi svarar til tagnarskylduna sambært stk. 1, og

at móttakararnir hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur, sbrt. tó stk. 6.

17) Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleika fyri at halda vinnufelagalóggávuna, tá víðarilatan fer fram fyri at styrkja støðufestið og integritetin í fíggjarskipanini, smb. tó stk. 6, Skráseting Føroya, Grannskoðaraeftirlitið og Grannskoðaranevndin sum eftirlitsmyndugleiki fyri lógarásettu grannskoðanini av roknskapunum hjá eini fíggjarligari fyritøku, við teirri fyritreyt, at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur, sbrt. tó stk. 6, og Skráseting Føroya tá upplýsingarnar viðvíkja einum grunni ella felagsskapi, fevnd av § 131 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi . Víðarilatan eftir 1. pkt. kann bert fara fram við teirri fyritreyt, at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.

18) Eftirlitsmyndugleikar í einum ES- ella EBS-landi, sum hava ábyrgdina av eftirlitinum við at persónar og fyritøkur halda lóggávuna um fyribyrging av hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, forordning 2015/847/EU frá 20. mai 2015 hjá Europa-tinginum og Ráðnum um upplýsingar, sum skulu sendast saman við peningaflytingum, og forordningar, sum innihalda reglur um fíggjarlig revsitiltøk móti londum, persónum, bólkum, løgfrøðiligum eindum ella stovnum, við teirri fyritreyt, at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.

19) Fíggjarligar eftirlitsmyndugleikar í londum uttanfyri ES- ella EBS-landi, sum hava ábyrgdina av eftirlitinum við at persónar og fyritøkur halda lóggávuna um fyribyrging av hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

*Stk. 4.* Víðarilatan sambært stk. 3, nr. 19, kann bert gerast við støði í einari altjóða samstarvsavtalu, og við teirri fyritreyt, at móttakararnir í minsta lagi eru undir eini lógarásettari tagnarskyldu, sum svarar til tagnarskylduna sambært stk. 1, og at móttakararnir hava stóran tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.
*Stk. 5.* Øll, sum sambært stk. 3, nr. 1-17, móttaka trúnaðarupplýsingar frá Tryggingareftirlitinum, eru við atliti at hesum upplýsingum áløgd ta í stk. 1 umrøddu tagnarskyldu.
Stk. 6. Víðarilatan sambært stk. 3, nr. 1, 2, 8, 9, 11, 16, 18 og 19, sum koma frá einum ES-ella EBS-landi ella eftirlitsmyndugleikum í londum uttanfyri ES ella EBS, kann harafturat bert fara fram, um so er, at teir myndugleikar, sum hava latið upplýsingarnar, hava givið sítt greiða samtykki, og má bara nýtast til tað endamál sum loyvið viðvíkir.
Stk. 7. Trúnaðarupplýsingar, sum Tryggingareftirlitið móttekur, mugu bert nýtast í sambandi við eftirlitsstarvið til at áleggja revsitiltøk, ella um avgerðin hjá eftirlitsmyndugleikanum verður kærd til hægri fyrisitingarligan myndugleika ella verður lagt fyri dómstólarnar.

*Skráseting Føroya*

**§ 44.** Skráseting Føroya ansar eftir, at fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 6 – 9, halda hesa lóg og reglur, ásettar sambært henni og forordninger, ásettar av Europa- tinginum og Ráðnum, sum innihalda reglur um fíggjarlig revsitiltøk móti londum, persónum, bólkum, løgfrøðiligum eindum ella stovnum.
*Stk. 2.* Limir í leiðsluni og veruligir eigarar av fyritøkum umframt persónar, fevndir av § 1, stk. 1, nr. 8, mugu ikki vera dømdir fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av starvinum hjá viðkomandi ella avgerandi ávirkan.

*Stk. 3.* Skráseting Føroya kann fáa sær fremmanda hjálp við eftirliti sambært stk. 1.

**§ 45.** Fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 9, skulu skrásetast hjá Skráseting Føroya fyri at kunna reka hetta virksemið.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya skal lata vera við at skráseta eftir stk. 1, um ein limur í evstu leiðsluni ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku ella persónurin eru dømd fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av starvinum ella uppgávuni, sbrt. § 78, stk. 2 í Revsilógini, ella hava latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð (rekonstruktionsbehandling), konkurs ella skuldarumskipan ella eru undir endurskipanarviðgerð, konkursviðgerð ella skuldarumskipan.
*Stk. 3.* Skráseting Føroya skal harafturat lata vera við at skráseta eina fyritøku, um

1) fyritøkan er dømd fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan vanda fyri misnýtslu av skrásetingini, sbrt. § 78, stk. 2 í revsilógini,
2) fyritøkan hevur latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð ella konkurs ella eru undir endurskipanarviðgerð ella konkursviðgerð, ella
3) ein veruligur eigari er dømdur fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av avgerandi ávirkanini hjá viðkomandi.

*Stk. 4.* Tá Skráseting Føroya ger meting sambært stk. 2, stk. 1, nr. 1 og stk. 3, verður § 78, stk. 3 í revsilógini nýtt samsvarandi.
*Stk. 5.* Limir í evstu ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku skulu boða Skráseting Føroya frá upplýsingum um viðurskifti, nevnd í stk. 2, í seinasta lagi 2 vikur eftir, at avgerð er tikin um, at tey eru komin inn í leiðsluna í fyritøkuni. Ein veruligur eigari av eini fyritøku skal boða Skráseting Føroya frá upplýsingum um viðurskifti, nevnd í stk. 3, í seinasta lagi 2 vikur eftir, at fyritøkan er útvegað.
*Stk. 6.* Skráseting Føroya kann taka aftur skrásetingina av eini fyritøku ella persóni eftir stk. 1, um ein limur í evstu ella dagligu leiðsluni í fyritøkuni ella persónurin seinni verða fevndur av stk. 2, um fyritøkan seinni verður fevnd av stk. 3, nr. 1 og 2, um ein veruligur eigari seinni verða fevndur av stk. 3, nr. 3, ella um fyritøkan ella persónurin ikki eru ella halda uppat at vera fevnd av § 1, stk. 1, nr. 9.
*Stk. 7.* Fyritøkur og persónar, ein limur í evstu leiðsluni ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku umframt ein veruligur eigari av eini fyritøku skulu boða Skráseting Føroya frá upplýsingum um seinni broytingar í viðurskiftum nevnd í stk. 2 og 3 í seinasta lagi 2 vikur eftir broytingina.

**§ 46.** Fyritøkur og persónar, sum nevnd í § 1, stk. 1, nr. 6 – 9, skulu geva Skráseting Føroya tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri virksemið hjá Skrásetingini.
Skráseting Føroya kann, um tað krevst til endamálið, móti hóskandi løgváttan uttan rættarúrskurð, altíð fáa atgongd til fyritøkur og persónar fevndar av § 1, stk. 1, nr. 6 – 9, fyri at útvega upplýsingar, undir hesum við eftirlitsvitjan.

**§ 47.** Skráseting Føroya kann innan eina av Skrásetingini ásetta freist geva teimum fyritøkum og persónum, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 6 – 9, boð um at fremja tey neyðugu tiltøkini, um brot verður framt á ásetingar í hesi lóg, reglur givnar sambært henni, ella fyriskipanir hjá Europa-tinginum og Ráðnum, sum innihalda reglur um fíggjarlig revsitiltøk móti londum, persónum, bólkum, løgfrøðiligum eindum ella stovnum.

**§ 48.** Skráseting Føroya kann fyri fyritøkur og persónar, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 9, áseta nærri reglur um fráboðan, skráseting og kunngering, undir hesum, hvørjar upplýsingar skulu skrásetast og hvørji viðurskifti fráboðarar ella onnur kunnu senda inn og skráseta talgilt í kt-skipan hjá

Skráseting Føroya, við at nýta talgilda ella samsvarandi talgilda undirskrift, og um nýtslu av hesi skipan.

**§ 49.** Tiltøk eftir §§ 45, stk. 1 og 48 skulu almannakunngerast av Skráseting Føroya á heimasíðu Skráseting Føroya, sbr. tó stk. 5. Avgerðir um at lata mál til kanningar hjá løgregluni verða almannakunngjørdar á heimasíðu Skráseting Føroya. Almannakunngeringin skal umfata navnið á løgfrøðiliga ella fysiska persóninum, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Almannakunngering eftir stk. 1, sum umfatar navnið á einum fysiskum persóni, kunnu bert gerast tá persónurin álvarsliga, aftur og aftur, ella skipað hevur framt brot á § 9, nr. 1, 2, 4 og 5, § 10, stk. 1 og 2 og stk. 3, 1., 3. og 4. pkt., § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., stk. 3 og 5, § 16, stk. 1 og 2, § 17, § 20, stk. 1, 2. pkt., § 24, stk. 1, § 25, stk. 1 og 3 og stk. 4, 1. pkt., og § 28.
*Stk. 3.* Fyritøkan skal almannakunngerða somu upplýsingar, sum eru fevndir av stk. 1, á møguligu heimasíðu fyritøkunnar á einum hóskandi stað. Almennakunngerðingin skal verða gjørd skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 3 gerandisdagar aftan á, at fyritøkan hevur móttikið fráboðan um tiltakið, ella í seinasta lagi, sum kravt eftir lov om værdipapirhandel m.v., sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan. Samstundis við almannakunngerðingina, skal fyritøkan seta eitt leinki, sum gevur beinleiðis atgongd til tiltakið, á forsíðuna á heimasíðuni hjá fyritøkuni á ein sjónligan hátt, og av leinkini og einum møguliga tilknýttum teksti skal greitt ganga fram, at tað er talan um eitt tiltak frá Trygginareftirlitinum. Ger fyritøkan viðmerkingir til tiltakið, skal tað gerast í framhaldi av tí, og viðmerkingarnar skulu vera greitt skildir frá tiltakinum. Striking av leinkini av møguligu heimsiðu fyritøkunnar skal  gerast eftir somu meginreglum, sum fyritøkan nýtir fyri aðrar fráboðanir, tó í fyrsta lagi, tá leinki hevur verið á heimasíðuni í 3 mánaðir, og í fyrsta lagi aftan á fyrst komandi aðalfund ella umboðsráðsfund. Skyldan hjá fyritøkuni at almannakunngera upplýsingar á heimsíðuni er bert galdandi fyri løgfrøðiligar persónar. Verður tiltakið, sum verður almannakunngjørt sambært stk. 1, 1. pkt., skotið inn fyri Vinnukærunevndina ella dómstólin, skal hetta síggjast í almannakunngeringini hjá Skráseting Føroya, og seinni úrslitið av avgerðini hjá Vinnukærunevndini ella dómstólinum skal eisini almannakunngerast á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya skjótast gjørligt.
*Stk. 4.* Hevur Skráseting Føroya latið eitt mál til eftirkanningar hjá løgregluni, og er dómur fallin ella bót viðtikin, skal Skráseting Føroya almannakunngera dómin, sektarsamtyktina ella ein samandrátt av hesum, sbr. tó stk. 5. Er dómurin ikki endaligur, ella er hann kærdur ella tikin uppaftur, skal hetta síggjast í almannakunngeringini.
*Stk. 5.* Almannakunngering eftir stk. 1-4 kann tó ikki gerast, um tað fer at hava við sær órímiliga stóran skaða fyri fyritøkuna ella atlit til rannsóknir tala ímóti almannakunngering. Almannakunngeringin má ikki innihalda trúnaðarupplýsingar um kundaviðurskifti ella upplýsingar fevndar av ásetingum í lóg um innlit í fyrisitingina um undantak av upplýsingum um privat viðurskifti og rakstrar- ella handilslig viðurskifti o.a. Almannakunngeringin má ikki innihalda trúnaðarupplýsingar, sum stava frá einum ES- EBS-landi, um ikki teir myndugleikar, ið hava givið upplýsingarnar, greitt hava givið loyvi.
*Stk. 6.* Er almannakunngering ikki gjørd sambært stk. 5, 1. pkt., skal almannakunngering fara fram eftir stk. 1-4, tá tey atlit, ið gjørdu at almannakunngeringin ikki var framd, ikki eru galdandi longur. Eftir 2 ár frá dagfestingini av tiltakinum ella avgerðini um at lata málið til eftirkanningar hjá løgregluni, skal  almannakunngering tó ikki gerast uttan mun til 1. pkt. Almannakunngering skal bert fremjast, um átala ella ákæra ikki er slept eftir reglunum í rættargangslógini.

*Stk. 7.* Í málum har Skráseting Føroya hevur almannakunngjørt eina avgerð um at lata eitt mál til løgregluna til eftirkanningar eftir stk. 1, 2. pkt., og avgerð verður tikin um at sleppa átaluni ella ákæruni ella fríkennandi dómur verður sagdur, skal Skráseting Føroya eftir áheitan frá tí likamliga ella løgfrøðiliga persóninum, sum málið viðvíkur, almannakunngera upplýsingar um hetta. Tann likamligi ella løgfrøðiligi persónurin skal lata inn eitt avrit av avgerðini um at átala ella ákæra er slept ella avrit av dóminum til Skráseting Føroya samstundis við eini áheitan um almannakunngering. Er átalan ella ákæran ikki slept endaliga, ella er dómurin ikki endaligur, skal tað síggjast í almannakunngerini. Móttekur Skráseting Føroya skjalprógv fyri, at málið er endað við at átala ella ákæra er slept ella at endaligur fríkennandi dómur er sagdur, skal Skráseting Føroya strika allar upplýsingar um avgerðina at lata løgregluni málið til eftirkanningar og møguligar eftirfylgjandi dómar í málinum av heimasíðuni.

**§ 50.** Starvsfólk hjá Skráseting Føroya hava skyldu til undir ábyrgd eftir §§ 152–152e í revsilógini at halda trúnaðarupplýsingar loyniligar, sum tey fáa kunnleika um gjøgnum eftirlitsvirksemið. Sama er galdandi fyri persónar, sum gera tænastuuppgávur sum partur av rakstrinum hjá eftirlitinum, og serfrøðingar, sum virka vegna Skráseting Føroya. Hetta er eisini galdandi eftir, at starvssetanin ella sáttmálin endar.
*Stk. 2.* Samtykki frá tí, sum tagnarskyldan er ætlað at verja, gevur ikki teimum persónum, sum nevndir eru í stk. 1, rætt til at lata víðari trúnaðarupplýsingar.
*Stk. 3.* Stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at trúnaðarupplýsingar verða latnar víðari til:

1) Eftirlitsmyndugleikar eftir hesi lóg.
2) Limir í einum samstarvsbólki eftir § 74.
3) Aðrar almennar myndugleikar, herundir ákæruvaldi og løgregluna, í sambandi við eftirkanningar og rættarfylging av møguligum revsiverdum viðurskiftum fevnd av revsilógini, hesi lóg, ella aðrari eftirlitslóggávu.
4) Viðkomandi landsstýrisfólk sum liður í yvirskipaða eftirlitinum hjá hesum.
5) Fyrisitingarligar myndugleikar og dómstólar, sum viðgera avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið.
6) Løgtingsins umboðsmann.
7) Eina tingnevnd, sum er sett av Løgtinginum.
8) Kanningarnevndir settar við lóg ella sambært lóg um kanningarnevndir.
9) Landsgrannskoðanina og Løgtingsgrannskoðanina.
10) Skiftirættin, aðrar myndugleikar, ið viðvirka við likvidatión, konkursviðgerð ella líknandi dómsviðgerð av eini fyritøku, fevnd av hesi lóg, við teirri fortreyt at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.
11) Nevndir og bólkar v.m., settar av landsstýrismanninum, sum hava til endamáls at umrøða og samskipa tiltøkini til fyribyrgjan av hvítvaski og fígging av yvirgangi.
12) Grønlendskar eftirlitsmyndugleikar á økinum fyri fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, við teirri fortreyt at móttakararnir eru undir eini lógarásettari tagnarskyldu, sum í minsta lagi svarar til tagnarskylduna sambært stk. 1, og at móttakararnir hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.
13) Eftirlitsmyndugleikar í einum ES- ella EBS-landi, sum hava ábyrgdina av eftirlitinum við at persónar og fyritøkur halda lóggávuna um fyribyrgjan av hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, við teirri fortreyt at móttakararnir av upplýsingunum hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.

14) Eftirlitsmyndugleikar í londum uttanfyri ES- ella EBS-landi, sum hava ábyrgdina av eftirlitinum við at persónar og fyritøkur halda lóggávuna um fyribyrging av hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

*Stk. 4.* At lata víðari sambært stk. 3, nr. 14, kan bert gerast við støði í einari altjóða samstarvsavtalu, og við teirri fortreyt at móttakararnir í minsta lagi eru undir eini lógarásettari tagnarskyldu, sum svarar til tagnarskylduna sambært stk. 1, og at móttakararnir hava tørv á tí fyri at røkja sínar uppgávur.

*Stk. 5.* Øll, sum sambært stk. 3, nr. 1-13, móttaka trúnaðarupplýsingar frá Skráseting Føroya, eru við atliti til hesar upplýsingar áløgd ta í stk. 1 umrøddu tagnarskyldu.

*Stk. 6.* At lata víðari trúnaðarupplýsingar sambært stk. 3, nr. 1, 2, 7, 8, 10, 12, 13 og 14, sum koma frá einum ES-ella EBS-landi ella eftirlitsmyndugleikum í londum uttanfyri ES ella EBS, kann harafturat bert fara fram, um so er, at teir myndugleikar, sum hava latið upplýsingarnar, hava givið sítt greiða samtykki, og má bara nýtast til tað endamál, sum loyvið viðvíkir.

*Stk. 7.* Trúnaðarupplýsingar, sum Skráseting Føroya móttekur, mugu bert nýtast í sambandi við eftirlitsstarvið til at áleggja revsing, ella um avgerðin hjá eftirlitsmyndugleikanum verður kærd til hægri fyrisitingarligan myndugleika ella verður lagt fyri dómstólin.

*Samskifti og samstarvsbólkar*

**§ 51.** Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Tryggingareftirlitinum um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi lóg ella reglum givnar sambært henni, skal vera talgilt.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta nærri reglur um talgilt samskifti, undir hesum nýtslu av ávísum kt-skipanum, serligum talgildum sniðum og talgilda undirskrift ella líknandi.

**§ 52.** Eini talgild boð metast at vera komin fram, tá tey eru atkomulig fyri móttakaran av boðunum.

**§ 53.** Er tað krav, sambært reglum í hesi lóg ella reglum ásettar við heimild í henni, at eitt skjal, sum er givið út av øðrum enn Tryggingareftirlitinum ella Skráseting Føroya, skal vera undirskrivað, kann hetta krav lúkast við nýtslu av tøkni, sum tryggjar eintýðuga eyðmerking av tí, sum hevur givið skjalið út, sbrt. tó stk. 2. Slík skjøl verða javnsett við skjøl við persónligari undirskrift.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta nærri reglur um at víkja frá kravi um undirskrift. Undir hesum kann ásetast, at krav um persónliga undirskrift ikki kann verða vikið frá fyri ávís sløg av skjølum.

**§ 54.** Landsstýrismaðurin kann seta ein bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært hesi lóg. Hesin bólkur skal samskipa váðametingarnar og almennu tiltøkini móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hjá myndugleikunum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann avgera at víðka skaran við umboðum fyri aðrar myndugleikar.

*Kapittul 13*

*Partar og kæruásetingar*

**§ 55.** Sum partur verður roknaður tann fyritøka ella persónur, sum ein avgerð tikin av einum eftirlitsmyndugleika, sambært hesi lóg ella fyriskipanum givnum sambært hesi lóg, vendur sær til.

**§ 56.** Avgerðir, tiknar av Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya, sambært hesi lóg og reglum, ásettar sambært lógini, kunnu av tí, sum

avgerðin vendir sær til, verða løgd fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er kunngjørd fyri viðkomandi.

*Kapittul14*

*Revsing*

**§ 57.** Brot á § 42, stk. 3, 1.-4. pkt., og stk. 4, 3.-7. pkt., verður revsað við bót.
Tilætlað brot ella brot framd av grovum ósketni á § 5, § 6, stk. 1 og 2, § 7, stk. 1-4 og 6,  §§ 8 og 9,  § 10, stk. 1 og 2, og stk. 3, 1., 3. og 4. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., stk. 3, stk. 4, 2. pkt., og stk. 5., §§ 14 og 15, § 16, stk. 1 og 2, §§ 17- 19, § 20, stk. 1, 1. pkt., § 21, stk. 2 og 3, § 23, stk. 1, 2. pkt., stk. 2 og 3, § 24, stk. 1 og 2, § 25, , stk. 1 og 3 og stk. 4, 1. pkt., § 28, stk. 2, §§ 39 og 30, § 32, stk. 1, § 33, stk. 1 og 2, § 35, stk. 1, § 37, stk. 1, § 44, stk. 2, § 45, st. 1, og § 46, stk. 1
Stk. 2. Er talan um serliga grov ella umfatandi brot á  § 5, § 8, stk. 2, § 9, § 10, stk. 1 og 2 og stk. 3, 2. og 3. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., og stk. 3 og 5, § 16, stk. 1 og 2, §§ 17- 19, § 20, stk. 1, 2. pkt., § 24, stk. 1, § 24, stk. 1 og 3 og stk. 4, 1. pkt., og §§ 29 og 30 kann revsingin vaksa til fongsul upp í 6 mánaðir.
Stk. 3. Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu vera áløgd revsiábyrgd sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.
Stk. 4. Fyrningarfreistin fyri brot á ásetingarnar í lógini ella reglum, givnar sambært lógini, er 5 ár.
Stk. 5. Í reglum, givnar sambært lógini, kann revsing ásetast sum bót fyri brot á reglur, givnar sambært lógini.

**§ 58.** Ein fyritøka ella persónur, sum ikki ger eftir boðum, sum eru givin sambært § 38, § 41, stk. 1, og § 47 verður revsaður við bót.

**§ 59.** Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § 37, stk. 1 og 4, kann Tryggingareftirlitið sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur.
*Stk. 2.* Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § 45, stk. 5 og 7, kann Skráseting Føroya sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur.

*Kapittul 13*

*Gildiskoma*

**§ 60.** Lógin kemur í gildi 1. juli 2020.

**Skjal 1**

**Niðanfyri er ikki fullfíggjað yvirlit við faktorum og skjalasløgum, ið eyðkenna støður, sum kunnu hava við sær avmarkaðan váða.**

1) Kundaváðafaktorar:
    a. Fyritøkur, skrásettar á keypsskála, ið hava upplýsingarskyldu (annaðhvørt sambært reglunum um keypsskálar ella lóggávu ella fulnaðarfyriskipanum, sum áleggur feløgunum at tryggja hóskandi gjøgnumskygni í mun til veruligan ognarskap.

    b. Almenn fyrisiting ella almennar fyritøkur.

    c. Viðskiftafólk, ið búgva í landafrøðiligum økjum við lægri váða, sum nevnt í nr. 3.

2) Váðar í sambandi við vørur, tænastur, transaksjónir ella veitingarvegir:
    a. Lívstryggingar, har árliga tryggingargjaldið er lágt.

    b. Pensiónstryggingar, sum ikki hava ásetingar um afturkeyp, og har tryggingarskjalið ikki kann setast í veð.

    c. Pensiónsskipanir o.tíl., ið rinda pensión til starvsfólk, og har inngjaldið verður goldið við frádrátti í lønini, og reglurnar fyri viðkomandi skipan ikki loyva, at rættindi hjá einum limi verða flutt sambært skipanini.

    d. Fíggjarligar produkt ella tænastur, sum veita ávísum viðskiftafólkum tænstuveitingar, ið á hóskandi hátt eru allýstar og avmarkaðar, og sum hava til endamáls at fremja fíggjarliga inklusión.

    e. Vørur, har vandin fyri at hvítvaska pening og at fíggja yvirgang verður stýrdur av øðrum viðurskiftum, t.d. útreiðslulofti ella gjøgnumskygni í mun til ognarskap (t.d. ávís sløg av elektroniskum pengum).

3) Landafrøðiligir váðar:
    a. ES- ella EBS-lond.

    b. Triðjalond, ið hava virknar skipanir til at stríðast ímóti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi..

    c. Triðjalond, sum eftirfarandi keldur hava eyðmerkt sum lond, ið bara í lítlan mun er rakt av korruptión ella øðrum brotsligum virksemi.

    d. Triðjalond sum, við støði í eftirfarandi keldum, t.d. sínámillum eftirmetingum, frágreiðingum um neyvar metingar ella almannakunngjørdum og dagførdum frágreiðingum, hava krøv um at stríðast ímóti hvítvasking av pengum og fíggingav yvirgangi, sum eru í samsvari við FATF-tilmælini frá 2012, og sum gjøgnumføra hesi á munadyggan hátt.

**Skjal 2**

**Niðanfyri er ikki fullfíggjað yvirlit við faktorum og skjalasløgum, ið eyðkenna støður, sum kunnu hava við sær øktan váða:**

1) Kundaváðafaktorer:

    a. Umstøðurnar við handilsviðurskiftinum eru óvanligar.

    b. Viðskiftafólk, ið búgva í landafrøðiligum økjum, ið hava hægri váða sum nevnt í nr. 3.

    c. Løgfrøðiligir persónar ella løgfrøðilig fyriskipanir, sum eru persónlig ognarfyrisitingarfeløg.

    d. Feløg, sum hava nomineepartaeigarar ella handhavapartabrøv.

    e. Fyritøkur, ið nýta reiðan pening.

    f. Ognarviðurskiftini í felagnum tykjast óvanlig ella ov torgreidd í mun til virksemi felagsins.

2) Váðar í sambandi við vørur, tænastur, transaksjónir ella vetingarvegir:

    a. Private banking .

    b. Produktir ella transaksjónir, ið kunnu fremja navnloynd.

    c. Vinnusambond ella transaksjónir, sum ikki hava beinleiðis trygdarfyriskipanir, t.d. elektroniska undirskrift.

    d. Gjaldingar frá ókendum ella ikki-associeraðum triðjamanni.

    e. Nýggj produkt og nýggjar virkismannagongir, undir hesum nýggjar veitingarmekanismur, og at brúka nýggja tøkni ella tøkni, ið verður ment, til bæði nýggj og verandi produkt.

    f. Transaksjónir viðvíkjandi olju, vápnum, dýrum málmi, tubbaksvørum, mentanarligum virðisgripum og øðrum lutum, ið hava fornfrøðiligan, søguligan, mentanarligan og trúarligan týdning ella sum hava serligt vísindaligt virði, umframt fílabeinum og vardum djórasløgum.

3) Landafrøðiligir váðar:

    a. Lond, sum eftirfarandi keldur, t.d. sínámillum eftirmetingar, frágreiðingar um neyvar metingar ella almannkunngjørdar og dagførdar frágreiðingar, hava eyðmerkt sum lond, ið ikki hava munadyggar skipanir til at stríðast ímóti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi, sbr. tó § 16, stk. 2.

b. Lond, sum eftirfarandi keldur hava eyðmerkt sum lond, sum í stóran mun eru rakt av korruptión ella øðrum brotsligum virksemi.

c. Lond, sum t.d. ES ella ST hava sett undir revsitiltøk, embargo ella líknandi tiltøk.

d. Lond, sum fíggja ella stuðla yvirgangsvirksemi, ella sum hýsa kendum yvirgangsfelagsskapum.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Hvítvask av pengum og fígging av yvirgangi fer oftast fram í altjóða høpi, og Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force) um at fyribyrgja hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi.

FATF ger tilmælir um tiltøk at fyribyrgja hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi. Tey seinastu tilmælini eru frá 2012.

Sum partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF hava Føroyar skyldu at tryggja, at FATF-tilmælini verða framd í føroyskari lóggávu.

Á ikki yvirtiknum málsøkjum, m.a. á bankaøkinum, eru seinastu FATF- tilmælini framd við "Anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)". Fyriskipan nr. 813 af 12. august 2019 verður síðani í hesum viðmerkingunum til uppskotið nevnd "hvítvaskfyrsikipanin"

Við hesum uppskotinum verða seinastu FATF- tilmælini eisini framd á yvirtiknum málsøkjum, sum m.a. fevnir um lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, trygginarmeklarar.

### 1.2. Lóggávuháttur o.a.

Seinastu FATF- tilmælini frá 2012 eru grannalondunum, undir hesum í Danmark framd innan karmarnar av ES-tingsins og Ráðsins direktivi 2015/849/ES frá 20. mai 2015 um fyribyrgjandi tiltøk móti nýtslu av fíggjarligu skipanini til hvítvask ella fígging av yvirgangi (síðani í viðmerkingunum nevnd 4. hvítvaskdirektivið).

Í Føroyum eru seinastu FATF- tilmælini frá 2012 á ikki yvirtiknum málsøkjum, sbr. hvítvaskfyriskipanina, eisini framd í lóggávuni innan karmarnar av 4. hvítvaskdirektivinum, og ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini liggja tætt upp at ásetingunum í direktivinum.

Hetta uppskotið byggir á hvítvaskfyriskipanina, og ásetingarnar í uppskotinum eru tí eisini innan fyri karmarnar av 4. hvítvaskdirektivinum. Ásetingarnar í uppskotinum svara sostatt neyvt til ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini tó soleiðis, at samsvarandi ásetingar, sum tær í donsku hvítvasklógini, sum bert viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, og sum tí ikki eru settar í gildi her við hvítvaskfyriskipanini, eru ásettar í hesum uppskotinum, meðan tær ásetingarnar í

hvítvaskfyriskipanini, sum bert viðvíkja ikki ikki yvirtiknum málsøkjum, ikki eru við í uppskotinum.

Í serligu viðmerkingunum til einstøku ásetingarnar verður stutt greitt frá høvuðsinnihaldinum í ásetingunum, og verður annars víst til viðmerkingarnar í uppskotinum til donsku hvítvasklógina, sum er viðlagt sum fylgiskjal 1 til uppskotið, umframt at tað verða gjørdar aðrar serligar viðmerkingar, har tað verður mett neyðugt. Serligu viðmerkingarnar til einstøku ásetingarnar í uppskotinum til donsku hvítvasklógina, sum víst verður til, eru sostatt eisini viðmerkingar og tulkingaríkast til einstøku ásetingarnar í hesum uppskotinum.

### 1.3. Galdandi lóggáva

FATF-tilmælini fevna um fígggjarligar fyritøkur, m.a. peningastovnar, íløgufeløg, realkredittstovnar og lívstryggingarfeløg. Harumframt fevna tilmælini um ávísar fyritøkur, sum ikki eru fíggjarligar fyritøkur, m.a. advokatar og grannskoðarar og ognarmeklarar.

Peningastovar, aðrar fíggjarfyritøkur, peningflytingarfyritøkur, advokatar o.a. eru viðvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangi løgskipað í hvítvaskfyriskipanini.

Lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar, tryggingarmeklarar, realkredittstovnar, grannskoðarar og ognarmeklarar o.a., sum eru eru yvirtikin málsøkir, eru viðvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangi løgskipað í løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr 56 frá 26 mai 2010 (síðani nevnd hvítvaskløgtingslógin).

Hendan lóggávan bygdi á Evropa-tingsins og Ráðsins direktiv frá 26. oktober 2005 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti nýtslu av fíggjarligu skipanini til hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi (3. hvítvaskdirektiv). Á ikki yvirtiknum økjum varð sett í gildi anordning nr. 626 frá 27. juni 2008 um ígildissetan fyri Føroyar av lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme, sum broytt við anordning nr. 79 frá 26. januar 2010 (síðani í viðmerkingunum hvítvaskfyriskipanin frá 2010).

Hvítvaskløgtingslógin ger við tilvísing ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini frá 2010 nýtligar uppá fyritøkur og persónar fevnd av hvítvaskløgtingslógini. Nýggja hvítvaskfyriskipanin setur hvítvaskfyriskipanina frá 2010 úr gildi fyri fyritøkur og persónar, fevnd av hvítvaskfyriskipanini. Kortini má metast, at fyri fyritøkur og persónar, fevd av hvítvasløgtingslógini, eru ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini frá 2010 framvegis galdandi við tað, at tær ikki staðiliga eru settar úr gildi fyri fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvaskløgtingslógini.

Hvítvasløgtingslógin er ikki dagførd samsvarandi seinastu FATF- tilmælunum frá 2012 og hvítvaskfyriskipanin.

### 1.4. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Uppskotið skal viðvirka til, at tað verður forðað fyri, at brotsfólk misbrúka føroyskar fyritøkur og fíggjarligu skipanina til at hvítvaska pengar og at fíggja yvirgang soleiðis, at tað verður forðað fyri skaða á fíggjarliga støðufestið og á álitið á fíggjarligu skipanina.

Samsvarandi 4. hvítvaskdirektivinum og hvítvaskfyriskipanini broytist løgskipanin av økinum eftir uppskotinum frá at vera ein í høvuðsheitum reglubundin til at vera meira váðagrundað skipan. Tað ger, at virksemið bæði hjá myndugleikum og persónum og fyritøkum kann verða meira miðvíst og virkið soleiðis, at virksemið verður nýtt, har váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størstur.

Uppskotið setur í verk eina eftiransingarskyldu, sum fevnur um, at fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av uppskotinum generelt skulu vera eftiransin viðvíkjandi kundans virksemi, sum orsakað av serligu eyðkennunum við virkseminum verður hildið at kunna hava tilknýti til hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Fyri at fyribyrgja og avdúka, at peningaflytingar og aðrar transaksjónir ella ráðgevarauppgávur hava tilknýti til fígging av yvirgangi ella hvítvasking, verða skyldur álagdar teimum persónum og fyritøkum, sum eru fevnd av lóggávuni. Tað snýr seg m.a. um skyldur viðvíkjandi váðameting og váðastýring, kundakunnleika, skráseting, varðveitslu av upplýsingum um m.a. veruligar eigarar, skrivligar politikkir um hetta og útbúgving av starvsfólki.

Uppskotið setur herd krøv samanborið við galdandi lóg til kundakunnleika hjá teimum fyritøkum og persónum, sum eru fevnd av lógaruppskotinum. Uppskotið setur krav um løgváttan av kundunum fyri at eyðmerkja teir við navni, v/p-tali, undir hesum verður sett krav um kunnleika til fyritøkunnar fysiska eigaraskara, sum hava avgerandi ávirkan (veruligir eigarar). Harumfram skulu innheintast upplýsingar um kundans endamál við handilssambandinum umframt um vavið av tí, eins og tað áhaldandi skal vera yvirvøka av kundasambandinum.
Eisini verður sett í verk ein whistlerblowerskipan.

Nýtsluøki lógarinnar verður víðkað til eisini at fevna um fyritøkur og persónar, sum bjóða út spøl, og samstundis verður heimilað landsstýrismanninum at undantaka spøl, har tað verður mett at vera lítil váði fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Í § 2 í galdandi hvítvaskløgtingslóg er eitt kontangjaldsforboð, sum setur handlandi við lutum og uppboðssølufólki forboð at taka ímóti upphæddum í reiðum peningi áljóðandi kr. 100.000 ella meira, annaðhvørt goldið verður í einum ella fleiri gjøldum, ið sýnast at vera innanhýsis samanhangandi.

Skotið verður upp, at kontangjaldsforboðið skal fevna um øll vinnurekandi, sum annars ikki eru fevnd av hinum ásetingunum í uppskotinum, og at markið verður lækkað úr 100 tús. kr. niður í 50 tús. kr.

## 1.5. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

### 1.5.1. Nýtsluøki lógarinnar

#### 1.5.1.1. Galdandi rættur

Flestu av fíggjarligu fyritøkunum eru viðvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangi løgskipaðar í hvítvaskfyriskpanini, og eru annars løgskipaðar í donsku fíggjaligu lóggávuni, sum er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Nakrar fíggjaligar fyritøkur, undir hesum lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar og tryggingarmeklarar, eru vikvíkjandi hvítvasking og fígging av yvirgangi løgskipaðar hvítvaskløgtinglógini og eru annars løgskipaðaðar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi. Fyri Føroya Realkreditstovn (Realin) er galdandi serlig lóg, løgtingslóg umFøroya Realkreditstovn.

*Realkredittstovnar, lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar.*

Galdandi lóg á yvirtiknum økjum, hvítvaskløgtingslógin frá 2010, fevnir um realkredittstovnar, lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar.

*Tryggingarmeklarar og deildir hjá útlendskum fyritøkum*
Eisini eru tryggingarmeklarar fevndir av hvítvaskløgtingslógini, tá teir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar og deildir hjá útlendskum fyritøkum her í landinum, tá hesar útinna realkredittvirksemi, lívstryggingarvirksemi og miðlan av lívstryggingum ella øðrum íløgurelateraðum tryggingum.

*Gjaldoyraveksling, peingaflytingar og fyritøkur og persónar fevndar av skjali 1 til hvítvaskløgtingslógina*

Hvítvaskløgtingslógin hevur fevnt um fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi gjaldoyraveksling, ella at flyta pengar og virði, og aðrar fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna eitt ella fleiri av tí í skjali 1 til lógina nevnda virksemi.

Fyritøkur og persónar, sum hava verið fevnd av skjali til 1 til hvítvaskløgtingslógina, eru m.a. fyritøkur og persónar, sum útinna vinnuligt virksemi, m.a. viðvíkjandi móttøku av innlánum og aðrari ogn, sum skylda er at afturrinda, útlánsvirksemi, heruppií m.a. forbrúkarakredittir, realkreditlán, factoring og diskontering, handilskredittir.

Hetta er broytt við hvítvaskfyriskipanini við tað, at fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi gjaldoyraveksling, og fyritøkur og persónar, fevndar av skjali 1 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, nú eru fevndar av hvítvaskfyriskipanini, undantikið tó realkreditt.

*Ávísar fyritøkur, sum ikki eru fíggjarligar fyritøkur*

Hvítvaskløgtingslógin fevnir eisini um ávísar fyritøkur, sum ikki eru fíggjarligar fyritøkur, undir hesum løggildir og skrásettir grannskoðarar, og fyritøkur og persónar, sum veita somu tænastur sum løggildir og skrásettir grannskoðarar og advokatar, undir hesum ognarmeklarar, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar.

Í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá er heimild til, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann undantaka ávísar fyritøkur og persónar, sum bert í avmarkaðan mun útinna fíggjarligt virksemi. Hendan heimildin er ikki nýtt.

*Fyritøkur og persónar, sum bjóða út spælitænastur*

Eftir tilmæli FATF´s eru pliktaðar eindir spæliskálar (kasinoir) fysiskar og online. Eftir grein 2, stk. 2 í 4. hvítvaskdirekitivinum eru allir útbjóðarar av spælitænastum pliktaðar eindir, tó við møguleika at undantaka ávís spøl, har tað verður mett at vera avmarkaður váði fyri

hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Eftir 4. hvítvaskdirektivinum kann undantaksheimildin ikki nýtast í sambandi við spæliskálar, annaðhvørt tað so er fysiskir ella online.

Fyritøkur og persónar, sum bjóða út spælitænastur, eru ikki fevnd av hvítvaskløgtingslógini.

Spøl eru annars løgskipað í løgtingslóg um eydnuspæl v.m., løgtingslóg um ítróttavedding umframt í løgtingslóg um Kringvarp Føroya. Heldur ikki í hesi lóggávu eru ásetingar um hvítvasking.

Í løgtingslóg um ítróttavedding er ásett, at Sp/f Ítróttavedding kann gera avtalu við veddingar- og eydnuspælsfelag, ið er góðkent av tí danska spælimyndugleikanum, ella av spælimyndugleikanum í einum av hinum Norðurlondunum, um at spøl hjá hesum felagnum verða boðin út í Føroyum. Eisini er ásett, at tá Sp/f Ítróttavedding ger slíka avtalu, er spælið fevnt av lóggávuni í tí landi, har felagið er góðkent.

Sostatt verður mett, at slíkar fyritøkur og persónar, sum hava góðkenning frá danska spælimyndugleikanum, ella frá spælimyndugleikanum í einum av hinum Norðurlondunum, og sum bjóða spøl út í Føroyum eftir avtalu við Sp/f Ítróttavedding sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, eru fevnd av hvítvasklóggávuni í viðkomandi landi og undir eftirliti har.

### 1.5.1.2. Uppskot

Nýtsluøki lógarinnar í hvítvaskløgtingslógini heldur eftir uppskotinum fram við teimum broytingum, sum nevndar eru niðanfyri.

*Gjaldoyraveksling, peningaflytingar o.a.*
Skotið verður upp, at verður strikað í tí nýggju hvítvaskløgtingslógini, at gjaldoyraveksling, peningaflytingar og fyritøkur og persónar, fevnd av skjali 1 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, eru fevnd av lógini við tað, at hesar fyritøkur og persónar nú eru fevnd av hvítvaskfyriskipanini, undantikið tó realkreditt.

*Fyritøkur og persónar, sum bjóða út spøl*
Skotið verður upp, at lóarøkið verður víðkað til eisini at fevna um fyritøkur og persónar, sum bjóða út spøl. Harumframt verður skotið upp, at landsstýrismaðurin verður heimilaður at undantaka spøl, tó ikki spæliskálar, annahvørt tað so er fysiskir ella online.

Í Danmark bleiv spæliøkið liberalisera í 1990. Av tí, at økið ikki er liberaliserað í Føroyum, eru spøl í vinnuligum høpi forboðin, um tað ikki er serlig lógarhimild fyri teimum, sbr. § 203 í revsilógini.

Kortini verður skotið upp, at spæliøkið verður tikið við í uppskotið, men samstundis verður ásett í § 1, stk. 4, í uppskotinum, at Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at lógin heilt ella partvíst ikki skal verða nýtt upp á spøl, har mett verður at vera ein avmarkaður váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Ætlanin er, at landsstýrismaðurin ger kunngerð, har tað gongur fram, hvørji spøl verða undantikin. Mett verður, at øll ella stórur partur av teimum spølum, sum í dag verða boðin út í Føroyum, kunna undantakast eftir undantaksheimild landsstýrismanins. Harumframt eru spøl, sum nevnt í pkt. 1.5.1.1 omanfyri, sum verða bjóðað út av fyritøkum og persónum frá einum

av hinum norðurlondunum eftir avtalu við Sp/f Ítróttavedding, undir lóggávuni og eftirlitinum í heimlandinum.

### 1.5.2. Allýsingar

#### 1.5.2.1. Galdandi rættur

§ 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg ásetur, at allýsingarnar í § 3 hvítvasfyriskipanini frá 2010 eisini verða nýttar samsvarandi upp á persónar og fyritøkur, fevnd av hvítvasløgtingslógini.

*Veruligir eigarar*
Veruligur eigari av einum vinnufelag verður allýstur sum tann ella teir peresónar, sum í síðsta enda eiga ella hava ræði á einum vinnufelag við beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskapi ella ræði við 25 prosent av eigarapørtunum ella atkvøðurættinum, tó undantikið børsskrásett feløg.

Løgtingið samtykti seinasta vár løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 um broyting í vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini, vinnugrunnalógini og tryggingarlógini. Endamálið við lógini er at seta í verk eina skrá yvir veruligar eigarar.

Í hvítvaskfyriskipanini er allýsingin av veruligum eigarum broytt soleiðis, at hon er í samsvari við allýsingina í donsku vinnufelagalóggávuni, og eisini í samsvari við allýsingina í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019.

Allýsingin í hvítvaskfyriskipanini er tó breiðari enn allýsingin í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, sum m.a kemst av, at allir formar av løgfrøðiligum eindum, undir hesum útlendskir vinnufelagaformar, sum ikki eru kendir í Føroyum, kunnu vera kundar hjá fyritøkum og persónum, sum eru fevnd av hvítvaskfyriskipanini.

*Hvítvasking*
Allýsingin av hvítvasking hevur sum fortreyt, at aftanfyriliggjandi lógarbrotið hevur við sær ein ítøkiligan vinning, sum kann eyðmerkjast.

Í grein 3 í 4. hvítvaskdirektivinum verður ein brotsgerð allýst í mun til hvítvaskallýsingina í grein 4, sum øll lógarbrot, undir hesum brot viðvíkjandi skattalóggávuni, sum allýst í nasjonalari lóggávu í sambandi við beinleiðis og óbeinleiðis skattir, sum kunnu hava við sær fongsulsrevsing ella trygdartiltøk upp á í mesta lagi 1 ár.

*Politiskt ábærir persónar*
Grein 3, nr. 9 í hvítvaskdirektivinum allýsir ein politiskt ábæran persón sum ein fysiskan persón, sum hevur ella hevur havt høgt alment starv eins og tað verður nevnt, hvørji almenn størv eru viðkomandi.

*Korrespondentsamband*
Hvítvaskløgingslógin løgskipar korrespondentbankasamband, men hugtakið verður ikki allýst í lógini. Í 4. hvítvaskdirektivi er hugtakið víðkað til meira enn veitan av peningsstovnsveitingum frá einum peningastovni (korrespondenturin) til ein annnan peningastovn (respondenturin).

#### 1.5.2.2. Uppskot

*Veruligir eigarar*
Skotið verður upp at orða allýsingina av veruligum eigarum av nýggjum soleiðis, at allýsingin er í samsvari við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, eins og allýsingin skal fevna um allar løgfrøðiligar eindir, sum kunnu vera kundar hjá fyritøkum ella persónum, fevnd av hvítvaskløgtingslógini. Samtundis verður skotið upp, at í førum, har tað ikki er ein veruligur eigari, skal dagliga leiðslan skrásetast sum veruligur eigari.

*Hvívasking*
Skattaundandráttur verður eftir uppskotinum og samsvarandi 4. hvítvaskdirektivinum tikin upp í lógaruppskotið sum undirliggjandi brotsverk til hvítvasking. Við hesum verður greitt, at fíggarligir miðlar, sum eru fingnir skttaundandrátti, eru fevndir av hvítvaskløgingslógini uttan mun til um teir ítøkiliga undandridnu fíggjarligu miðlarnir kunnu eyðmerkjast.

*Politiskt ábærir persónar*
Við støði í 4. hvítvaskdirektivinum er allýsingin í uppskotinum av politiskt ábærum persónum víðkað soleiðis, at tað eisini fevnir um persónar búsitandi her á landi, leiðsluna í politiskum flokkum og leiðsluna í altjóða stovnum.

*Korrespondentsamband*
Í hvítvaskfyriskipanin, § 2, nr 2, litra a og litra b, fevnir korrespondentsamband um a) peningastovnsveitingar frá einum peningastovni (korrespondentin) til ein annan peningastovn (respondentin), og b) líknandi veitingar millum fyritøkur, sum ikki eru peningastovnsfyritøkur.

Skotið verður upp, at korrespondentsamband verður allýst samsvarandi við § 2, nr 2, litra litra b, hvítvaskfyriskipanini.

### 1.5.3. Kontantgjaldsforboð

#### 1.5.3.1 Galdandi reglur

Eftir § 2 í galdandi hvítvaskløgtingslóg er tað forboðið handlandi og uppboðssølufólki at taka ímóti upphæddum í reiðum peningi áljóðandi kr. 100.000 ella meira, annaðhvørt goldið verður í einum ella fleiri gjøldum, ið sýnast at vera innanhýsis samanhangandi.

Kontantgjaldsforboðið er bert galdandi fyri handlandi av lutum og uppboðssølufólki, men ikki fyri fyritøkur og persónar, sum annars eru fevnd av hvítvasløgtingslógini. Hinvegin galda hinar reglurnar í hvítvasløgtingslógini, undir hesum kanningar- og fráboðnarskyldan, ikki fyri handlandi av lutum og uppboðssølufólki.

Ásetingin um kontantgjaldsforboðið í galdandi hvítvaskløgtingslóg er einsljóðandi við ásetingina í § 2 í donsku hvítvaslógini frá 2006.

Í Danmark vórðu reglurnar um kontantgjaldsforboðið í donsku hvítvasklógini frá 2006 broyttar við lóg nr. 634 frá 12. juni 2013 om ændring af straffeloven, retsplejeloven og forskellige andre love (Styrket indsats over for økonomisk kriminalitet). Í viðmerkingunum til uppskotið, 2012/1 LSF 164.

**1.5.3.2. Uppskot**
Skotið verður upp, at persónskarin, sum er fevndur av kontangjalsforboðnum, verður víðkaður til at fevna um allar vinnurekandi fyritøkur og persónar, sum ikki annars eru fevnd av hinum reglunum í hvítvaskløgingslógini.

Harumframt verður skotið upp at markið fyri, hvussu stóra kontantgjaldsupphædd tað er loyvt at taka ímóti, verður lækkað úr kr. 100.000 niður í 50.000.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 5 í uppskotinum.

### 1.5.4. Váðameting og váðastýring

**1.5.4.1. Galdandi reglur**
Fyri at fyribyrgja og forða fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi, skulu fyritøkur og persónar, fevnd av galdandi hvítvaskløgtingslóg, hava nøktandi skrivligar reglur um kundalegitimasjón, ansni, noteringsskyldu, fráboðanarskyldu, varðveitslu av skrásetingum, váðameting, váðastýring, leiðslueftirlit og samskifti.

Galdandi hvítvaskløgtingslóg inniheldur ikki nærri reglur um váðameting og váðastýring. Fíggjareftirlitsins "vejledning om lov om forebyg-gende foranstaltninger mod hvidvask og finansie-ring af terrorisme (hvidvaskloven)" frá 2018 inniheldur nágreiniligar upplýsingar um gerð av váðametingum. SØIK (Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet) hevur harumframt givið út "Hvidvask i Danmark Den nationale risikovurdering 2018" og Figgjareftirlitið hevur m.a. tann 22. desember 2015 almannakunngjørt "Vurdering af risikoen for hvidvask og finansiering af terrorisme for livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser."

Eftir galdandi hvítvaskløgtingslóg skulu realkredittstovnar, lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar og tryggingarmeklarar tilnevna ein persón á leiðslustigi, sum skal tryggja, at reglurnar verða hildnar. Tað er harumframt eitt krav, at tað skulu gerast og gjøgnuførast útbúgvingar- og vegleiðingarætlanir fyri viðkomandi medarbeiðarar.

**1.5.4.2. Uppskot**
Kapittul 2 í uppskotinum inniheldur krøv til fyritøkur og persónar viðvíkjandi váðameting og váðastýring. Uppskotið byggir á eina meira váðagrundaða tilgongd heldur enn eina reglugrundaða sum í dag.

Ein váðagrundað tilgongd fevnir um váðameting, har fyritøkur og persónar skulu eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan ella persónurin kann blíva misnýttur til hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Við váða meinast innbygdi váðin fyri, at fyritøkur og persónar kunnu blíva misnýttir til hvítvasking og fígging av yvirgangi. Tað merkir, at meting av váða skal verða gjørd uttan atlit at teimum váðaavmarkandi atgerðum, sum fyritøkur og persónar hava sett í verk sambært uppskotinum. Váðametingin skal taka støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum, og skal fevna um teir váðar, sum eru tiknýttir kundum, vørum, tænastum, transaksjónum umframt veitingarkanalum og lond ella landafrøðilig øki, har handilsvirksemið er.

Tað er avgerandi fyri stríðið móti hvítvasking og fígging av yvirgangi, at fyritøkurnar ella persónarnir nýta váðametingina í rakstrinum av fyritøkum teirra, undir hesum at fyritøkan hevur skrivligar politikkir, mannagongdir og eftirlit til fyribyrging og forðan av hvítvasking og fígging av yvirgangi. Ein politkkur hevur við sær, at fyritøkan ella persónurin skal áseta tey yvirskipaðu strategisku málini í mun til fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi, meðan tað við mannagongdir skilst, at tað virksemi, sum skal fremjast, er nøktandi lýst.

Umframt váðameting og váðaavmarkandi tiltøk, verður fyri fyritøkur og persónar, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-5 í uppskotinum, sett krav um tilnevning av einum starvssettum ella limi í dagligu leiðsluni, sum hevur fulltrú at taka avgerðir vegna fyritøkuna. Persónurin skal hava nóg stóran kunnleika til váðan hjá fyritøkuni fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi til at kunna taka avgerðir, sum kunnu ávirka váðaeksponeringina hjá fyritøkuni. Hesin persónur skal m.a. hava til uppgávu at gókenna handilslig sambond, har váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størri umframt at góðkenna fyritøkunnar politikkir, mannagongdir og eftirlit. Persónurin skal hava nøktandi vanligt umdømi, og skal ikki hava havt eina atferð, sum gevur grund at halda, at hann ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt. Hóast uppskotið generelt fevnir bæði um fyritøkur og persónar, er tað ikki neyðugt fyri persónar at tilnevna ein serligan persón við tað, at tað í flestu førum er talan um einstaklingafyritøkur.

Av uppskotinum fylgir eisini, at fyritøkur og persónar skulu screena starvsfólk teirra soleiðis, at tað verður tryggjað, at tey stavssettu ikki kunnu misnýta starvið til hvítvask og fígging av yvrgangi. Hetta kann m.a. tryggjast við at fyritøkurnar áðrenn starvssetanina kanna, at viðkomandi ikki er dømdur fyri brotslig viðurskifti, sum økir váðan fyri, at viðkomandi misnýtir starvið til hvítvasking og fígging av yvirgangi. Kravið hevur eisini við sær, at tey starvssettu hava neyðugar førleikar, sum lýst í tilmæli FATFs nr. 18.

Tað kunnu vera øki, har tað ikki er tørvur á, at einstaka fyritøkan ella persónurin ger eina individuella váðameting. Tað skal vera møguligt at undantaka øki, har viðurskiftini viðvíkjandi váða eru einføld, og har viðkomandi vinnugrein má haldast at hava eina greiða fatan av váðunum. Hetta kann t.d. vera føri á økjum, har tað er avmarkaður váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Í § 6, stk. 3 í uppskotinum er tí heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um undantøk frá krøvunum um váðameting.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar skulu hava skrivligar politikkir, manngongdir og eftirlit, sum skulu fevna um kundakunnleikamannagongdir, kanningar- noterings- og fráboðanarskyldu, varðveitslu av upplýsingum, screening av medarbeiðarum og innaneftirlit.

Viðvíkjandi fíggjarligum fyritøkum, sum eru undir føroyskari lóggávu, undir hesum m.a. lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, og sum eftir aðrari lóggávu hava skyldu at hava eina compliance funksjón, verður skotið upp, at hesar fyritøkur skulu tilnevna ein compliance ábyrgdara, sum skal hava eftirlit við og meta um, hvørt fyritøkunnar mannagongdir og tiltøk eru effektiv.

Samsvarandi verður skotið upp, at dagliga leiðslan í fyritøkum, sum hava eina innanhýsis grannskoðan, skulu tryggja, at innanhýsis grannskoðanin metir um, hvørt fyritøkunnar politikkir, mannagongdir og eftirlit eru løgd til rættis og virka á tryggjandi hátt.

Lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar skulu eftir løgtinslógini um tryggingarvirksemi longu í dag hava ein compliance ábyrgdara og eina óhefta

grannskoðararfunksjón, og tiltøkini eftir uppskotinum eru bert ætlað at áseta, at hesar funksjónir verða víðkaðar til eisini at fevna um krøv eftir hesum uppskotinum.

Eisini verður skotið upp, at fyritøkur, har tað verður mett viðkomandi, skulu tilnevna ein lim í nevndini, sum skal hava ábyrgdina av, at fyritøkan heldur hetta lógaruppskotið og reglur settar í gildi sambært tí.

Eftir uppskotinum skulu starvssett, undir hesum leiðlan, fáa nøktandi undirvísing í krøvunum í hesum uppskotinum umframt í viðkomandi krøvum um dátuvernd.

Loksins verður skotið upp, at samtøkur skulu hava politikkir fyri dátuvernd umframt politikkir og mannagongdir fyri skifti av upplýsingum innan fyri samtøkuna. Fyritøkur, sum eru partur í eini samtøku, skulu gjøgnumføra samtøkunnar politikkir og mannagongdir.

Víst verður til §§ 6- 8 í uppskotinum.

### 1.5.5. Kundakunnleikamannagongdir

#### 1.5.5.1. Galdandi rættur
Eftir § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, sbr. § 12, stk. 1- 3, í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, skulu fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvaskløgtingslógini, innheinta samleikaupplýsingar og útvega nøktandi legitimasjón frá føstu kundum teirra Kundakunnleikamannagongdin skal gjøgnumførast, áðrenn handilssamband verður tikið upp við kundan, og áðrenn tað verða gjøgnumførdar transaksjónir fyri hann, sbr. 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg og § 13 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Harumframt skulu innheintast upplýsingar um kundans endamál við handilssambandinum og hvussu umfatandi tað er ætlað at vera, og – um neyðugt – hvar fæið kemur frá, sbr. 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg og § 12, stk. 4 og 5, í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Fyri kundar, sum eru fyritøkur, skulu upplýsingar um eigara- og kontrolstukturin í fyritøkuni lýsast, og veruligir eigarir skulu eyðmerkjast og legitimerast.

Legitimasjónsmannagongdin kann gjøgnumførast út frá eini váðameting, men fyritøkan ella persónurin skal mótvegis eftirlitsmyndugleikanum kunna vísa á, at tiltøkini hava verið nøktandi, sbr. 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg og § 12, stk. , í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Tað skal vera støðug yvirvøka av kundaviðurskiftinum m.a. fyri at tryggja, at transaksjónirnar eru í samsvari við fyritøkunnar ella persónsins vitan um kundan, sbr. 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg og § 12, stk. 5, í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Endamálið við kundakunnleikamannagongdini er, at tær fevndu fyritøkurnar vita, hvørjir kundar teirra eru, og hvat endamál kundans er við handilssambandinum.

#### 1.5.5.2. Uppskot
Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar skulu gjøgnumføra kundakunnleikamannagongdir í ymsum støðum, undir hesum tá tey stovna handilssamband og í sambandi við einstakar transaksjónir upp á í minsta lagi 15.000 evrur og 2.000 evrur við útbjóðing av spølum, annaðhvørt transaksjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaksjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar.

Kundakunnleikamannagongdir skulu esini gjøgnumførast í sambandi við peningaflytingar og gjaldoyraveksling, men tað er løgskipað í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), og har er markið 1.000 evrur.

Harumframt skulu tað gjøgnumførast kundakunnleikamannagongdir, um viðkomandi umstøður hjá einum kunda broytast, og annars hóskandi tíðir.

Skotið verður upp, at kundakunnleikamannagongdirnar fevna um kundans og veruliga eigarans samleikaupplýsingar umframt eftirkanning av teimum. Er kundin ein løgfrøðiligur persónur, verður skotið upp, at tað skulu gjøgnumførast rímilig tiltøk fyri at lýsa eigara- og ræðisviðurskiftini hjá løgfrøðiliga persóninum.

Í fulltrúaviðurskiftum skulu eisini gjøgnumførast kundakunnleikamannagongdir viðvíkjandi fúlltrúanum.

Fyritøkan ella persónurin skal meta um, og, har tað er viðkomandi, innheinta upplýsingar um endamál og ætlað slag av kundasambandinum.

Kundakunnleikamannagongdir fevnir harumframt um yvirvøku av kundaviðurskiftunum.

Kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast við bakstøði í eini váðameting, har tað skulu takast við upplýsingar um endamálið við handilssambandinum, vavið av tí, reglusemi og longd.

Á lívstryggingarøkinum verður skotið upp, at kundakunnleikamannagongdirnar harafturat fevna um, at fyritøkurnar við stovnan av kundasambandinum skulu kenna navnið á njótunartilskilaðað. Harumframt skulu samaleikaupplýsingar um njótunartilskilaðað eftirkannast í seinasta lagi tá tað verður rindað út.

Skotið verður upp, at kundans samleikaupplýsingar skulu verða eftirkannaðar, áðrenn handilssambandið verður stovnað ella tað verður gjørd ein transaksjón. Eftirkanning kann í ávísum førum verða gjørd seinni. T.d. um tað er avmarkaður váði fyri hvítvasking av pengum ella fígging av yvirgangi, og tað er neyðugt fyri ikki at bróta vanligu handilsgongdina. Skotið verður upp skylda at slíta eitt handilssamband, um kundakunnleikamannagongdin ikki kann verða gjøgnumførd.

Skotið verður upp, at fysiskir persónar skulu móttaka upplýsingar um tær reglur, sum galda fyri viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fyribyrgja hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Eisini verður skotið upp, at viðgerð av persónsupplýsingum til onnur endamál, undir hesum handilslig endamál, má ikki koma fyri.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar skulu gjøgnumføra herdar kundakunnleikamannagongdir, har tað verður mett at vera øktur váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Skotið verður upp í skjali 2 at vísa á støður, sum potentielt hava við sær øktan váða fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Harumframt verður skotið upp, at herdar kundakunnleikamannagongdir altíð skulu gjøgnumførast við politiskt ábærar persónar. Samstundis verður skotið upp, at herdar kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast í mun til politiskt ábærar persónar, sum eru veruligir eigarar av einum kunda, tann njótunartilskilaði sambært einum lívstryggingarskjali ella veruligi eigarin av njótnartilskilaðað. Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar í minsta lagi 12 mánaðir eftir, at viðkomandi politiskt ábæri persónurin steðgar í starvi sínum, skal gera eina meting av, um kundaviðurskifti hava við sær øktan váða fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Samtidig fastsætter 4. hvidvaskdirektiv, at de skærpede procedurer i forhold til politisk eksponerede personer yderligere skal varetages i forhold til en reel ejer, en begunstiget i henhold til en livsforsikringspolice og en begunstigedes reelle ejer.

Eisini verður skotið upp, at tað skulu gjøgnumførast herdar kundakunnleikamannagongdir við korrespondentsambond um landamørk.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar kunnu gjøgnuføra linari kundakunnleikamannagongdir, har tað verður mett at vera avmarkaður váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Skotið verður upp í skjali 2 at vísa á støður, sum potentielt hava við sær avmarkaðan váða fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Tað skal í hvørjum føri sær metast um, hvørt tað er eitt føri við avmarkaðum váða, áðrenn tað verða gjøgnumførdar linari kundakunnleikamannagongdir.

Víst verður til §§ 9-20 í uppskotinum.

### 1.5.6. Hjálp frá triðjamanni

#### 1.5.6.1. Galdandi reglur
Í
Í § 3 í galdandi hvítvaskløtingslóg frá 2010, sbr. § 17 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, er atgongd til at nýta nærri tilskilaðan triðjamann til at lúka ávís kundakunnleikakrøv. Tann fyritøkan ella persónurin, sum stovnar kundaviðurskftini, hevur ábyrgdina av, at reglurnar í lógini veða hildnar.

Tað er harumframt eftir § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, sbr. § 18 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, atgongd til at útveita skyldur eftir lógini treytað av, at tað verður tryggjað, at veitarin hevur evni og kapasitet til at lúka lógarinnar krøv o.a. Veitarin skal áhaldandi eftirkannast.

#### 1.5.6.2. Uppskot
Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av uppskotinum, kunnu lata til triðjamann at innheinta ávísar kundakunnleikaupplýsingar, um upplýsingarnar verða gjørdar tøkar av eini fyritøku ella persóni, fevnd av lógaruppskotinum ella eini fyritøku ella persóni, stovnsettur í einum ES- ella EBS-landi ella ein tilsvarandi fyritøka ella persónur í øðrum londum, sum skal lúka krøv í 4. hvítvaskdirektivinum.

Harumframt verður skotið upp, at upplýsingarnar kunnu gerast tøkar av einum limafelagsskapi ella samtøku av fyritøkum og persónum, um hesi eru undir krøvum, sum svara til krøvini í 4. hvítvasdirektivinum. Tað verða tó settar ávísar treytir fyri at nýta hendan møguleikan.

Skotið verður upp, at tað skal vera møguligt at lata upplýsingar innanfyri eina samtøku umframt at tað framvegis skal vera møguligt, eftir avtalu, at útveita uppgávur.

Víst verður til §§ 21- 23 í uppskotinum.

### 1.5.7. Kanningar-, noterings- og fráboðanarskylda

#### 1.5.7.1. Galdandi reglur

Fyritøkur og persónar, fevnd av galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, skulu vera eftiransin viðvíkjandi virkseminum hjá kundum, sum orsakað av eyðkennum við virkseminum verða hildin at kunna hava tilknýti til hvítvasking ella fígging av yvirgangi, sbr. § 3 í galdandi hvítvasklóg, sbr. § 6, stk. 2 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Endamálið við transaksjónum skulu kannast og úrslitið av eini kanning skal noterast og varðveitast.

Er illgruni um, at transakjónin ella ein áheitan hevur ella hevur havt tilknýti til hvítvasking ella fígging av yvirgangi, skal transaksjónin ella áheitanin kannast nærri. Um illgrunin viðvíkur lógarbrotum, sum kunnu revast við fongsli í meria enn eitt ár, og hesin illgrunin ikki kann avsannast, skal SØIK beinanvegin fráboðast, sbr. § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, sbr. § 7 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Advokatar, sum vórðu løgskipaðir í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, og nú í nýggju hvítvasfyriskipanini, eru undantiknir skylduni at fráboða upplýsingar, sum teir fáa frá einum viðskiftafólki, tá teir staðfesta rættarstøðuna hjá einum viðskiftafólki ella verja ella umboða hann í ella í sambandi við reitt rættarmál, undir hesu, tá teri rágeva um at fara undir ella at sleppa undan rættarmáli. Sama er galdandi fyri ávísar persónar í líknandi vinnu, t.d. grannskoðarar við mál í Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Eftirlitmyndugleikarnir hava skyldu til at fráboða SØIK, um teir fáa kunnleika um viðurskifti, sum eru fevnd av fráboðanarskylduni.

Um atlit at rannsóknini ikki tala ímóti tí, kann SØIK geva tí, sum hevur fráboðað, kunning um støðuna í málinum, undir hesum um tað er reist ákæra eins og tað kann kunnast um striking í hvítvaskskránni hjá SØIK og um endaliga avgerð við dómi.

#### 1.5.7.2. Uppskot

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar skulu kanna bakgrundina fyri og endamálið við øllum torgreiddum og óvanliga stórum transaksjónum umframt øllum óvanligum transakjónsmynstrum og virksemi, sum ikki hava eitt greitt fíggjarligt ella ávísiligt lógligt endamál, fyri at staðfesta, um illgruni er um ella rímilig orsøk at halda, at hesar transaksjónir hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Harumframt verðiur skotið upp, at fyritøkur og persónar skulu, har tað hevur týdning, víðka yvirvøkuna av kundanum.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, fevnd av lógaruppskotinum, beinanvegin skulu boða SØIK frá, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaksjón ella eitt virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Eftir uppskotinum eru ávís undantøk frá fráboðarskylduni. Tað er galdandi fyri grannskoðarar viðvíkjandi upplýsingum, sum teir hava fingið um eitt viðskiftafólk, tá teir umboða eitt viðskiftafólk í Skatta- og avgjaldskærunevndini. Tað er eisini galdandi fyri fyritøkur og persónar, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 6-8 í uppskotinum, undir hesum grannskoðarar, tá teir hjálpa einum advokati áðrenn, undir og aftan á eitt rættarmál ella hjálpa til við at staðfesta rættarstøðuna hjá einum viðskiftafólki. Teir eru undantiknir frá skylduni at fráboða í sama mun, sum tann advokaturin, teir hjálpa, sbr. § 27, stk. 1 í hvítvaskfyriskipanini frá 2019.

Skotið verður upp, at eftirlitsmyndugleikar hava skyldu at fráboða SØIK við kunnleika til viðurskifti, sum kunnu geva orsøk til at halda, at hesi viðurskifti kunnu hava tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi, og at fráboðanarskyldan eisini skal fevna um Taks.

Samstundis verður skotið upp, at ein skrásettur persónur hevur ikki rætt til innlit í persónsupplýsingar, sum eru ella fara at verða viðgjørdar í sambandi við eina fráboðan.

Víst verður til §§ 24- 27 í uppskotinum

### 1.5.8. Varðveiting av upplýsingum

#### 1.5.8.1. Galdandi rættur

Samleika- og eftirekanningarupplýsingar, sum verða innheintaðar frá kundum, skulu varðveitast í minsta lagi 5 ár, sbr. § 3 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 30 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Við eftirkanningarupplýsingar skilst upplýsingar um tað legitimasjón, sum er útvegað fyri at eftirkanna, at samleikaupplýsingarnar eru rættar. Eftirkanningarupplýsingar kunnu vera avrit av legitimasjónsskjølum, sum eru innheintað sambært hvítvaskløgtingslógini frá 2010. Eftir § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, sbr. § 23, stk. 1, 2. pkt. í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, kunnu tær fyritøkur og teir persónar, sum eru fevnd av lógini, varðveita avrit av legitimasjónsskjølum, men tað er ikki eitt krav. Eftir galdandi rætti er tað tí nóg mikið at varðveita t.d. kundans pass nr., um hetta er lagt fram í sambandi við legtimasjónsmannagongdina. Avrit av passinum kann varðveitast, uttan at tað verður mett at vera í stríð við reglurnar í persónsupplýsingarlógini (løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004).

Persónsupplýsingarlógin løgskipar viðgerð av persónsupplýsingum, sum verður framd av almennum myndugleikum og privatum, tá viðgerðin er heilt ella lutvíst elektronisk. Lógin fevnir eisini um persónsupplýsingarnar, sum eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um

viðgerðin ikki er elektronisk. Í § 4 í lógini er ásett, at lógin víkir fyri ásetingum um viðgerð av persónsupplýsingum í aðrari lóggávu, sum hava við sær, at tann skrásetti fær eina betri rættarstøðu. Av viðmerkingunum til hesa ásetingina (løgtingsmál nr. 103/2000: Uppskot til løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum) gongur fram, at persónsupplýsingarlógin hinvegin er tann, sum er galdandi, um ásetingar um viðgerð av persónsupplýsingum sambært aðrari lóg hava við sær eina verri rættarstøðu fyri skrásetta, enn persónsupplýsingarlógin gevur, men at tað skal havast í huga, at persónsupplýsingarlógin er ein generel lóg, og at lógin sostatt má víkja fyri serlóg, ið nágreiniligari og øðrvísi lýsir mannagongdina við viðgerð av persónsupplýsingum, enn persónsupplýsingarlógin ger.

Í § 8, stk. 1, nr. 5 í persónsupplýsingarlógini er ásett, at persónsupplýsingar skulu verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini. § 9, stk. 1, nr. 4 í lógini ásetur, at persónsupplýsingar kunnu bert viðgerast, um viðgerðin er neyðug til tess at røkja eitt samfelagsáhugamál.

Tað er ikki vikið frá persónsupplýsingarlógini í galdandi reglum um varðveitslu av legitimasjónsskjølum.

### 1.5.8.2. Uppskot

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, fevnd av uppskotinum, skulu varðveita upplýsingar, fingnar til vega í sambandi við at lúka krøvini um kundakunnleikamannagongdir, skjalprógv fyri og skráseting av transaksjónum umframt skjøl og skrásetingar viðvíkjandi gjørdum kanningum.

Skotið verður upp, at upplýsingarnar skulu varðveitast í minst lagi 5 ár eftir, at handilssambandið er hildið uppat.

Víst verður til § 28 í uppskotinum.

## 1.5.9. Virksemi um landamørk o.a.

### 1.5.9.1. Galdandi reglur

Fyritøkur, fevndar av galdandi hvítvaskløgtingslóg, skulu sambært § 3 í lógini, sbr. § 24 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, tryggja, at teirra deildir ella dótturfeløg, har tey eiga meirilutan, sum eru stovnsett í einum landi, sum ikki er eitt EU- eller EØS-land, og sum ES ikki hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum, hava skrivligar innanhýsis reglur og tiltøk viðvíkjandi løgváttan av kundum og varðveitslu av samleikaupplýsingum, sum svara til krøvini í 3. hvítvaskdirektivinum í tann mun, landsins lóggáva loyvir tí. Um landsins lóggáva ikki loyvir tilsvarandi tiltøkum, skal fyritøkan fráboða eftirlitsmyndugleikanum. Fyritøkan skal harumframt tryggja sær, at tað á annan hátt verður forðað fyri váðanum fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi. Samsvarandi skyldur eru ikki galdandi fyri deildir og dótturfeløg, sum eru stovnsett innanfyri ES/EBS.

### 1.5.9.2. Uppskot

Skotið verður upp, at fyritøkur, sum reka virksemi í einum øðrum EU- eller EØS-landi, skulu tryggja sær, at stovnsetta fyritøkan heldur tær reglur um hvítvask og fígging av yvirgangi, sum eru galdandi í viðkomandi landi.

Eisini verður skotið upp, at fyritøkur, sum hava deildir ella dótturfeløg, har tey eiga meirilutan, sum eru stovnsett í einum landi, sum ikki er eitt EU- eller EØS-land, og har krøvini til at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi eru linari enn krøvini í hvítvaskløgtingslógini, skulu tryggja sær, at deildin ella dótturfelagið, har felagið eigur meirilutan, lúka tey krøv, sum verða sett í hvítvaskløgtingslógini og krøvunum um dátuvernd, í tann mun tað ikki er í stríð við rættarreglur í tí landi, har deildin ella dótturfelagið, har felagið eigur meirilutan, eru stovnsett. Loyva rættarreglur í einum landi, sum ikki er eitt ES- ella EBS-land, ikki at krøvini í hvítvaskløgtingslógini verða framd, skal fyritøkan fremja eyka tiltøk fyri at tryggja, at váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi í deildunum ella dótturfeløgunum, har felagð eigur meirilutan, verður forðaður ímóti á annan hátt. Loyva rættarreglur í viðkomandi landi ikki, at krøvini í hesi lóg verða framd, gevur fyritøkan tí myndugleika, sum ansar eftir, at fyritøkan heldur hvítvaskløgtingslógina, boð um hetta.

Eftir uppskotinum skulu fyritøkur í einum samtaki, har tað er gjørd fráboðan til SØIK, skifta um upplýsingar við aðrar fyritøkur í samtakinum um, at illgruni er um, at peningur er vinningur frá eini brotsgerð, ella at vera tengdur at fígging av yvirgangi.

Fyritøkur í einum samtaki mugu ikki skifta um persónsupplýsingar, uttan tað sum er neyðugt.

Skotið verður upp, at Tryggingareftirlitið kann áseta reglur um tiltøk í mun til lond og landøki fyri at lúka krøv ella tilráðing frá FATF.

Víst verður til § 29-31.

### 1.5.10. Starvsfólk

#### 1.5.10.1. Galdandi reglur

Fyri ávísar fíggjarligar fyritøkur eru ásetingar um whistleblower-skipanir. Eftir § 75 a í "anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed" skal ein fíggjarlig fyritøka hava eina skipan, har tey starvssettu í fyritøkuni um eina serliga og sjálvstøðuga rás skulu kunna fráboða brot ella møgulig brot á fíggjarligu lóggávuna, sum um fyritøkan hevur framt, undir hesum av starvssettum ella limum í nevndini í fyritøkuni.

Ærlanin er at seta líknandi skipan í verk á tryggingarøkinum og á grannskoðaraøkinum.

#### 1.5.10.2. Uppskot

Skotið verður upp, at m.a. grannskoðarar og ognarmeklarafyritøkur, sum bjóða út spøl, skulu hava eina skipan, har starvsfólk gjøgnum eina serliga óhefta og sjálvstøðuga rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hvítvaskløgtingslógina og reglur, givnar sambært henni. Fráboðan til skipanina skal kunna gerast ónavngivið. Skotið verður upp, ar skipanin bert verður sett í verk fyri fyritøkur og persónar, sum hava fleri enn 5 starvsfólk í starvi. Viðkomandi eftirlitsmyndugleiki skal kunna gera undantak frá kravinum.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar ikki mugu koma einum starvsfólki undir ólagaliga viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur fráboðað brotið ella møgulig brotið á hvítvaskløgtingslógina lóg og reglur, givnar sambært henni, hjá fyritøkuni ella persóninum, til ein eftirlitsmyndugleika ella til eina skipan í fyritøkuni. Eisini verður skotið upp, at fyritøkur og persónar ikki mugu koma einum starvsfólki undir ólagaliga viðferð ella

fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur gjørt eina innanhýsis fráboðan um illgruna um hvítvasking og fígging av yvirgangi ella eina fráboðan til SØIK.

Starvsfólk, sum hava verið fyri ólagaligari viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur fráboðað brotið ella møgulig brot á hvítvaskløgtingslógina, fáa játtað eitt endurgjald. Endurgjaldið verður ásett við atliti at tíðini, starvsfólkið hevur verið í starvi, og umstøðunum í málinum annars.

Víst verður til §§ 32 og 33 í uppskotinum.

### 1.5.11. Tagnarskylda og ábyrgd

#### 1.5.11.1. Galdandi reglur

Reglurnr um tagnarskyldu og ábyrgd ganga fram av § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, sbr. kapittul 6 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Tær fevndu fyritøkur og persónar, undir hesum starvsett í fyritøkum og persónar, sum útinna ella hava útint serligar uppgávur fyri fyritøkur ella persónar, hava skyldu til at halda loyniligt, at fráboðan er latin SØIK um, at hetta verður umhugsað, ella at tað er ella verður sett í verk ein kanning av, hvørt talan er um hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Av § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, sbr. kapittul 6 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, at fráboðanir og upplýsingar, sum fyritøkur og persónar hava latið víðari til SØIK, ikki hava við sær nakað slag av ábyrgd fyri fyritøkuna, persónin, tann starvssetta ella leiðsluna. Víðarilatan av upplýsingum í tí sambandinum verður ikki mett at vera brot á møguligar tagnarskyldureglur í aðrari lóggávu.

#### 1.5.11.2. Uppskot

Skotið verður upp, at tað heldur fram, at fráboðanir og upplýsingar, sum fyritøkur og persónar hava latið víðari til SØIK, ikki hava við sær nakað slag av ábyrgd fyri fyritøkuna, persónin, tann starvssetta ella leiðsluna. Víðarilatan av upplýsingum í tí sambandinum verður ikki mett at vera brot á møguligar tagnarskyldureglur í aðrari lóggávu.

Víst verður til §§ 34- 35 í uppskotinum.

### 1.5.12. Eftirlit v.m.

#### 1.5.12.1. Galdandi reglur

Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið hava eftirliti við, at fyritøkur og persónar fevndir av galdandi hvítvaskløgtingslóg frá 2010, halda lógina.

Tryggingareftirlitið hevur eftirlit galdandi hvítvaskløgtingslóg eftirlit við fyritøkum, fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-5 í lógini. Tað fevnir um realkredittstovnar, Lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar, tryggingarmeklarar, tá hesir formidla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar, deildir hjá útlendskum fyritøkum her í landinum, tá hesar útinna virksemi eftir nr. § 1, stk. 1, nr. 1- 3, 5 og 6, í lógini, og fyritøkur og persónar, sum vinnuliga

útinna virksemi viðvíkjandi gjaldoyraveksling, ella at flyta pengar og virði og aðrar fyritøkur og persónar enn sum vinnuliga útinna eitt ella fleiri av tí í skjali 1 í lógini nevnda virksemi.

Skráseting Føroya hevur eftirlit við løggildum og skrásettir grannskoðarum. eigindómsmeklarum, skattaráðgevarum og eksternum bókhaldarum, og útbjóðarum av tænastuveitingum til fyritøkur.

**1.5.12.2. Uppskot**

*Tryggingareftirlitið*
Eftir uppskotinum skal Tryggingareftirlitið eins og í dag hava eftirlit við lívstryggingarfeløgum og tvørgangandi pensjónskassum, tryggingarmeklarum, tá hesir hesir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar, realkredittstovum, deildum hjá útlendskum fyritøkum her í landinum, tá hesar útinna virksemi á útlendskum fyritøkum, útbýtarir/útdeilarar og umboðsfólk her í landinum, tá hesar útinna virksemi eftir § 1, stk. 1, nr. 1- 4. Í uppskotinum
her í landinum umframt við Realinum.

Skráseting Føroya hevur eftirlit við grannskoðarum og grannskoðarafyritøkum góðkendar sambært grannskoðaralógini, ognarmeklararum og ognarmeklarafyritøkum, fyritøkum sum vinnuliga latta somu veitingar sum teir í § 1, stk. 1, nr. 6-7 í uppskotinum og í § 1, stk. 1, nr. 14 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) nevndu persónsbólkar, heruppií grannskoðarar, sum ikki eru góðkendir eftir grannskoðara-lógini, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar, og útbjóðarum av tænastuveitingum til fyritøkur.

**1.5.13. Samskifti, kærur o.a.**

**1.5.14. Revsiásetingar og ígildiskoma**

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

ordning.hava eina onumDe øvrige efterlevelsesomkostninger angår specielt større virksomheder med mange kunder og transaktioner til etablering og ændring af IT-systemer til overvågning af kunder samt identifikation af politisk eksponerede personer (højrisikokunder). Derudover skal et større antal virksomheder etablere en intern whistleblowerordning.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

Tað eru serliga fíggjarligar avleiðingar fyri størri fyritøkur við nógvum kundum og transaksjónum til at stovna og broyta telduskipanir til yvirvøku av kundum og eyðmerking av politiskt ábærum persónum. Harumframt skulu fleiri fyritøkur, sum eru fevndar av § 1, stk. 1, nr. 6-10, í uppskotinum stovna eina whistleblowerskipan, sbr. § 32 í uppskotinum

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

**Wienarsáttmálin frá 1988**
Tann diplomatiska ráðstevnan í Wien samtykti í 1988 sáttmálan ímóti ólógligum handli við narkotika og psykotropiskum evnum. Amboðið, sum serliga varð nýtt í sáttmálum fyri at ganga ímóti trupulleikunum av ólógligum handli við narkotika og psykotropiskum evnum, var at gera tað truplari hjá gerningsfólkunum at kanalisera vinningin av teirra ólógliga virksemi yvir í vanliga búskapin.

Danmark staðfesi sáttmálan við kongligari resolusjón frá 3. desember 1991, og sáttmálateksturin er almannakunngjørdur sum bekendtgørelse nr. 50 frá 17. juni 1993.

**Aðrir ST- sáttmálar o.a.**
Orsakað av altjóða yvirgangi samtykti ST tann 15. september 1997 sáttmála um niðurberjing av yvirgangsbumbingum, tann 9. desember 1999 ein sáttmála um niðurberjing av fígging av yvirgangi og tann 15. november 2000 sáttmála um niðurberjing av skipaðum brotsverki um landamørk. Sum beinleiðis avleiðing av yvirgangsálopunum 11. september 2001 á New York, Washington D.C. og Pennsylvania samtykti ST harumframt tann 28. september 2001 resolusjón nr. 1373 um niðurberjing av yvirgangi og fígging av yvirgangi.

Hesir sáttmálar eru gjøgnumførdir við broytingum í revsilógini.

**ES-direktivir**
Lógaruppskotið byggir á 4. hvítvaskdirektivið

**Financial Actions Task Force (FATF)**
Orsakað av stúranini um økjandi hóttanina, sum hvítvasking av pengum er móti altjóða bankakervinum og fíggjarligu stovnunum, settu G7-londini (Kanada, Frakland, Italia, Japan, Stórabretland, Vesturtýskland og USA) á fundi 14. – 16. juni 1990 í París eina task force, nevnd Financial Actions Task Force (stytt FATF) á føroyskum Atgerðarbólkurin viðvíkjandi hvítvasking av pengum, sum varð grundfestur í OECD- regi.

FATF hevur í dag 36 limir (undir hesum Føroyar saman við Danmark). ES-nevndin er eisini limur. Endamál FATF´s er í dag at gera standardir ella tilmæli  fyri og at fremja regulatorisk

og operationel tiltøk til at niðurberja hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi og av øðrum hóttanum móti integritetinum hjá altjóða figgjarligu skipanini.

FATF arbeiðir fyri at fáa politiska undirtøku, sum er neyðug fyri nasjonalt at gjøgnumføra ábøtur í lóggávu o.a. á hesum økinum.

Við hesum fyri eyga gjøgnumførir FATF vitjanir hjá einstøku limalondunum fyri at meta um, hvussu tey fylgja tilmælunum frá FATF, og hvussu tey generelt eru fyri viðvíkjandi hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

FATF var á vitjan í Danmark 2. – 18. november 2018, og lat frágreiðing 7. august 2017 um sínar eyðgleiðingar. Frágreiðingar FATF´s eru atkomuligar á heimsíðu FATF´s www.fatf.gafi.org.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Eftir § 57 í uppskotinum verður brot á nærri tilskilaðar ásetingar í uppskotinum revsað við bót.

Við serliga grovum ella umfatandi brotum á nærri tilskilaðar ásetingar í uppskotinum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 6 mánaðir.

Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu vera áløgd revsiábyrgd sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Fyrningarfreistin fyri brot á ásetingarnar í lógini ella reglum, givnar sambært lógini, er 5 ár.

Í reglum, givnar sambært lógini, kann revsing ásetast sum bót fyri brot á reglur, givnar sambært lógini.

Ein fyritøka ella persónur, sum ikki ger eftir boðum, sum eru givin sambært § 51, § 54, stk. 1, ella §§ 60 ella 66, í uppskotinum verður revsað við bót.

Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § 49, stk. 1 og 4, í uppskotinum kann Tryggingareftirlitið sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur, sbr. § 60 í uppskotinum.

Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § 58, stk. 5 og 7, kann Skráseting Føroya sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur, sbr. § 60, stk. 2 í uppksotinum.

## 2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið hevur ikki í sær ásetingar, sum áleggja skattir og avgjøld.

## 2.12. Gjøld

Uppskotið hevur ikki í sær ásetingar, sum áleggja gjøld.

## 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Uppskotið áleggur fyritøkum og persónum, fevnd av lógini upplýsingarskyldur og skrásetingarskyldur.

## 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið gevur landsstýrismanninum at áseta nærri reglur, og leggyr fyristingarligar heimildir til Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.

## 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Eftir § 37 í uppskotinum kann Tryggingareftirlitið til eina og hvørja tíð uttan rættarúrskurð við at vísa hóskandi heimild fáa atgongd til fyritøkur og persónar, fevnd av stk. 1, við tí fyri eyga at innheinta upplýsingar, heruppií við eftitliti á staðnum. Tryggingareftirlitið kann til eina og hvørja tíð, uttan rættarúrskurð, við at vísa hóskandi heimild fáa atgongd til ein veitara ella ein undirveitara við tí fyri eyga at heinta upplýsingar um tað útveitta virksemið. Likamliga atgongdin hjá Tryggingareftirlitinum til hølini hjá veitaranum skal framganga sum eitt krav í tí útveitanarsáttmálanum, sum verður gjørdur millum útveitanarfyritøkuna og veitaran. Um ein útveitanarsáttmáli ikki inniheldur krøv um likamligu atgongdina hjá Tryggingareftirlitinum til fyritøkuna hjá veitaranum, kann Tryggingareftirlitið krevja, at tað útveitta virksemið framyvir antin verður rikið av útveitanarfyritøkuni sjálvari ella verður útveitt til ein annan veitara innan eina av

## 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Í viðmerkingunum til ta einstøku ásetingina verður stutt greitt frá galdandi rætti og høvuðsinnihaldi í uppskotinum til ásetingina.

Galdandi hvítvasklóg á yvirtiknum økjum er hvítvaskløgtingslógin frá 2010.

Í einstøku ásetingunum í hvítvaskløgtingslógini frá 2010 eru við tilvísing til ásetingarnar í hvítvaskfyriskpanini frá 2010, ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini gjørdar nýtiligar upp á fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvaskløgtingslógini frá 2010.

Hvítvaskfyriskipanin frá 2019 setur hvítvaskfyriskipanina frá 2010 úr gildi.

Kortini má metast, at á yvirtiknum økjum kunnu ásetingarnar í hvítvaskfyriskipanini frá 2010 framvegis verða nýttar við tað, at tær ikki staðiliga eru settar úr gildi fyri fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvaskløgtingslógini frá 2010.

**Til § 1**
Galdandi hvítvaskløgtingslóg ásetur nýtsluøki lógarinnar

Í § 1 í uppskotinum verður nýtsluøki lógarinnar ásett, og § 1 reksar upp tær fyritøkur og teir persónar, sum lógin er galdandi fyri. Uppskotið ásetur harumframt í hvørjum førum, landsstýrismaðurin í ... ? kann áseta reglur um, at lógin heilt ella partvíst ikki skal galda fyri spøl.

Nýtsluøki lógarinnar í mun til galdandi lóg verður víðkað til eisini at fevna um distributørar hjá útlendskum fyritøkum og um fyritøkur og persónar, sum bjóða út spøl.

Ásetingin byggir á grein 2 í 4. hvítvaskdirektivi samanhildið við allýsingarnar í grein 3 í 4. hvítvaskdirektivi.

Við fyritøkur og persónar skilst ein og hvør løgfrøðiligur ella likamligur persónur, undir hesum foreiningar, grunnar o.a., í tann mun hesi útinna vinnuligt virksemi. Tað er í útgangsstøði eisini ein fortreyt, at ein fyritøka ella ein persónur hevur beinleiðis samband við meira enn eitt viðskiftafólk. Er viðskiftafólkið partur av fyritøkuleiðsluni ella veruligur eigari, verður tað ikki mett proportionalt, at fyritøkan er undir nýtsluøki lógarinnar.

Ásetingin setur í gildi grein 2 í hvítvaskdirektivinum.

Við fyritøkur og persónar skilst ein og hvør løgfrøðiligur ella likamligur persónur, undir hesum foreiningar, grunnar o.a., í tann mun hesi útinna vinnuligt virksemi. Tað er í útgangsstøði eisini ein fortreyt, at ein fyritøka ella ein persónur hevur beinleiðis samband við fleiri enn eitt

viðskiftafólk. Er viðskiftafólkið partur av fyritøkuleiðsluni ella veruligur eigari, verður tað ikki mett proportionalt, at fyritøkan er undir nýtsluøki lógarinnar.

Stk. 1, nr. 1-5 fevnir um fyritøkur og persónar, sum eru undir eftirliti Tryggingareftirlitsins.

Stk. 1, nr. 6-8 fevnir um fyritøkur og persónar, sum eru undir eftirliti Skráseting Føroya.

Stk. 1, nr. 10 fevnir um tey, sum bjóða út spøl, ið eru undir eftirliti landsstýrismanins.

Fíggjarøkið er ikki yvirtikið, undantikið tryggingarvirksemi og realkreditvirksemi.

Realkredittvirsemið er yvirtikið, og ásetingarnar í donsku hvidvaskloven um realkredittstovnar og realkreditvirksemi eru tí sambært hvítvaskfyriskipanini ikki settar í gildi í Føroyum.

Í stk. 1, nr. 1 verður skotið upp, at realkredittstovnar eins og í galdandi hvítvasklóg skulu vera fevndir av nýtsluøki lógarinnar.

Skotið verður upp í stk. 1, nr. 2 at lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensiónskassar eru fevndir av nýtsluøki lógarinnar. Slík feløg skulu hava loyvi at virka sum tryggingarfelag eftir § 11 í lov om finansiel virksomhed. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Bara lívs- og pensiónstryggingar hjá lívstryggingarfeløgum og tvørgangandi pensiónskassum eru fevndar av lógini. Hóast tað síðani 1995 hevur verið heimild hjá lívstryggingarfeløgum at tekna tryggingar í skaðatryggingarklassunum 1 og 2, t.e. sjúku- og vanlukkutryggingar, er tekning av slíkum tryggingum ikki fevnd av lógaruppskotinum

Við tvørgangandi eftirlønargrunnar skal skiljast feløg ella felagsskapir, sum hesir eru allýstir í § 82 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Slíkar fyritøkur skulu hava loyvi eftir løgtingslóg um tryggingarvirksemi, og verða í høvuðsheitum viðgjørdar eftir somu reglum sum tryggingarfeløg, ið reka lívstryggingarvirksemi.

Skotið verður í stk. 1, nr. 3 upp, at tryggingarmeklarar eru fevndir av nýtsluøki lógarinnar, tá ið teir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Í § 5, stk. 1, nr. 17 í løgtingslógini um tryggingarvirksemi verður tryggingarmeklaravirksemi allýst soleiðis:

“Felag, sum fremur vinnuliga miðlan av tryggingum, sum, ímóti viðurgjaldi, fevnir um tað virksemi at leggja fram, skjóta upp ella fremja byrjunararbeiðið í sambandi við gerð av tryggingaravtalum, ella at gera slíkar avtalur ella at hjálpa til við umsitingini og fulnaðinum av slíkum avtalum, serliga í skaðaføri.”

Tryggingarmeklarar skulu eftir § 42, stk. 2 og § 215, stk. 2 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, sbr. kunngerð um tryggingarmekling, verða skrásettir hjá Tryggingareftirlitinum og eru undir eftirlitið Tryggingareftirlitisins.

Í § 1, stk. 1, nr. 4, verður skotið upp, at fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, eru fevnd av lógini. Við hesum verður tryggja at esini realurin verður fevndur av lógini soleiðis, sum praksis eisini er í dag, sbr. tó stk. 3. Hetta er nýgg áseting.

Skotið verður upp í § 1, stk. 1, nr. 5 upp, at deildir, umboðsfólk og distributørar hjá útlendskum fyritøkum her á landi eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar, um hesi útinna virksemi, ið er fevnt av § 1, stk. 1, nr. 1-4, í uppskotinum. Fyri umboðsfólk og distributørar er tað kortini ein treyt, at virksemið er so mikið stórt í vavi, at útlendska fyritøkan kann verða mett at vera staðsett her í landinum. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Deildir, umboðsfólk og distributørar eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar uttan mun til, um útlendska fyritøkan hevur heimstað í einum ES/EØS-landi ella einum triðjalandi.

Uppskotið hevur við sær, at heimilaðu myndugleikarnir her á landi kunnu rættarsøkja eitt umboðsfólk, eina deild ella ein distributør fyri brot á hvítvaskløgtingslógina. Viðskiftafólk, sum umboðsfólk o.o. hava, verða í hesum sambandi harumframt at meta sum viðskiftafólk hjá viðkomandi í mun til at halda krøv lógarinnar.

Skotið verður upp í § 1, stk. 1, nr. stk. 1, nr. 6, at grannskoðarar og grannskoðarafyritøkur, ið eru góðkend eftir grannskoðaralógini, eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar. Lógaruppskotið hevur við sær, at eisini grannskoðarafyritøkan, sum ein grannskoðari er knýttur at sum starvsfólk ella eigari, er fevnd av lógini. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Skyldurnar eftir hesum lógaruppskoti fevna bara um viðurskifti, sum eru innan fyri karmarnar av teirri uppgávu, sum grannskoðarin hevur átikið sær. Grannskoðaravirksemi fevnir um fleiri ymsar uppgávur til fleiri ymisk viðskiftafólk. Uppgávur, sum kunnu metast at vera kjarnuuppgávur fyri ein grannskoðara, kunnu m.a. fevna um at grannskoða, at veita aðrar váttanir við trygd, bókhald, at fyrireika ársroknskapir og perioderegnskaber, skatta-, vinnufelaga- og íløguráðgeving, uppgávur, har kravið um grannskoðaraváttan er álagt viðskiftafólkinum sambært lóg ella privatari avtalu, uppgávur í sambandi við insolvensviðgerð og ráðgeving um váðastýring, innanhýsis eftirlit, bókhald, roknskaparførslu o.a.

Um ein grannskoðari – í sambandi við at ársroknskapurin hjá eini fyritøku verður grannskoðaður – fær illgruna um, at fyritøkan er uppi í hvítvaski ella fígging av yvirgangi, verður grannskoðarin fevndur av reglunum um kanningar- og fráboðanarskyldu smb. 5. kapitli í lógaruppskotinum.

Ein grannskoðarafyritøka kann hava uppgávur, sum ikki eru grannskoðarauppgávur, og í slíkum førum eru hesar uppgávur uttan fyri nýtsluøki lógarinnar. Dømi um hetta kann eitt nú vera, um HR-deildin hjá grannskoðarafyritøkuni tekur sær av at útvega fólk til leiðslustørv hjá einum viðskiftafólki.

Um ein grannskoðari, við støði í upplýsingum frá einum møguligum viðskiftafólki, velur ikki at átaka sær uppgávuna, er grannskoðarin ikki fevndur av kravinum um kundakunnleikamanngongdir, men fráboðanarskyldan eftir § 25 er galdandi frá teirri løtu, tað møguliga viðskiftafólkið vendir sær til grannskoðaran. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 25, stk. 1, 2. pkt.

Skotið verður upp í § 1, stk. 1, nr. 7, at ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur eru fevndar av uppskotinum. Hugtakið ognarmeklari fevnir um eina og hvørja vinnuliga miðlan av keypi og sølu av fastogn uttan mun til, um hetta er til ella fyri brúkarar ella til ella fyri vinnurekandi. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Lógaruppskotið hevur við sær, at allar uppgávur, sum ognarmeklarar útinna fyri síni viðskiftafólk í sambandi við ognarmeklarastarvið, eru fevndar av lógini, undir hesum eisini tey føri, har ognarmeklarin ásetur virði móti gjaldi ella tekur sær av av miðla leigumál.

Skotið verður upp í stk. 1, nr. 8, at fyritøkur og persónar, sum vinnuliga veita somu veitingar sum tey, ið eru nevnd í nr. 6-7, undir hesum eisini grannskoðarar, ið ikki eru góðkendir eftir grannskoðaralógini, skattaráðgevarar og uttanhýsis bókhaldarar, eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar. Ásetingin er framhald av galdandi lóg.

Hesar fyritøkur og persónar eru tí fevnd í tann mun, fyritøkan ella persónurin ikki annars eru fevnd av stk. 1. Eitt nú grannskoðarar og grannskoðarafyritøkur, ið ikki eru góðkend eftir grannskoðaralógini, skattaráðgevarar, uttanhýsis bókhaldarar og fastognarfyrisitarar eru fevndir av lógini í tann mun, teir vinnuliga útinna sama virksemi sum fastognarmeklarar, undir hesum keyp og søla av fastogn, eins og fastognarmiðlan, ið verður útint av einum advokati, tá hetta virksemið ikki verður útint sum partur av virkinum sum advokatur ella sum partur av virkseminum hjá advokatfelagnum hjá viðkomandi, sbr. viðmerkingar til § 1, stk. 1, nr. 14 og 16. Fyritøkur og persónar, sum vinnuliga miðla leigumál, eru ikki fevnd av nr. 17 uttan mun til, um útleigan hjá einum ognarmeklara er fevnd av stk. 1, nr. 16.

Heitið “vinnuligt” skal skiljast á sama hátt sum nevnt í stk. 1, nr. 8. Við hesum verður gjørt greitt, at einstakar dispositiónir fella uttan fyri heitið. Eisini dispositiónir, sum liggja uttan fyri tað starvið, sum eitt fólk er sett til, t.d. um eitt reingerðarfólk ella ein heimahjálp rindar rokningar, fella uttan fyri heitið. Tá talan er um heitið “somu veitingar” verður víst til tær veitingar, sum hava við sær, at persónsbólkarnir í stk. 1, nr. 14-16 eru fevndir av nýtsluøki lógarinnar.

Skotið verður upp í stk. 1, nr. 9, at tey, sum bjóða fyritøkum tænastur, eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar. Tey, sum bjóða fyritøkum tænastur, eru allýst í § 2, nr. 12 í lógaruppskotinum. Víst verður til viðmerkingarnar til hesa áseting. Tey, sum bjóða fyritøkum tænastur, hava skyldu til at lata seg skráseta hjá Skráseting Føroya sum treyt fyri at kunna reka hetta virksemið, sbr. § 45, stk. 1 í lógaruppskotinum. Í mun til ítøkiligu reglurnar um skráseting verður víst til § 45 og viðmerkingarnar til somu grein.

Tað er eisini her eitt krav, at nevndu tænastuveitingar verða bodnar út vinnuliga. Tað hevur við sær, at veitingarnar verða bodnar út eftir marknaðarlíknandi treytum, og at fyritøkan vanliga fær viðurgjald sum mótveiting fyri nevndu tænastuveiting. Tað er ikki avgerandi, um tænastuveitingin gevur yvirskot, ella um tað í tí ítøkiliga førinum ikki verður goldið viðurgjald. Einstøk útboð av nevndu tænastuveitingum, ið ikki kunnu metast at vera vinnulig, eru ikki fevnd.

Skotið verður upp í stk. 1, nr. 10, at tey, sum bjóða út spøl, eru fevnd av nýtsluøki lógarinnar.

Við hesum verður lógin í samsvari við grein 2, stk. 1, litra f í 4. hvítvaskdirektivinum.

Ásetingin er nýggj.

Útbjóðing av spølum viðvíkjand hvítvasking og fígging av yvirgangi er ikki fevnt av galdandi hvítvaskløgtingslóg og serlóggávuni, sum annars løgskipar útbjóðing av spølum, m.a. løgtingslóg um eydnuspæl v.m., løgtingslóg um ítróttavedding, løgtingslóg um kringvarp, løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m..

Í løgtingslóg um ítróttavedding er ásett, at Sp/f Ítróttavedding kann gera avtalu við veddingar- og eydnuspælsfelag, ið er góðkent av tí danska spælimyndugleikanum, ella av spælimyndugleikanum í einum av hinum Norðurlondunum, um at spøl hjá hesum felagnum verða boðin út í Føroyum. Eisini er ásett, at tá Sp/f Ítróttavedding ger slíka avtalu, er spælið fevnt av lóggávuni í tí landi, har felagið er góðkent.

Sostatt verður mett, at slíkar fyritøkur og persónar, sum hava góðkenning frá danska spælimyndugleikanum, ella frá spælimyndugleikanum í einum av hinum Norðurlondunum, og og sum bjóða spøl út í Føroyum eftir avtalu við Sp/f Ítróttavedding sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, eru fevnd av hvítvasklóggávuni í viðkomandi landi og undir eftirliti har.

Í Danmark bleiv spæliøkið liberalisera í 1990. Av tí, at økið ikki er liberaliserað í Føroyum, eru spøl í vinnuligum høpi forboðin, um tað ikki er serlig lógarhimild fyri teimum, sbr. § 203 í revsilógini.

Kortini verður skotið upp, at spæliøkið verður tikið við í uppskotið, men sasmstundis verður ásett í § 1, stk. 4, í uppskotinum, at Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at lógin heilt ella partvíst ikki skal verða nýtt upp á spøl, har mett verður at vera ein avmarkaður váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Skotið verður upp í stk. 2, at § 5 verður galdandi fyri vinnurekandi, sum ikki eru fevnd av stk. 1. § 5 í lógaruppskotinum ásetur bann fyri, at vinnurekandi taka ímóti 50.000 kr. ella meira í reiðum peningi. Vinnurekandi í hesum høpi eru persónar, fyritøkur ella grunnar, sum reka eina fyritøku. Uppskotið hevur við sær, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av § 1, stk. 1, ikki eru fevnd av forboðnum fyri at taka ímóti reiðum peningi.

**Til § 2**
Í § 3 hvítvaskløgingslógini frá 2010, sbr. § 3 í hvítvaskfyriskipanini eru allýsingar.

Ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 2 í hvítvasfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingarnar til § 2 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 3**
Galdandi hvítvaskløgtingslóg inniheldur í § 6 áseting um allýsing av hvítvaski, og ásetur, at hvítvask skal skiljast, sum hvítvask er allýst í § 4 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Tað er ikki ætlaninvið uppskotinum at broyta galdandi rættarstøðu, men bert at gera eina minni broyting fyri at gera greiðari, at skattaundandráttur er fevnt av hvítvaskhugtakinum, og fyri at fyritøkur og persónar skulu hava størri fokus á hetta.

Víst verður til pkt. 1.5.2. í almennu viðmerkingunum

Ásetingin í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 3 í hvítvasfyriskipanini, skal skiljast á á sama hátt, og verður víst til viðmerkingarnar til § 3 í 2016/1 LSF 41 Forslag, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 4**
Fígging av yvirgangi verður allýst í § 7 í galdandi lóg við tilvísing til § 7, stk. 1 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Av § 4 í uppskotinum gongur fram, at við fígging av yvirgangi skilst í hesi lóg fígging av yvirgangi sum allýst í revislógarinnar § 114 b, tá tað snýr seg um gerðir, umfataðar av § 114 í revsilógini.

Víst verður til pkt. 1.5.2. í almennu viðmerkingunum

Tilvísingin til § 114 b í revsilógini er tilvísing til ásetingina, sum hon er orðað við “Anordning nr. 1139 af 4. december 2009 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af straffeloven.”

Ásetingin í § 4 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 4 í hvítvasfyriskipanini, skal skiljast á á sama hátt, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 4 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1.

**Til § 5**
Í § 2 í galdandi hvítvasløgtingslóg er ásett, at tað er forboðið handlandi og uppboðssølufólki at taka ímóti upphæddum í reiðum peningi áljóðandi kr. 100.000 ella meira, annaðhvørt goldið verður í einum ella fleiri gjøldum, ið sýnast at vera innanhýsis samanhangandi.

Skotið verður upp, at vinnurekandi, sum ikki eru fevnd av § 1, stk. 1 í uppskotinum, mugu ikki móttaka kontantgjaldingar á 50.000 kr. ella meira, uttan mun til um gjaldingin verður gjørd í einum ella sum fleiri gjaldingar, sum eru ella sýnast at verða sínámillum tengdar.

Eftir uppskotinum verður nýtsluøkið í mun til galdandi lóg víðkað viðvíkjandi kontanforboðnum frá at fevna um handlandi og uppboðssølufólk til at fevna um øll vinnurekandi undantikið vinnurekandi, sum eru fevnd av § 1, stk. 1 í lógaruppskotinum.

Harumframt verður skotið upp, at markið fyri, hvussu stórari kontantupphædd takast kann ímóti, verður at lækkað - úr 100.000 kr. niður í 50.000 kr.

Víst verður til pkt. 1.5.3. í almennu viðmerkingunum

**Til § 6**
Í § 3 og § 14 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 25 í hvítvasfyriskipanini frá 2010, inniheldur krav um gerð av neyðugum innanhýsis skrivligum reglum um váðameting, umframt at ávísar fyritøkur og persónar skulu tilnevna ein persón á leiðslustigi, sum skal tryggja, at fyritøkan ella persónurin heldur lógina.

Skotið verður upp í stk. 1, at fyritøkur og persónar, fevnd av uppskotinum, skulu eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan ella persónurin kunnu verða misbrúkt til hvítvask ella fígging av yvirgangi. Váðametingin skal gerast við støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum og skal fevna um metingina av vágafaktorum, sum eru knýttir at kundum, vørum, tænastum og transakjónum umframt veitingarkanalir og lond ella landafrøðilig øki, har handilsvirksemi er. Váðametingin skal skjalprógvast og støðugt dagførast.

Eisini verður skotið upp í stk. 2, at dagliga leiðslan í fyritøkum, fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-4, skulu tilnevna eitt starvsfólk, sum hevur fulltrú at taka avgerðir vegna fyritøkuna sambært § 7, stk. 2, § 17, stk. 3, og § 18, stk. 1, nr. 3. Tilnevnda starvsfólki hevur um uppgávu, at taka avgerðir sambært § 7, stk. 2, um góðkenning av skrivligum politikkum, § 17, stk. 3, um stovan og framhald av handilssambandi við politiskt ábæran persón o.a. og § 18, stk. 1, nr. 3, um gókenning av stovnan av korrespondentbanka sambandi um landamark. Persónurin kann vera limur í dagligu leiðsluni hjá fyritøkuni. Viðkomandi skal hava nøktandi kunnleika til váðan fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi hjá fyritøkuni til at kunna taka avgerðir, sum kunnu ávirka váðaeksponeringina hjá fyritøkuni. Hann skal harumframt hava nøktandi vanligt umdømi, og skal ikki hava havt ein atburð, sum kann geva grund at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt.

Landsstýrismaðurin kann eftir stk. 3 í uppskotinum áseta reglur um undantøk frá krøvunum í stk. 1 og stk. 2.

Víst til pkt. 1.5.1.1. og 1.5.1.2. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 7 í hvítvasfyrskipanini frá 2019, skal skiljast á sama hátt, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 7 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 7**

Av § 3 og § 14 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. í § 25 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, ásetur krav um nøktandi skrivligar innanhýsis reglur, innanhýsis útbúgvingar- og vegleiðingarætlan umframt at fyritøkur og persónar skulu síggja til, at starvsfólk teirra eru kunnað um tær skyldur sum ganga fram av lógini.

Uppskotið til § 7 snýr seg um krøv til nøktandi skrivligar politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir, sum skulu umfata váðastýring, kundakunnleika- mannagongdir, kanningar-, uppskrivingar- og kunningarskyldu, varðveitsla av upplýsingum, yvirlitskanning/(screening) av starvsfólki og innanhýsis eftirlit til fullgóða fyribyrging, avmarking og stýring av váðum fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi. Politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir skulu gerast við støði í váðametingini gjørd eftir § 6 í uppskotinu við atliti til støddina av fyritøkuni.

§ 7 í uppskotinum ásetur harafturat, at politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir, sum eru gjørdar sambært ásetingina í stk. 1 í uppskotinum, skulu góðkennast av tí í § 6, stk. 2 í uppskotinum, tilnevnda persóni, umframt, at dagliga leiðslan í fyritøkum fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-3 í uppskotinum, og sum sambært aðrari lóggávu hava skyldu at hava eina compliancefunktion, skulu tilnevna ein complianceábyrgdara. Hevur ein fyritøka eina innanhýsis grannskoðan, skal hendan harumframt tryggja, at fyritøkan heldur gjørdar

politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir. Skotið verður eisini upp, at fyritøkur, har tað verður mett at vera viðkomandi, skulu tilnevna ein lim í leiðsluni, sum hevur ábyrgdina av at fyritøkan fremur krøvini í hesi lóg. Loksins verður skotið upp, at fyritøkurnar skulu tryggja at starvsfólk, undir hesum leiðslan, hava fingið nóg góða undirvísing í krøvunum í hesi lóg umframt um viðkomandi krøv um dataverju.

Ásetingin er framhald av krøvunum í hvítvaskløtingslógini frá 2010, sbr. § 25 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, um skrivligar innanhýsis reglar, sum spegla krøvini í 4. hvítvaskdirektivinum.

Sum nýtt krav verður skotið upp, at tað skulu gerast politikkir. Harumframt verður kravið um "skrivligar innahýsis reglur" avloyst av kravið um mannagongdir. Hetta er redaksjonel broyting. Krøvini í uppskotinum um screeningsmannagongdir, compliancefunksjón og óhefta grannskoðararfunksjón eru nýggj krøv. Loksins verður sum nýtt krav sett krav um undirvísing í dátuvernd.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 8 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin og verður víst til viðmerkingingarnar til § 8 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 8**

Av uppskotinum til § 8 gongur fram, at samtøkur umframt krøvini í § 7 skulu hava nøktandi skrivligar politikkir fyri dátuverju umframt nøktandi skrivligar politikkir og mannagongdir fyri at skifta um upplýsingar, sum verða umskiftar við tí endamáli at stríðast móti hvítvasking av peningi.og fígging av yvirgangi, innan fyri samtakið.

Harumframt verður skotið upp, at fyritøkur, sum eru partar av einum samtaki, skulu umframt krøvini í § 7 virka í samsvari við politikkir og mannagongdir hjá samtakinum.

Uppskotið til ásetingina í § 8 er nýggj samanborið við galdandi lóg.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 9 í donsku hvítvaskfyriskipanini, og skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 9 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 9**

Í § 3 og §§ 9-13 í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. §§ 11, 12, stk. 1, hvítvaskfyriskipanini frá 2010 , innheldur krav um, nær fyritøkur og persónar skulu løgvátta ein kunda.

Uppskotið til § 10 ásetur, nær fyritøkur og persónar skulu gjøgnummføra kundakunnleikamannagongdir. Í uppskotinum er hugatakið samleikamannagongdir í galdandi lóg avloyst av kundakunnleikamannagongdum.

Eftir uppskotinum heldur tað fram, at kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast, tá tá eitt kundasamband verður stovnað, tá tað verður gjørd ein einstøk transaksjón sum ein peningaflyting upp á meiri enn 1.000 evrur, tá tað er illgruni er um hvítvaski ella fígging av yvirgangi, uttan mun til um treytirnar í nr. 2 og 3 ikki eru loknar, ella ivi er um, um upplýsingar, sum fyrr eru fingnir til vega, um samleikan hjá kundanum eru rættir ella nøktandi.

Sum nýggja áseting verður skotið upp krav um, at kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast, tá týðandi umstøður broytast hjá einum kunda, og annars hóskandi tíðir og í sambandi við útbjóðing av spæli, tá tað verður tikið ímóti innskotum, goldið út vinningar ella bæði upp á í minsta lagi 2.000 evrur, annaðhvørt transakjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaksjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar.

Sum nýggja áseting verður skotið upp, at fyri aðrar einstakar transaksjónir enn peningaflytingar skulu kundakunnleikamannagongdir gjøgnumførast við transaksjónir upp á í minsta lagi 15.000 evrur, annaðhvørt transakjónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaksjónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar.

Tað er eitt grundleggjandi krav í lógaruppskotinum, at fyritøkan skal hava kunnleika tíl sínar kundar. § 9 í uppskotinum inniheldur ásetingar um, nær fyritøkan ella persónurin skal gjøgnumføra kundakunnleikamannagongdir. Innihaldið í kundakunnleikamannagongdunum er nærri lýst í §§ 10-11 í uppskotinum.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 10 í donsku hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 10 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 10**
Í § 3 og §§ 9-13 í hvítvaskløgtingslógini, sbr. 12 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, ásetur krøvini til mannagongd viðvíkjandi løgváttan av kundum.

Av § 3 og §§ 9-13 í hvítvaskløgtingslógin, sbr. 14, stk. 1, 2. pkt. og § 15 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, gongur fram at tað kann sleppst undan at fáa greiði á eigara- og ræðisviðurskiftunum hjá einum kunda eftir eini váðmeting umframt løgváttan av veruligum eigarum, um transaksjónin ikki er omanfyri 15.000 evrur, og ásetingarnar innihaalda eisini ásetingar um persónar, sum handla vegna ein annan persón ella fyritøku.

Uppskotið til § 10 ásetur tey vanligu krøvini til kundakunnleikamannagongdina. Eftir uppskotinum er kundakunnleikamannagongdir ein áhaldandi skylda og ikki bert, tá kundasambandið verður stovnað. Tað verður nágreinað í hesum viðmerkingunum til ásetingina, at kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast út frá eini váðameting.

Í uppskotinum til § 10 verður ásett, at fyritøkur og persónar skulu innheinta kundans samleikaupplýsingar. Er kundin ein fysiskur persónur, skal kundans navn og p-tal ella líknandi innheintast. Er kundin ein løgfrøðiligur persónur, skal innheintast navn og v-tal. Hevur kundin ikki eitt p-tal, skal samleikaupplýsingar fevna um føðingardag. Harumframt eru upplýsingar um adressu ein partur av samleikaupplýsingunum.

Í § 10 verður eisini ásett, at tað skulu innheintast samleikaupplýsingar um tann ella teir veruligu eigararnar, og at tað skulu fremjast hóskandi tiltøk fyri at kanna samleikan hjá tí ella teimum veruligu eigarunum so at fyritøkan ella persónurin við vissu veit, hvør tann ella teir veruligu eigararnir eru. Er kundin ein løgfrøðiligur persónur, skulu undir hesum fremjast hóskandi tiltøk fyri at fáa greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum hjá løgfrøðiliga persóninum.

Í uppskotinum til § 10 verður eisini ásett, at samleikaupplýsingarnar hjá kundanum skulu kannast við støði í skjølum, dáta ella upplýsingum útvegaði frá álítandi og óheftari keldu.

Skotið verður upp, at tað skal gerast ein meting av kundanum soleiðis, at tað skulu innheintast upplýsingar frá kundanum, har tað er viðkomandi, um endamálið hjá kundanum við kundasambandinum,

Eftir uppskotinum skal støðugt ansast eftir kundaviðurskiftunum, sbr. §10, stk. 5, nr. 5.

Harumframt verður ásett í § 10, at um ein persónur upplýsir at hann handlar vegna ein kunda, ella tað annars er ivi um ein persónur handlar vegna seg sjálvan, skulu fyritøkur og persónar harumframt eyðmerkja persónin, og samleikin hjá viðkomandi skal kannast hjá álítandi og óheftari keldu. Fyritøkur og persónar skulu harumframt tryggja, at likamligir ella løgfrøðiligir persónar, sum handla vegna ein kunda, hava heimild til tess, tó ikki um viðkomandi er advokatur við tilnevning her í landinum ella í einum ES- ella EBS-landi, sbr. § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven).

Eisini verður ásett, at fyritøkur og persónar skulu fremja allar kundakunnleikamannagongdir, men at vavið av kundakunnleikamannagongdunum kann tó fremjast út frá eini váðameting. Í metingini skulu upplýsingar takast við um endamál, stødd, reglusemi og gildistíð hjá handilssambandinum. Í metingini skulu í minsta lagi takast við teir tættir, sum standa í skjali 1 og 2.

Fyritøkan ella persónurin skulu kunna prógva mótvegis tí myndugleika, sum hevur eftirlit við hesi lóg, at kunnleikin til kundan er nøktandi í mun til vandan fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 10 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 11 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 11 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 11**
Eftir § 11 í uppskotinum skulu fyritøkur, sum bjóða út lívs- og pensiónstryggingar, afturat krøvunum í § 10 útvega upplýsingar um navn á njótanartilskilaðum sambært tryggingarskjalinum.

Skotið verður upp, at yritøkur, sum bjóða út lívs- og pensiónstryggingar, afturat krøvunum í § 10 skulu útvega upplýsingar um navn á njótanartilskilaða sambært tryggingarskjalinum. Er

talan um ein ónevndan persón ella eina fleirheild av persónum, skulu nøktandi upplýsingar útvegast til at kunna eyðmerkja tann ella teir njótanartilskilaðu útgjaldingardagin.

Samleikaupplýsingar hjá tí ella teimum tilskilaðu skulu kannast við støði í skjølum, data ella upplýsingum, fingnir til vega frá álítandi og óheftari keldu, áðrenn útgjalding fer fram sambært tryggingarskjalinum.

Er talan um ein ónevndan persón ella eina fleirheild av persónum, skulu nøktandi upplýsingar útvegast til at kunna eyðmerkja tann ella teir njótanartilskilaðu útgjaldingardagin.

Uppskotið til áseting í § 11 er nýggj áseting samborið við galdandi lóg.

Samsvarandi ásetingin í § 12 í donsku hvítvasklógini er ikki sett í gildi í Føroyum við hvítvaskfyriskipanini við tað, at lívs- og pensiónstryggingarøkið er yvirtikið, men ásetingin í § 11 í uppskotinum er orðað einsljóðandi við § 12 í donsku hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 12 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1.

**Til § 12**
§ 3 í í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 14 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur undatøk frá kundakunnleikamanngongdini.

Uppskotið til § 12 snýr seg um nær tað út frá eini váðameting kann víkjast frá kundakunnleikamannagongdunum í § 10, tá hjálp verður veitt kundum við einstøkum virksemi.

Skotið verður upp, at við hjálp til kundar við einstøkum virksemi, sum ikki fevnir um eina flyting, kann út frá eini váðameting víkjast frá krøvunum í § 10.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 12 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 13 í hvítvasfyriskipanini, og skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 13 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1.

**Til § 13**
Í § 3 hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 13 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, snýr seg um, nær mannagongdin viðvíkjandi løgváttan av kundum skal verða fullførd.

Uppskotið til § 13 snýr seg um, nær kundakunnleikamannagongdirnar skulu gjøgnumførast.

Skotið verður upp í ásetingini, at fyritøkur og persónar skulu kanna samleikaupplýsingar hjá kundanum og tí ella teimum veruligu eigarunum, áðrenn eitt handilssamband við kundan verður stovnað ella ein transaksjón verður framd.

Kanningin av samleikaupplýsingunum hjá kundanum og tí ella teimum veruligu eigarunum kann tó gerast seinni vandin fyri hvítvasking av pengum ella fígging av yvirgangi er avmarkaður. Kanningin av samleikaupplýsingum skal í slíkum førum gerast skjótast gjørligt

eftir fyrsta sambandi. Tað kann esini stovnast konto, depot ella líknandi, treytað av, at hóskandi trygdartiltøk eru sett í verk.

Tað fylgir harumframt av § 13, stk. 5, at kunnu krøvini um kundakunnleikamannagongdirnar ikki gjøgnumførast, skal eitt stovnsett handilssamband vera slitið ella gerast upp, og fleiri flytingar mugu ikki gerast. Samstundis skal kannast, um fráboðan til SØIK eftir § 25 skal gerast.

Skotið verður skotið upp, at persónar og fyritøkur, sum eru nevnd § 1, stk. 1, nr. 6 -8 , eru, tá tey hjálpa einum advokati í teimum førum, sum nevnd í § 14, stk. 6,  pkt. 1, í hvítvasfyrispinini frá 2019, undantikin frá kravinum í stk. 5 um at slíta handilssambandi á sama hátt sum tann advokatur, tey hjálpa.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 13 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 14 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingarnar til § 14 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1.

**Til § 14**
Eftir uppskotinum til § 14 skulu fyritøkur ella persónar, um teir fáa kunnleika til, at tær upplýsingar, sum eru fingnar til vega, ikki eru nøktandi og ikki kunnu dagførast, skal fyritøkan ella persónurin seta hóskandi tiltøk í verk fyri fyribyrgja váða fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, undir hesum at umhugsa at slíta handilssambandið ella at tað verður niðurlagað, sbr. § 13, stk. 5.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 14 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 15 í hvítvaskfyriskipnini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingarnar til § 15 í 2016/1 LSF  sbr. fylgiskjal 1 til uppskototið.

**Til § 15**
Eftir § 15 í uppskotinum skulu fyritøkur og persónar áðrenn stovnan av einum handilssambandi ella gjøgnumførslu av eini einstakari transakjón fyri likamligar persónar, kunna kundan um tær reglur, sum galda fyri viðgerð av persónsupplýsingum, við atliti at váðanum fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Tað framgongur harumframt av uppskotinum, at persónsupplýsingar, sum eru fingnar til vega sambært hesi lóg ella reglum, kunngjørdar sambært henni, bert mugu viðgerast við atliti at fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Viðgerð av hesum persónsupplýsingum til onnur endamál, undir hesum handilslig endamál, má ikki fara fram.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 15 í uppskotinum er orðað einsljóðandi við § 16 í donsku hvítvasfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 16 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 í uppskotinum.

**Til § 16**
§ 3 í í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 19, stk. 1, 2 og 7, í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur herd krøv til løgváttan av kundum í førum, sum hava við sær øktan váða fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Galdandi lóg inniheldur eina serliga eftiransingarskyldu mótvegis transaksjónum, sum hava samband við lond, har tað sambært FATF verður mett at vera ein serlgur váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Uppskotið til § 16 ásetur, at fyritøkur og persónar umframt krøvini í § 10 og 11 skulu gjøgnumføra herdar kundakunnleikamannagongdir, har mett verður at vandin fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi er øktur. Fyritøkan ella persónurin skulu hava við í metingini teir hávágafaktorar, sum standa í skjali 2 til lógaruppskotið, og aðrar hávágafaktorar, sum mugu metast at hava týdning.

Í uppskotinum til § 16 verður harumframt ásett, at fyritøkur og persónar skulu gera herdar kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum stendur á yvirlitinum hjá Europa-kommissiónini yvir lond, har mett verður, at øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Við støði í eini váðameting kann kravið tó verða slept fyri eina deild ella eitt dótturfelag, sum ein løgfrøðiligur persónur eigur meirilutan í, har løgfrøðiligi persónurin er stovnsettur í einum ES- ella EBS-landi og skal lúka krøv, sum fylgja av 4. hvítvasdirektivinum, og deildin ella dótturfelagið, sum løgfrøðiligi persónurin eigur meirilutan í, halda politikkir og mannagongdir hjá samtakinum.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 16 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 17 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 17 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1.

**Til § 17**
§ 3 í í hvítvaskløgtingslógini frá 2010, sbr. § 19, stk. 4, í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur herd krøv viðvíkjandi kundum, sum eru politiskt ábærar persónar.

Uppskotið til § 17 snýr seg um tiltøk í mun til politiskt ábærar persónar.

Krøvini í uppskotinum til ásetingina svara til galdandi krøv. Við uppskotinum verða harumframt krøvini til kundakunnleikamannagongdir víðkað viðvíkjandi politiskt ábærum persónum við tað, at skotið verður upp at seta herd krøv viðvíkjandi veruligum eigarum av løgfrøðiligum persónum, tilskilaðum sambært lívstryggingarpolisum umframt veruligum eigarum av tilskilaðum, sum eru politiskt ábærir persónar.

Víst verður til pkt. 1.5.4. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 17 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 18 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 18 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 18**

§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 19, stk. 3, í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur herd krøv til viðgerð av korrespondentbankasambondum um landamørk.

Uppskotið til § 18 snýr seg um herd kundakunnleikakrøv í mun til korrespondentsambond um landamørk, sum hevur við sær, at fyritøkur, fevndar av § 1, stk. .

Ásetingin til § 18 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 19 í hvítvaskfyriskipanin, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 19 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 19**
Uppskotið til § 19 hevur við sær eitt forboð móti at hava beinleiðis ella óbeinleiðis samband við eina fíggjarliga fyritøku, sum ikki er til staðar í tí landinum, har hon er skrásett, eisini nevnt eitt tómt bankafelag. Nýtsluøki ásetingarinnar verður víðkað til at fevna um allar fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av § 1, stk. 1. nr. 1- 5. Víst verður til allýsingina í § 2, nr. 11 av tómum bankafelag.

Eftir uppskotinum verður sum nýggj regla í stk. 2, ásett, at fyritøkur og persónar, fevnd av lógini, skulu fremja hóskandi tiltøk fyri at sleppa undan at stovna korrespondentsambond við fyritøkur, har alment atkomuligar upplýsingar eru um, at respondentsambandið letur tóm bankafeløg brúka kontur hjá respondentsambandinum.

Ásetingin í § 19 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 20 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 20 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 20**
Ásetingin í § 20 snýr seg um møguleika hjá fyritøkum og perónum at gjøgnumføra linari krøv til kundakunnleika í teimum førum, har mett verður at váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er avmarkaður.

Víst verður til pkt. 1.5.5.2. í almennu viðmerkingunum.

Ásetingin í § 20 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 21 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 21 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1til uppskotið.

**Til § 21**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 17 í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur møguleika at fáa hjálp frá triðjamanni.

Uppskotið til § 21 snýr seg um møguleikan at fáa hjálp frá triðjamanni. Við uppskotinum halda galdandi ásetingar fram við innihalsligum broytingum.

Víst verður til pkt. 1.5.6.2. í almennu viðmerkingunum

Ásetingin í § 21 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 22 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 22 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 22**
Eftir § 22 í uppskotinum kunnu fyritøkur, fevndar av uppskotinumg, sum eru partar av einum samtaki, lata tað yvir til eina aðra fyritøku í samtakinum at lúka krøvini í § 10, stk. 1, nr. 1-4, í uppskotinum, um samtakið nýtir kundakunnleikamannagongdir, reglur um varðveitslu av upplýsingum og ætlanir til at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi, sum svara til tey krøv, sum fylgja av 4. hvítvasdirektivinum. Ásetingin er nýggj, og hevur til endamáls at tryggja, at kundakunnleikamannagongdir ikki hava við sæt óneyðugar seinkingar.

Ásetingin í § 22 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 23 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 23 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 23**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 18 í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur ásetingar um útveiting

§ 23 í uppskotinum snýr seg um at nýta útveiting til at lúka krøv eftir lógini, og er framhald av galdandi reglum uttan innihaldsligar broytingar, tó verður lagt aftrat í uppksotinum, at skyldan at tilnevnda ein persón við fulltrú, sbr. § 6, stk. 2, í uppskotinum, ikki kann útveitast.

Ásetingin í § 23 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 24 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 24 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 24**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 6, stk. 2 og § 7, í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur ásetingar um noteringsskyldu ávikavist kanningarskyldu.

Uppskotið til § 24 snýr seg um kanningar-, og noteringsskyldu. Í ásetingini verður kannaingarskyldan orðað av nýggjum.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, skulu kanna bakgrundina fyri og endamálið við øllum torgreiddum og óvanliga stórum transakssjónum umframt øllum óvanligum transakjónsrmynstrum og virksemi, sum ikki hava eitt greitt fíggjarligt ella ávísiligt lógligt endamál, fyri at staðfesta, um illgruni er um ella rímilig orsøk at halda, at hesi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Fyritøkur og persónar skulu, har tað hevur týdning, víðka yvirvøkunaav kundanum við tí endamáli at staðfesta, um transajónirnar ella virksemið sýnast illgrunasom.

Úrslitini av eini kanning skulu noterast og varðveitast, sbr. § 29.

Sum nýggja áseting verður skotið upp, at ein skrásettur persónur hevur ikki rætt til innlit í persónsupplýsingar, sum viðvíkja viðkomandi sjálvum, sum eru ella fara at verða viðgjørdar eftir § 24.

Ásetingin í § 24 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 24 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 24 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 25**

§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 7, í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur krav um fráboðanarskyldu.

Uppskotið til § 25 snýr seg um skyldina hjá fyritøkum at fráboða Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk at halda, at ein transaksjón, figgjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Sama er galdandi um illgruna, sum er íkomin í sambandi við at kundin hevur roynt at gera eina transakjón ella eina áheitan frá einum møguligum kunda, við ynski um at gjøgnumføra eina transakjón ella virksemi.

Uppskotið er framhald av galdandi reglum, men innihaldið verður nágreinað.

Ásetingin í § 25 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 26 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 26 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til  uppskotið.

**Til § 26**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 7, í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur undantøk frá fráboðanarskylduni.

Uppskotið til § 26 snýr seg um undantøk frá fráboðanarskylduni, og er við redaktionellum broytingum framhalda av § 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 7, í hvítvaskfyrispnini frá 2010.

Undantøk fyri advokatar eru ásett í § 27, stk. 1, í hvítvaskfyriskipanini. Og er tí ikki við í hesum uppskotinum. Undantøk fyri grannskoðarar o.a. er ikki við í hvítvasfyriskipanini, tí málsøkið er yvirtikið. Undantøk fyri grannskoðarar o.a. eru tí við í hesum uppskotinum.

Ásetingin í § 26 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 27 í donsku hvítvasklógini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 27 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til  uppskotið.

**Til § 27**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 9 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur krav til myndugleikarnar um fráboðan.

Uppskotið til § 27 snýr seg fráboðanarskylduna hjá myndugleikum.

Uppskotið er framhald av § 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 9 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010.

Ásetingin í § 27 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 28 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 28 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til  uppskotið.

**Til § 28**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 23 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur krav um varðveitslu av  til myndugleikarnar um fráboðan.

Uppskotið til § 28 viðvíkur krøvum um varðveitslu av upplýsingum. Ásetingin er framhald av § 3 í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 9 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, við innihaldsligum broytingum

Í mun til galdandi lóg verður sett krav um, at avrit av vístum samleikaskjølum skulu varðveitast, har samleikaskjøl eftir galdandi reglum kunnu varðveitast. Harumframt verður sett krav um, at allir upplýsingar, fingnar til vega í sambandi við at lúka krøvini í kapitli 3, skulu varðveitast í minst 5 ár eftir at handilssambandið er hildið uppat ella einstaka transaksjónin er framd. Eftir galdandi lóg er tað bert samleika og kontrolupplýsingar, sum skulu varðveitast

Persónsupplýsingar skulu strikast 5 ár eftir, at handilssambandið er hildið uppat ella einstaka transaksjónin er framd, um ikki annað er ásett í aðrari lóggávu. Hetta er nýggj áseting samanborið við galdandi lóg.

Ásetingin í § 27 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 30 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt sum tann ásetingin, og verður víst til viðmerkingingarnar til § 30 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 29**
§ 3, í hvítvaskløgtingslógini, sbr. § 24 í hvítvaskfyrispnini frá 2010, inniheldur krøv til fyritøkur, sum hava deildir í londum uttan fyri ES/EBS.

Uppskotið til § 29 viðvíkir fyritøkum, sum reka virksemi í øðrum londum. Í uppskotinum er nýggj áseting um, at fyritøkur, sum reka virksemi í einum ES/EBS landi, skulu tryggja, at stovnaða fyritøkan heldur tær nationalu ásetingarnar í viðkomandi landi um hvítvask og fígging av yvirgangi. Tey serligu krøvini til fyritøkur, sum hava deildir og dótturfeløg í londum uttanfyri ES/EBS, halda fram, tó soleiðis, at lagt verður afturat krav um, at tað skal tryggjast, at deildin ella dótturfelagið í landi uttan fyri ES/EBS heldur krøv um dátuvernd.

Ásetingin í § 29 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 31 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 31 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 30**
Uppskotið til § 30 snýr seg um fyritøkur í einum samtaki skulu skifta um upplýsingar við aðrar fyritøkur í samtakinum um, at illgruni er um at peningur er vinningur frá eini brotsgerð ella fyri at vera tengt at fígging av yvirgangi, og har fráboðan eftir § 25, stk. 1 ella 2. Fyritøkur í einum samtaki mugu ikki skifta um persónsupplýsingar sambært 1. pkt. uttan tað sum er neyðugt fyri at lúka kravið. Ásetingin er nýggj.

Ásetingin í § 29 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 32 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 31 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 31**
Skotið verður upp, at Tryggingareftirlitið kann áseta reglur um tiltøk í mun til lond og landøki fyri at lúka krøv ella tilráðing frá Financial Action Task Force.

Ásetingin í § 31 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 34 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 34 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 32**

Ásetingin í § 32 í uppskotinum snýr seg seg um krav um whistleblower-mannagongdir. Ásetingin er nýggj. Fyri fíggjarligar fyritøkur undir eftirliti av danska Finanstilsynet, m.a. bankar, er ein samsvarandi áseting í § 75 a í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed og fyri fíggjarligar fyritøkur undir eftirliti av tryggingareftirlitinum, m.a. lívstryggingarfeløg, verður samsvarandi áseting sett í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 6- 10, skulu hava eina skipan, har starvsfólk gjøgnum eina serliga óhefta og sjálvstøðuga rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hesa lóg og reglur, givnar sambært henni. Fráboðan til skipanina skulu kunna gerast ónavngivið.

Ásetingin í § 32 í uppskotinum er orðað einsljóðandi við § 35 í hvítvaskfyriskipanini frá 2019, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 35 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 33**

Uppskotið til § 33 ásetur krav um, at fyritøkur og persónar, fevnd av nr. 6-10, mugu ikki koma einum starvsfólki undir ólagaliga viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum, av tí at starvsfólkið hevur fráboðað brot ella møguligt brot hjá fyritøkuni ella persóninum á hesa lóg og reglur, givnar sambært lógini, til ein eftirlitsmyndugleika ella til eina skipan í fyritøkuni.

Ásetingin í § 33 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 36 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 36 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 34**

Tað fylgir av § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, sbr. § 26 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, at fráboðanir og upplýsingar, sum fyritøkur og persónar, fevnd av hesi lóg, lata SØIK í góðari trúgv sambært § 25, stk. 1 og 2, og støðgan av transaksjónum sambært § 25, stk. 3 og 4, hava ikki við sær nakra ábyrgd fyri fyritøkuna ella persónin, starvsfólkini ella leiðsluna hjá hesum. Víðarilatan af upplýsingum í hesum sambandi kann ikki metast sum brot á tagnarskylduna.

Uppskotið til áseting er framhald av § 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, sbr. § 26 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, við redaktionellum broytingum.

Ásetingin í § 34 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 37 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 37 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 35**

§ 3 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, sbr. § 27 í hvítvaskfyriskipanini frá 2010, inniheldur krav um tagnarskyldu og reglur um latan av upplýsingum.

Uppskotið til § 35 snýr seg um tagnarskyldu í sambandi við kanningar og fráboðanir, og nær fyritøkur og persónar kunnu lata upplýsingar, uttan at bróta tagnarskylduna.

Ásetingin í § 35 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 38 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 38 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 36**
Í § 18 í galdandi hvítvasklóg er ásett, at tryggingareftirlitið hevur eftirlit við, at fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-4 og nr. 6, í lógini, halda hesa lóg og reglur settar sbrt. lógini. Tryggingareftirlitið hevur eisini eftirlit við, at fyritøkur og persónar, fevndir av § 1, stk. 1, nr. 1-4 og 6 halda "lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler", um hesar fyritøkur og persónar útinna pengaflytingar.

Skotið verður upp í § 36, at Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við, at fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5, í uppskotinum halda hesa lóg og reglur, settar sambært lógini.

Tryggingareftirlitið skal eftir uppskotinum ikki longur hava eftirlit við fyritøkum og persónum, fevnd av peningaflytingarlógini.

Ásetingin í § 36 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 47 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 40 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 37**
Í § 18, stk. 5, í galdandi hvítvaskløgtingslóg er ásett, at fyritøkur og persónar nevnd í stk. 1 skulu lata Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum neyðugar eru til nýtslu í sambandi við eftirlitið við, at hendan lógin ella reglur, settar sbrt. lógini, verða hildnar

Uppskotið snýr seg um atgongdina hjá Tryggingareftirlitinum til upplýsingar, sum eru neyðugar fyri virksemið hjá Tryggingaareftirlitinum

Ásetingin í § 37 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 49 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 42 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 38**
Skotið verður upp í § 38, at Tryggingareftirlitið kann áleggja teimum virkjum og persónum, sum eru nevndir í stk. 1, nr. 1-5, innanfyri eina freist, sum Tryggingareftirlitið hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á ásetingar í hesi lóg, reglur ásettar sambært lógini, ella forordningar, ið innihalda reglur um fíggjarligar revsingar ímóti londum, persónum, bólkum, løgfrøðiligum eindum ella stovnum.

Ásetingin í § 38 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 51 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 44 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 39**

Skotið verður upp, at Tryggingareftirlitið kann áleggja eini fyritøku, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5, at seta tann persónin, sum er tilnevndur sambært § 6, stk. 2, frá starvinum, innanfyri eina freist ásetta av Tryggingareftirlitinum, um persónurin ikki hevur nøktandi vanligt umdømi, ella at atburður hansara gevur grund at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt, sbr. § 6, stk. 2, 4. pkt.

Ásetingin í § 39 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 51 a í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 51 a í 2017/1 LSF 184, sbr. skjal 2 í uppskotinum https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=199966

**Til § 40**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin mótvegis fyritøkum, nevndar í § 1, stk. 1, nr. 1-5 og nr. 6 í uppskotinum, kann áseta reglur um skyldur hjá hesum fyritøkum til at almannakunngera upplýsingar um metingina hjá Tryggingareftirlitinum av fyritøkuni og um, at Tryggingareftiritið hevur møguleika fyri at almannakunngera upplýsingarnar áðrenn fyritøkan.

Ásetingin í § 40 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 53 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 46 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 41**
Skotið verður upp, at hevur ein fyritøka ella persónur, fevndur av § 1, stk. 1, nr. 1-5, latið víðari upplýsingar um fyritøkuna ella persónin, og hevur almenningurin fingið kunnleika um hesar, kann Tryggingareftirlitið geva fyritøkuni ella persóninum boð um at almannakunngera rættleiðandi upplýsingar innanfyri eina av Tryggingareftirlitinum ásetta freist, um Tryggingareftirlitið metir, at upplýsingarnar eru villleiðandi, og um Tryggingareftirlitið metir, at upplýsingarnar kunnu hava skaðiliga ávirkan á fyritøkuna ella viðskiftafólkið hjá persóninum, íleggjarar, aðrar kravánarar, fíggjarligu marknaðirnar, har partabrøvini í fyritøkuni ella virðisbrøv, givin út av fyritøkuni, verða handlað, ella á fíggjarliga støðufestið í síni heild.

Ásetingin í § 41 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 54 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 47 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 42**
Uppskotið til § 42 snýr seg um skyldurnar hjá fyritøkunum og Tryggingareftirlitinum at almannakunngera tiltøk og avgerðir um at lata mál til rannsókn hjá politinum.

Ásetingin í § 42 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 55 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 48 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 43**
Uppskotið til áseting inniheldur tagnarskylduásetingarnar fyri Tryggingareftirlitið.

Ásetingin í § 43 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 55 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 49 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 44**
§§ 15-17 í galdandi hvítvaskløgtingslóg áseta eftirlitsskyldu Skráseting Føroya.

Uppskotið til § 44 snýr seg um eftirlitsskyldu Skráseting Føroya.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 44 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 57 í donslu hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 50 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 45**
Eftir § 15 í galdandi hvítvaskløgtingslóg skulu fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi gjaldoyraveksling ella flyting av pengum og virði og útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur, skrásetast hjá Skráseting Føroya fyri at kunna útinna hetta virksemið.

Uppskotið til § 45 ásetur skrásetingarskyldu fyri fyritøkur og persónar, sum bjóða fram tænastuveitingar til fyritøkur.

Gjaldoyraveksling ella flyting av pengum og virði er ikki við í uppskotinum við tað, at hetta er løgskipað í hvítvaskfyriskipanini.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 45 í uppskotinum, sum tí er orðað einsljóðandi við § 57 í donsku hvítvasklógini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 51 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 46**
Í § 16 í galdandi hvítvaskløgtingslóg er ásett, hvørjar upplýsingar Skráseting Føroya hevur krav upp á, sum neyðugar eru til nýtslu í sambandi við eftirlitið við, at hvítvaskløgtingslógin ella reglur, settar sbrt. lógini, verða hildnar.

Uppskotið til § 45 snýr seg um atgongdina hjá Skráseting Føroya til upplýsingar sum eru neyðugar fyri virksemið hjá skrásetingini.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 46 í uppskotinum, sum tí er orðað einsljóðandi við § 59 í donsku hvítvasklógini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 52 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 47**
Eftir § 15, stk. 5 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, kann Skráseting Føroya áleggja virkjum og persónum, sum eru nevnd í stk. 1, innanfyri eina freist, sum skrásetingin hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á hvítvaskløgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar smbrt. lógini "lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler”. Tað fevnir um grannskoðarar og grannskoðarafyritøkur góðkendar sambært grannskoðaralógini, ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur, fyritøkur og persónar, sum annars vinnuliga lata somu veitingar, sum teir í nr. 6-7, heruppií grannskoðarar, sum ikki eru góðkendir eftir grannskoðaralógini, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar og útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 47 í uppskotinum er tí orðað einsljóðandi við § 60 í donsku hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 53 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 48**
Eftir § 17 í galdandi hvítvaskløgtingslóg kann landsstýrismaðurin fyri tær í § 15 nevndu fyritøkur og persónar áseta nærri reglur um fráboðanir til Skrásetingina, skráseting og almannakunngering, heruppií hvørjar upplýsingar skulu skrásetast.

Fyri fyritøkur og persónar, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 9 í uppskotinum, hemilar uppskotið til § 48, at Skráseting Føroya kann áseta nærri reglur um fráboðan, skráseting og kunngering, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast og hvørji viðurskifti fráboðarar ella onnur kunnu senda inn og skráseta talgilt í kt-skipan hjá Skráseting Føroya, við at nýta talgilda ella samsvarandi talgilda undirskrift, og um nýtslu av hesi skipan.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 47 í uppskotinum er tí orðað einsljóðandi við § 61 í donsku hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 54 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 49**
Ásetingin til § 49 í uppskotinum er nýggj. Galdandi hvítvaskløgtingslóg inniheldur ikki reglur um, at almannakunngering av tiltøkum og avgerðum um at lata mál til kanningar hjá løgregluni verða almannakunngjørd á heimasíðu Skráseting Føroya.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 47 í uppskotinum er tí orðað einsljóðandi við § 62 í donsku hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 55 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 50**
Ásetingin til § 50 í uppskotinum er nýggj. Galdandi hvítvaskløgtingslóg inniheldur ikki tagnarskylduásetingar um starvsfólk hjá Skráseting Føroya.

Samsvarandi áseting er ikki í hvítvaskfyrskipanini við tað at hetta snýr seg um eftirlit við fyritøkum og persónum, sum hava virksemi á yvirtiknum málsøkjum.

Ásetingin í § 50 í uppskotinum er tí orðað einsljóðandi við § 63 í donsku hvítvasklógini, og skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 56 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 51**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá Tryggingareftirlitinum um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi lóg ella reglum, givnar sambært henni, skal vera talgilt.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum kann áseta nærri reglur um talgilt samskifti, undir hesum nýtslu av ávísum kt-skipanum, serligum talgildum sniðum /formatum og talgilda undirskrift ella líknandi.

Ásetingin til § 51 í uppskotinum er nýggj.

Ásetingin í § 51 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 70 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 63 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 52**
Ásetingin til § 52 í uppskotinum er nýggj.

Ásetingin í § 52 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 71 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 64 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 53**
Ásetingin til § 53 í uppskotinum er nýggj.

Ásetingin í § 53 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 72 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 65 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 54**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin kann seta ein bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært hesi lóg. Hesin bólkur skal samskipa váðametingarnar og almennu tiltøkini móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hjá myndugleikunum.

Landsstýrismaðurin kann avgera at víðka skaran við umboðum fyri aðrar myndugleikar.

Ásetingin í § 54 í uppskotinum er nýggj.

Ásetingin í § 53 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 74 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 67 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 55**
Uppskotið inniheldur allýsing av, hvør er partur í einum máli eftir lógini.

Ásetingin er nýggj.

Ásetingin í § 53 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 75 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 68 í 2016/1 LSF 41, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

**Til § 56**
Eftir § 19 í galdandi hvítvaskløgtingslóg, kunnu avgerðir, tiknar av Tryggingareftirlitinum ella Skráseting Føroya eftir lógini ella reglum, settum sbrt. lógini, av honum, sum avgerðin vendir sær til, í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi fekk boð um avgerðina, kærast til Vinnukærunevndina.

Skotið verður upp, at avgerðir, tiknar av Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya, sambært hesi lóg og reglum, ásettar sambært lógini, kunnu av tí, sum avgerðin vendir sær til, verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er kunngjørd fyri viðkomandi.

**Til §§ 57- 59**
Eftir § 57 í uppskotinum verður brot á nærri tilskilaðar ásetingar í uppskotinum revsað við bót.

Við serliga grovum ella umfatandi brotum á nærri tilskilaðar ásetingar í uppskotinum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 6 mánaðir.

Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu vera áløgd revsiábyrgd sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Fyrningarfreistin fyri brot á ásetingarnar í lógini ella reglum, givnar sambært lógini, er 5 ár.

Í reglum, givnar sambært lógini, kann revsing ásetast sum bót fyri brot á reglur, givnar sambært lógini.

Ein fyritøka ella persónur, sum ikki ger eftir boðum, sum eru givin sambært § ..., § ..., stk. 1, ella §§ ... ella ... í uppskotinum verður revsað við bót.

Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § ... í uppskotinum, kann Tryggingareftirlitið sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur, sbr. § 60 í uppskotinum.

Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnur tær skyldur, sum tey eftir lógini hava sambært § ..., kann Skráseting Føroya sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersónunum hjá fyritøkuni dagligar ella vikuligar bøtur, sbr. § 60, stk. 2 í uppskotinum.

**Til § 60**
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. juli 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 7. januar 2020

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: 2016/1 LSF 41 Forslag til Lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme
https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=184323#idf82ad1f7-20b5-4c64-b4cd-b6b8e0f729e0
Fylgiskal 2: 2012/1 LSF 164 Forslag til Lov om ændring af straffeloven, retsplejeloven og forskellige andre love (Styrket indsats over for økonomisk kriminalitet) § 12 í uppskotinum
https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=145572